Ellen G. White Estate

# Vegurin til Kristus



ELLEN G. WHITE

# Vegurin til Kristus

Ellen G. White

2018

Copyright © 2021
Ellen G. White Estate, Inc.

# Information about this Book

## Overview

This eBook is provided by the Ellen G. White Estate. It is included in the larger free Online Books collection on the Ellen G. White Estate Web site.

## About the Author

Ellen G. White (1827-1915) is considered the most widely translated American author, her works having been published in more than 160 languages. She wrote more than 100,000 pages on a wide variety of spiritual and practical topics. Guided by the Holy Spirit, she exalted Jesus and pointed to the Scriptures as the basis of one's faith.

## Further Links

A Brief Biography of Ellen G. White
About the Ellen G. White Estate

## End User License Agreement

The viewing, printing or downloading of this book grants you only a limited, nonexclusive and nontransferable license for use solely by you for your own personal use. This license does not permit republication, distribution, assignment, sublicense, sale, preparation of derivative works, or other use. Any unauthorized use of this book terminates the license granted hereby. (See EGW Writings End User License Agreement.)

## Further Information

For more information about the author, publishers, or how you can support this service, please contact the Ellen G. White Estate

at mail@whiteestate.org. We are thankful for your interest and feedback and wish you God's blessing as you read.

# Formæli

Heitið á hesi lítlu bók lýsir endamál hennara: at vísa á Kristus sum frelsara. Hann er tann einasti, sum kann nøkta okkara innasta tørv og leiða okkum til eitt kristiligt lív - fet fyri fet heim í faðirhúsið. Einfalt og greitt sigur bókin frá trupulleikum, sum kristin kunnu stríðast við, og vísir á loysnir teirra. Høvundurin leggur eisini dent á ta signing, gleði og tann frið, sum vit kunnu fáa, tá vit gloyma okkum sjálv, men fult og heilt líta á frelsuna í Kristusi og hansara náði og megi at halda okkum uppi.

Nógv neyðstødd menniskju hava fingið vón og troyst við at lata seg vegleiða av bókini. Hon hevur hjálpt teimum at ganga við størri áliti og gleði í fótasporum Meistarans. Tí er tað ikki at undrast yvir, at hon hevur fingið góða móttøku og stóra útbreiðslu. Bókin er útkomin í fleiri uppløgum og á mongum málum kring allan heimin.

Tað er okkara vón, at *Vegurin til Kristus* framhaldandi fær nógvar nýggjar lesarar og verður til signing og sálarbót fyri teir, eins og hon hevur verið tað fyri tey mongu, sum higartil hava lært at virðismeta hennara góða innihald.

Útgevararnir

# Contents

Information about this Book . . . . . . . . . . i
Formæli . . . . . . . . . . iii
1. Guds kærleiki til menniskjuni . . . . . . . . . . 5
2. Syndaranum tørvar Kristus . . . . . . . . . . 10
3. Umvending . . . . . . . . . . 14
4. Syndajáttan . . . . . . . . . . 24
5. Halgan . . . . . . . . . . 28
6. Trúgv og frelsa . . . . . . . . . . 32
7. Eyðkenni fyri Jesu lærusveinar . . . . . . . . . . 37
8. Kristin vøkstur . . . . . . . . . . 43
9. Starvið og lívið . . . . . . . . . . 50
10. Kunnleiki um Gud . . . . . . . . . . 55
11. Signing bønarinnar . . . . . . . . . . 60
12. Ivasemi . . . . . . . . . . 68
13. Gleði í Harranum . . . . . . . . . . 74

# 1. Guds kærleiki til menniskjuni [6]

[7]

Bæði náttúran og heilaga skriftin vitna um Guds kærleika. Okkara himmalski faðir er keldan til lív, gleði og vísdóm. Tá vit hyggja at tí vakra og undurfulla í náttúruni, síggja vit, hvussu væl alt hóskar til tørvin og eydnuna hjá bæði menniskjum og øllum øðrum livandi við. Sólin og regnið geva jørðini lív. Fjøllini, høvini og fløturnar vitna øll um skaparans kærleika. Gud fær til vega tað, ið hansara skapningar hava tørv á hvønn dag. Sálmaskaldið sigur:

„Øll venda eygum sínum vónandi til tín,
og tú gevur teim føði teirra í rættum tíma.
Tú letur upp tína hond og mettar alt sum livir,
við signing.“

Sálm. 145,15-16.

Gud skapti menniskjað fullkomið, heilagt og eydnuríkt. Tá [10]
jørðin var liðug frá skaparans hond, var einki, sum følnaði ella doyði. Eingin farri av banning var at síggja. Tað er brot á Guds lóg, lóg kærleikans, sum hevur ført vesaldóm og deyða við sær. Men sjálvt í líðingum, sum eru ein fylgja av synd, opinberast Guds kærleiki. Í 1. Mós. 3,17 stendur, at jørðin varð bannað fyri menniskjans skuld. Men tornir og tistlar, trupulleikar og tvørleikar, sum fylla mannalívið við stríði og stúran, skuldu tæna til teirra gagn. Hetta var við í tí ætlan, Gud legði, so hann kundi lyfta tey upp úr tí oyðilegging og mannminkan, sum syndin hevði ført tey í. Hóast menniskjuni fullu, er alt kortini ikki bara sorg og neyð. Náttúran sjálv ber okkum boð um vón og troyst. Blómur eru á tistlunum, og tornirnar eru fjaldar av rósum.

„Gud er kærleiki.“ Hetta er skrivað á hvønn knubba, ið sprettur, og á hvørt grasstrá, sum nælir. Vøkru fuglarnir, ið fylla luftina við glaðum sangi, yndisliga littu blómurnar við góðum anga, tey tignarligu trøini við teirra grønu bløðum - alt vitnar um Guds kærleiksfullu og faðirligu umsorgan, og at hansara vilji er at gera okkum eydnusom.

Guds orð opinberar hansara lyndi. Hann hevur sjálvur vitnað um sín óendaliga kærleika og miskunnsemi. Tá Móses bað: *„Lat meg tó síggja dýrd tína,“ svaraði Harrin: „Eg skal fara fram við tær í allari dýrd míni.*“ 2. Mós. 33,18-19. Hetta er dýrd Guds. Harrin gekk fram við Mósesi og rópti: „*Harrin, Harrin, miskunnsamur og náðigur Guð, tolinmóður, ríkur í kærleika og trúfesti, sum eyðsýnir*
[11] *kærleika móti túsundum, fyrigevur misgerðir, brot og syndir.“ 2. Mós. 34,6-7. Hann er „náðigur Guð, miskunnsamur, tolinmóður og kærleiksríkur.“ Hann „tekur burtur misbrot og fyrigevur.“ Jón. 4,2; Mika 7,18.*

Gud hevur knýtt okkum at sær við óteljandi teknum á himni og á jørð. Hann hevur opinberað seg fyri okkum gjøgnum náttúruna, og við teimum sterkastu og eymastu jarðisku bondum, sum mannahjørtu kenna. Og tó eru hesi bert ein ófullkomin mynd av hansara kærleika. Hóast Gud gav øll hesi prógv um sín kærleika, so fekk sálarfíggindin tó blindað menniskjuni, so at tey ræddust Gud og hildu, at hann var strangur og ikki at koma til sættis við. Tey hildu, at Guds fremsti eginleiki er strong rættvísi, og at hann er ein harður dómari - ein ómildur og kravmikil lánsharri. Satan lýsti skaparan sum ein, ið hyggur strangliga at menniskjunum fyri at síggja, um tey villast og gera mistøk, so hann kann pína og plága tey við sínum dómum. Jesus kom til hesa jørð og tók bústað okkara milium fyri at taka henda myrka skugga burtur og opinbera Guds æviga kærleika.

Sonur Guds kom av himli fyri at opinbera faðirin. *„Eingin hevur á nøkrum sinni sæð Guð; hin einborni sonurin, sum er í fangi faðirsins, hann hevur kunngjørt hann.“ „Eingin kennir sonin uttan faðirin, og ikki heldur kennir nakar faðirin uttan sonurin og tann, sum sonurin vil opinbera hann.“* Jóh. 1,18; Matt. 11,27. Tá ein av lærusveinunum segði við Jesus: *„Harri, sýn okkum faðirin“, svaraði hann; „So langa tíð havi eg verið hjá tykkum, og tú kennir*
[12] *meg ikki, Filippus? Tann, sum hevur sæð meg, hevur sæð foðirin; hvussu kanst tú tá siga: Sýn okkum faðirin?“* Jóh. 14,8-9.

Jesus lýsti endamálið við at koma til jarðar soleiðis: „*Andi Harrans er yvir mær, av tí hann hevur salvað meg, til at bera fátækum gleðiboð. Sent hevur hann meg út til at boða fangum frælsi og blindum sjón, til at sleppa neyðstøddum leysum.*“ Luk. 4,18. Hetta var lutur hansara. Hann gekk um og gjørdi væl og lekti øll, ið vóru plágað av Satan. Í heilum býum var eingin sjúka og neyð at finna

í nøkrum húsi, tí hann var komin tann vegin og hevði grøtt øll tey sjúku. Verk hansara vitnaðu um kærleika, náði og miskunnsemi, og um at Gud hevði salvað hann. Hann hevði av hjarta eyma samkenslu við menniskjunum og átók sær náttúru teirra fyri at fáa til vega tað, teimum tørvaði. Tey fátæku og minst umhildnu vóru ikki bangin fyri at koma til hansara. Eisini smábørn kendu seg drigin at honum. Teimum dámdi væl at sita á knøum hansara og hyggja inn í hansara milda og kærleiksfulla andlit.

Jesus helt seg ikki aftur at siga sannleikan, men hann bar hann altíð fram í kærleika. Hann var sámiligur í talu og umhugsin móti teimum, sum hann var saman við. Hann var ongantíð óhøviskur og talaði ikki strangliga, uttan at tað var neyðugt. Hann særdi ikki eina viðkvæma sál óneyðugt. Jesus lastaði ikki veikleika menniskjans. Hann dómfeldi sleiskni, vantrúgv og órættvísi, men hevði tár í eygunum, tá ið hann við strongum ábreiðslum átalaði tey. Hann græt um Jerúsalem, staðin, hann elskaði - men sum noktaði at taka ímóti [13]
honum, sum er vegurin, sannleikin og lívið. Tey høvdu vrakað hann, ið var komin at frelsa tey, men hann vísti teimum miskunnsemi og mildleika. Hansara lív var sermerkt av ósjálvsøkni og ótroyttandi umhugsni fyri øðrum. Hvør sál var dýrabar í hansara eygum. Jesu framferð var altíð merkt av guddómligari tign, men samstundis vendi hann sær við eymum kenslum til hvønn lim í Guds familju. Í hvørjum menniskja sá hann eina falna mannasál, sum hann var komin fyri at frelsa.

Hetta var Kristi sinnalag, sum tað kom til sjóndar í lívi hansara; og hetta eyðkennir eisini Guds lyndi. Kristus opinberaði tað guddómliga miskunnsemi, sum flýtur út til menniskjuni frá hjarta faðirsins. Jesus, tann eymi og miskunnsami frelsarin, varð Gud *„opinberaður í holdi.“* 1. Tim. 3,16

Tað var fyri at bjarga okkum, at Jesus livdi, leið og doyði. Hann gjørdist *„harmamaður, royndur í sjúkdómum“*, fyri at vit kunnu fáa lut í ævigari gleði. Gud loyvdi, at hansara elskaði sonur - fullur av náði og sannleika - steig niður frá einum heimi, hvørs dýrd ikki kann lýsast, og fór til ein heim, sum var dálkaður og spiltur av synd og gjørdur myrkur av banning og deyðans skugga. Faðirin loyvdi, at hann fór frá kærleiksfangi sínum, hann, sum einglarnir tilbóðu, til at líða vanæru, háð, mannminkan, hatur og deyða: *„Okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit*

*heilsubót.“* Jes. 53,3.5. Sjá Guds son í oyðimørkini, í Getsemane
[14] og á krossinum! Guds heilagi sonur tók syndabyrðuna á seg. Hann, sum hevði verið eitt við Gud, kendi í sál síni tann ræðuliga skilnað millum Gud og menniskjuni, sum syndin hevur við sær. Tí kom hetta pínufulla róp av varrum hansara: *„Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær?“* Matt. 27,46. Tað var syndabyrðan - kenslan av hvussu ræðulig syndin er, og at hon skilir ein frá Gudi - hetta var orsøkin til, at Jesu hjarta brast.

Hetta stóra offur varð tó ikki givið fyri at vekja kærleika til mannaættina í hjarta faðirsins, ella fyri at gera hann fúsan at frelsa tey. Nei, als ikki: *„Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav son sín, hin einborna.“* Jóh. 3,16. Faðirin elskar okkum ikki orsakað av hesum stóra ofri! Men hann gav ofrið, tí hann elskar okkum. Í Kristusi kundi Gud úthella sín æviga kærleika yvir tann falna heimin. *„Við tað at tað var Guð, sum í Kristi gjørdi heimin sáttan við seg.“* 2. Kor. 5,19. Gud leið saman við syni sínum. Í deyðaangist hansara í Getsemane og í kvølfulla deyðanum á Golgata rindaði hann í óendaliga kærleika sínum tað, sum endurloysn okkara kostaði.

Jesus segði: *„Tí elskar faðirin meg, at eg seti lív mítt til fyri at taka tað aftur.“*Jóh. 10,17. Tað vil siga:„Faðir mín hevur elskað tykkum so høgt, at hann elskar meg enn meira, tí at eg gav mítt lív fyri at frelsa tykkum. Við tað at eg gerist tykkara umboðsog ábyrgdarmaður, gevi lív mítt og átaki maer tykkara skuld og misbrot, verði eg faðirinum meira kærur. Tí við mínum ofri kann Gud vera
[15] rættvísur og tó rættvísgera tann, sum trýr á Jesus.“ Eingin annar enn Guds sonur kundi endurloysa okkum. Tí eingin annar enn tann, sum var í fangi faðirsins, kundi opinbera hann. Einans tann, sum kendi hæddina og dýpdina í Guds kærleika, kundi opinbera hann. Einki minni enn tað æviga offur, sum Kristus bar fram fyri fallin menniskju, megnaði at lýsa kærleika faðirsins til ta glataðu mannaættina.

*„Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna.“*Jóh. 3,16. Hann gav hann ikki bert til at liva milium menniskjuni, til at bera syndir teirra og doyggja sum offur teirra. Gud gav sín son til ta falnu ættina. Kristus skuldi gerast eitt við menniskjuni, við teirra áhugamál og tørv. Hann, sum var eitt við Gud, hevur knýtt seg til mannaættina við bondum, sum aldri skulu slitna. Jesus skammast ikki við at kalla tey systkin síni. (Heb. 2,11) Hann er okkara

offur, okkara talsmaður og bróðir. Sum menniskjusonurin stendur hann í mannalíki framman fyri trúnu faðirsins. Í allar ævir er hann sameintur við ættina, sum hann hevur endurloyst. Hann ger alt hetta fyri at lyfta menniskjuni upp úr tí oyðilegging og mannminkan, ið er ein avleiðing av syndini, so tey kunnu endurspegla Guds kærleika og fáa lut í hansara gleði og heilagleika.

Okkara himmalski faðir veitti eitt ómetaligt offur, tá hann gav son sín til at doyggja fyri okkum. At so nógv varð goldið fyri okkara endurloysn, eigur at geva okkum høgar hugsanir um, hvat vit kunnu gerast í Kristusi.Tá ið ápostulin Johannes sá hæddina, dýpdina og [16]
breiddina í kærleika faðirsins til ta glataðu aettina, fyltist hann við undran og hávirðing. Hann hevði ikki orð fyri stórleikanum í Guds eyma kærleika. Tí biður hann heimin sjálvan skoða hann: *„Síggið, hvussu miklan kærleika faðirin hevur sýnt okkum, at vit skulu verða kallað Guðs børn“* 1. Jóh. 3,1. Menniskjuni hava av sonnum stórt virði í Guds eygum! Við ólýdni komu tey undir Satans vald. Við trúgv á Kristi sáttargerð kunnu Ádams børn nú gerast Guds børn. Við at átaka sær náttúru menniskjans betrar Kristus um mannaættina. Sameind við Kristus kunnu fallin menniskju nú veruliga gerast verd at kallast børn Guds.

Hesin kærleiki finnur ikki sín líka. Børn himmalska kongsins - hvør dýrabar fyrijáttan! Kærleiki Guds til ein heim, ið ikki elskaði hann, er av sonnum eitt evni, sum gevur íblástur til tær djúpastu hugleiðingar! Hesin tanki ger hjartað eyðmjúkt og opnar sinnið fyri Guds vilja. Jú meira vit líta at Guds lyndi í Ijósi av krossinum, tess greiðari síggja vit, hvussu náði og fyrigeving blandast við rætti og rættvísi. Og tess týðuligari síggja vit óteljandi prógv um ein kærleika, ið er ævigur og eina samkenslu, sum er størri enn tann eymasta umsorgan, sum ein jarðisk móðir hevur fyri sínum burturvilsta barni.

[17] ## 2. Syndaranum tørvar Kristus

Menniskjað hevði upprunaliga virðismikil evnir og eitt sinnalag í javnvág. Tað var fullkomið í verumáta og livdi í samljóði við Gud. Tankarnir vóru reinir og allar ætlanir heilagar. Hesir eginleikar spiltust tó av ólýdni, og sjálvgóðskan kom inn í staðin fyri kærleikan. Ólýdni gjørdi náttúru menniskjans so veika, at tað varð ógjørligt at standa ímóti tí ónda í egnari megi. Menniskjað varð fangað av tí ónda, og soleiðis hevði støðan verið í allar ævir, um Gud ikki hevði gjørt nakað við hetta. Freistarans hugsan var at forða Guds ætlan við at skapa menniskjað, og í staðin fylla jørðina við armóð og oyðing. Hann ætlaði so at føra fram, at alt hetta ónda kom av, at Gud hevði skapt menniskjað.

Meðan menniskjað enn var sakleyst, gleddist tað um at vera saman við honum, *„sum allir dýrgripir vísdómsins og*
[18] *kunnleikans eru fjaldir í.“* Kol. 2,3. Men eftir at tað hevði syndað, fann menniskjað onga gleði í heilagleika longur og royndi at goyma seg fyri Gudi. Og soleiðis er støðan enn hjá tí óumvenda hjartanum. Tað er ikki í samljóði við Gud og finnur onga gleði í at vera saman við honum. Ein syndari fær ikki verið eydnusamur í nærveru Guds og trívist ikki saman við heilagum skapningum. Um hann fekk loyvi at koma inn í himmalin, hevði hetta ikki verið nøkur gleði fyri hann. Har er hvørt hjarta fylt av ævigum kærleika, og hesin ósjálvsøkni kærleikin hevði einki aftursvar funnið í sál hansara. Hansara tankar, hugur og áhugamál høvdu verið so nógv øðrvísi enn tey, sum teir syndafríu íbúgvarnir hava. Hann hevði verið eitt misljóð í himmalska kórinum. Himmalin hevði tí verið ein pínustaður fyri syndaran. Hann hevði roynt at fjalt seg fyri honum, sum er Ijós himmalsins og miðdepilin fyri øllum fagnaðinum har. Tað er ikki eitt tilvildarligt boð frá Gudi, sum steingir tey ógudiligu úti frá himlinum. Tey verða útistongd, tí tey sjálv eru óegnað til umstøðurnar har. Guds dýrd hevði verið sum ein oyðandi eldur fyri tey. Tey høvdu verið glað við at verið týnd, so tey kundu krógvað seg fyri andliti hansara, sum doyði fyri at endurloysa tey.

Tað er ógjørligt hjá okkum í egnari kraft at sleppa upp úr tí syndadýpi, sum vit eru sokkin í. Hjørtu okkara eru syndafull, og vit kunnu ikki broyta tey. *„Ja, kundi reinur komið av óreinum! Nei, ikki ein!“ „Tí at trá holdsins er fíggindskapur móti Guði, av tí at hon ikki er Guðs lóg lýðin, ja, kann held- ur ikki vera tað“* Job 14,4; [19]
Róm. 8,7. Lærdómur, mentan, góður vilji og stríð menniskjans kann vera til gagns á røttum staði, men her er tað nyttuleyst. Alt hetta kann skapa eina góða atferð útvortis, men ikki broyta hjartað og reinsa lívsins kelduvað. Har skal ein kraft til, ið virkar innanífrá, og menniskjað má fáa eitt nýtt lív omanífrá, áðrenn tað kann broytast frá synd til heilagleika. Henda kraft er Kristus. Bert hansara náði kann vekja tey sovandi evnini í sinninum, og draga tey til Gud og til heilagleika.

Frelsarin segði: *„Eingin kann síggja Guðs ríki, uttan hann verður føddur av nýggjum.“* Jóh. 3,3. Menniskjað má fáa eitt nýtt hjarta, nýggj ynskir, ætlanir og endamál. Tankin, at tað bert er neyðugt at menna tað góða, sum er í menniskjans náttúru, er ein vandamikil villleiðing. Eitt menniskja, sum ikki er andaligt, *„tekur ikki við ti, sum hoyrir Guðs anda til, ti at tað er henni dárskapur, og hon er ikki før fyri at kenna tað, av ti at tað verður dømt á andligan hátt.“ „Undrast ikki um, at eg segði við teg: Tit mega verða født av nýggjum.“* 1. Kor. 2,14; Jóh. 3,7. Um Kristus stendur soleiðis: Í honum *„var lív, og lívið var Ijós menniskjunnar.“* Jóh. 1,4. Og Jesu navn er tað einasta navn *„undir himlinum, givið milium manna, sum vit skulu verða frelstir við.“ Áp. 4,12.*

Tað er ikki nóg mikið at síggja Guds stóra kærleika, hansara miskunn og faðirliga eymleika.Tað er ikki nóg mikið at fata vísdómin og rættvísina í lóg hansara og síggja, at hon er grundað á kærleikans ævigu grundreglu. Paulus ápostul sá alt hetta og segði:*„ Tá gevi eg* [20]
*lógini viðhald í tí, at hon er góð.“ „Soleiðis er tá lógin heilag, og boðorðið heilagt og rættvíst og goff.“* Róm. 7,16.12. Í sálarangist og vónloysi legði hann afturat: *„Eg eri holdligur, seldur undir syndina.“* Róm. 7, 14. Hann tráaði eftir tí reinleika og rættvísi, sum hann ikki megnaði at fáa av sær sjálvum. Hann mælti: *„Eg, neyðar menniskja! Hvør skal bjarga mær frá hesum deyðans likami?“* Róm. 7,24. Soleiðis Ijóðar rópið frá tyngdum hjørtum í øllum londum og til allar tíðir. Tað er bert eitt svar til øll hesi: *„Sí, Guðs lambið, sum ber synd heimsins!“* Jóh. 1,29.

Andi Guds hevur við mongum líknilsum roynt at greiða frá hesum sannleika fyri teimum, sum tráa eftir at sleppa undan syndabyrðum sínum. Tá ið Jákup flýddi frá heiminum hjá foreldrunum, eftir at hann hevði syndað og lumpað bróður sin, Esav, kendi hann tyngdina av síni synd. Hann var einsamallur og burturvístur, skildur frá øllum tí, sum hevði gjørt honum lívið kært. Men ein tanki nívdi hansara sinni meira enn allir aðrir.Tað var óttin fyri, at hansara synd hevði skilt hann frá Gudi. Tungur í huga legði hann seg til hvíldar á berajólum úti í haganum. Yvir høvdinum var tann klári stjørnuhimmalin. Í svøvni birtist eitt undarlig Ijós fyri honum. Hann sá ein stiga, sum røkk frá jørðini og líka upp til himmalsins portur. Einglar Guds gingu upp og niður í stiganum. Úr dýrd himmalsins hoyrdi hann rødd Guds, sum boðaði honum vón og troyst. Soleiðis fekk Jákup tað, ið honum longdist eftir - boðskapin um ein frelsara. Við gleði og takksemi sá hann nú ein útveg, so hann, syndarin, aftur
[21] kundi koma í samljóð við Gud. Hin loyndarfulli stigin ímyndaði Jesus, sum er einasti millummaður milium Gud og menniskju.

Tá Jesus tosaði við Nathanael, brúkti hann somu mynd:“ *Tit skulu síggja himmalin opnan, og einglar Guðs stiga upp og stíga niður yvir menniskjusonin.* “Jóh. 1,52. Menniskjað skildi seg sjálvt frá Gudi við fráfallinum. Harvið varð alt samband milium himmalin og jørðina slitið, og tað dýpi, sum nú lá teirra milium, kundi einki menniskja koma yvirum. Men ígjøgnum Kristus hevur jørðin aftur fingið samband við himmalin. Við síni tænastu hevur Kristus lagt brúgv yvir um ta avgrund, sum syndin hevur gjørt, so at tænandi einglar kunnu hava samskifti við menniskjuni. Tað falna menniskjað er veikt og hjálparleyst, men Kristus bindur tað saman við kelduna til allan mátt.

Menniskju kunnu droyma um framgongd og um at gera mannaættina góða. Men hetta er til fánýtis, um tey ikki leita til ta einastu kelduna, har vón og hjálp er at finna fyri falnu ættina.“*Hvørein góð gáva og hvørein fullkomin gáva*“ er frá Gudi. Ják. 1,17. Skildur frá Gudi kann eingin hava eitt veruliga gott og stórbært lyndi. Kristus er einasti vegurin til Guds. Hann sigur: *„Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“* Jóh. 14,6.

Í hjarta sínum harmast Gud um síni jarðisku børn við einum kærleika, sum er sterkari enn deyðin.Tá hann gav son sín, gav hann okkum alt tað, sum himmalin átti, í hesi einu gávu. Frelsarin livdi,

doyði og gongur í forbøn fyri okkum. Heilagi andin kallar, og faðirin arbeiðir yvir øllum og ígjøgnum alt. Einglarnir visa stóran áhuga fyri okkum og veita sína tænastu. Alt hetta verður gjørt fyri at frelsa menniskjuni. [22]

Latið okkum hugsa um tað undurfulla offur, sum er fullgjørt fyri okkum. Latið okkum virðismeta tað arbeiðið og ágrýtnið, sum himmalin vísir fyri at frelsa tey glataðu og føra tey aftur til hús faðirsins. Sterkari grundir kundu ikki verið givnar, ella kraftmiklari gerðir gjørdar. Menniskju kunnu fáa himmalsins gleði og vera saman við einglunum, Gudi sjálvum og syni hansara í kærleika. Í himlinum skulu øll okkara evnir mennast og góðskast gjøgnum ævinleikan. Átti ikki alt hetta at ávirka og eggja okkum til at tæna og elska skapara og endurloysara okkara av fullum huga?

Hinvegin greiðir Guds orð eisini frá dómum Harrans yvir syndina, tí afturløn, sum ikki slepst undan, okkara lyndisspillu og tí endaligu oyðingini. Hetta verður gjørt fyri at ávara okkum ímóti at tæna Satan.

Eiga vit ikki at geva Guds náði gætur? Hvat meira kundi hann havt gjørt? Latið okkum søkja Gud og fáa viðurskiftini í rættlag við hann, sum hevur elskað okkum við einum so undurfullum kaerleika! Latið okkum nýta tær leiðir, sum standa opnar fyri okkum, so vit kunnu broytast eftir hansara mynd og koma í samljóð við hann. So kunnu vit aftur verða saman við teimum heilagu einglunum og sameinast við faðirin og sonin.

[23] # 3. Umvending

Hvussu kann eitt menniskja gerast rættvíst fyri Gudi? Hvussu kann ein syndari verða rættvísgjørdur? Vit kunnu bert koma í samljóð við Gud, hin heilaga, ígjøgnum Kristus. Men hvussu kunnu vit koma til Kristus? Mong spyrja sum fjøldin á hvítusunnudegi: *„Hvat eiga vit at gera?“* Tað fyrsta, Pætur segði, var: *„Vendið um.“* Og við eitt høvi stutt eftir segði hann: *„Fáið tí eitt annað sinnalag og vendið um, fyri at syndir tykkara mega verða strikaðar.“* Áp. 2,37-38; 3,19.

Iðran merkir, at menniskjað syrgir yvir syndina og vendir sær burtur frá henni. Vit fara ikki at venda okkum frá henni, fyrr enn vit síggja, hvussu andstyggilig hon er. Og eingin verulig broyting hendir, fyrr enn vit av hjarta venda okkum frá henni.

[24] Mong skilja ikki, hvat tað veruliga vil siga at vera umvendur. Nógv eru kedd um, at tey hava syndað. Hesi kunnu enntá gera eina útvortis broyting til tað betra, tí tey óttast fyri, at tey koma at líða fyri teirra óndu gerningar. Men hetta er ikki umvending, sum Bíblian talar um. Tey klaga meira um sjálva líðingina enn um syndina. Esav syrgdi á henda hátt, tá hann sá, at hann fyri ævir hevði latið frumburðarrættin gleppa sær av hondum. Tá ið eingilin við drignum svørði steðgaði Bileami á vegnum, varð hann ræddur og viðgekk sína synd, tí hann var bangin fyri at missa lívið. Men har var eingin angur um syndina, eingin broyting í hansara ætlanum, eingin andstygd fyri tí illa. Tá ið Judas hevði svikið Harra sín, segði hann: *„Eg havi syndað, við tað at eg sveik sakleyst blóð.“* Matt. 27,4.

Henda játtan varð tvungin fram úr hansara skuldartyngda hjarta, av tí at hann var ræðsluslígin fyri fordøming og dómi. Hann óttaðist tær avleiðingar, sum hann væntaði fóru at koma. Men í hjarta hansara var eingin djúp sorg um, at hann hevði svikið Guds óseka son og avnoktað hin heilaga í Ísrael. Tá Farao leið undir Guds revsidómum, játtaði hann sína synd fyri at sleppa undan fleiri vanlukkum. Men so skjótt sum plágurnar hildu uppat, treiskaðist hann aftur móti Har-

ranum. Allir hesir menn vóru harmir um avleiðingarnar av syndini, men teir kendu onga sorg yvir sjálva syndina.

Men tá mannahjartað gevur eftir fyri ávirkanini frá Heilaga Andanum, verður samvitskan vakt. Syndarin vil fata nakað av dýpdini [25]
og heilagleikanum í Guds lóg, sum er grundvøllurin fyri hansara stjórnarskipan bæði í himli og á jørð. *„Hitt sanna ljósið, sum upplýsir hvørja mennisku,“* lýsir inn í innastu kømur hjartans, og tað, sum er fjalt í myrkrinum, kemur fram í dagslýsið. Jóh. 1,9. Sannføring um synd treingir inn í hjarta, sál og sinni. Syndarin skilir nakað av rættvísi Jehovas og merkir, hvussu ræðuligt tað er at standa við síni syndaskuld og óreinsku framman fyri honum, ið rannsakar hjørtuni. Hann sær Guds kærleika, hvussu góður heilagleiki er, og hvør gleði er í reinleika. Hann tráar eftir at verða reinsaður og fáa samband við himmalin.

Sonn sorg yvir syndina sæst týðiliga í bønini, sum Dávid bað, eftir at hann fall. Hansara iðran var djúp og meint av hjarta. Hann royndi ikki at umbera sína synd. Í hansara bøn var eingin áheitan um at sleppa undan tí revsing, ið hótti hann. Dávid sá, hvussu ræðuligt hansara misbrot var. Hann sá, at sinnið var dálkað og vamlaðist við synd sína. Hann bað ikki einans um syndafyrigeving, men eisini um eitt reint hjarta. Honum longdist eftir gleðini í heilagleika, so hann aftur kundi fáa samband við Gud og koma í samljóð við hann. Hann segði av hjarta:

> „Sælur er hann, hvørs misbrot er fyrigivið,
> hvørs synd er kvittað.
> Sælur er maður, hvørs syndasekt Harrin ei roknar,
> og í hvørs anda ikki eru svik.“

Sálm. 32,1-2.

> „Náða meg, Guð, fyri miskunn tína, [26]
> fyri tína stóru várkunn strika út misgerðir mínar!...
> Tí misgerðir mínar eg veit,
> synd mín er mær altíð fyri eygum!...
> Reinsa meg við ýsopi, so at eg verði reinur,
> tváa meg, so at eg verði hvítari enn fann!...
> Skapa, Guð, mær hjarta reint,
> gev mær av nýggjum fastan anda mær í brósti;

koyr meg ei burtur frá ásjón tíni,
tak ei tín heilaga anda frá mær!
Veit mær aftur gleði um frelsu tína,
halt mær uppi við einum reystum anda!...
Bjarga mær, Guð, frá blóðsøk, mínar frelsunnar Guð!
Lat tungu mína gleðast um rættvísi tína!“

Sálm. 51,3-16.

Eina umvending sum hesa megna vit ikki í egnari megi. Bert Kristus kann fremja hana - hann, sum fór upp á hæddina og hevur givið menniskjunum gávur.

Júst her fara mong skeiv og fáa tí ikki ta hjálp, ið Kristus ynskir at geva teimum. Tey halda, at tey ikki kunnu koma til hansara uttan at venda um fyrst, og at henda umvending fyrireikar vegin fyri syndafyrigeving. Tað er rætt, at umvending kemur áðrenn syndafyrigeving, tí tað eru bert sundurbrotin og iðrandi hjørtu, ið kenna tørv á einum frelsara. Men noyðist syndarin at bíða við at koma til Jesus, til hann hevur vent um? Skal umvendingin verða ein forðan, ið kann koma ímillum syndaran og frelsaran?

[27] Bíblian lærir ikki, at syndarin fyrst má venda um, áðrenn hann kann taka ímóti hesi innbjóðing frá Kristusi: *„Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu.“*Matt. 11,28. Tað er júst kraftin, sum Kristus gevur, ið leiðir til sanna iðran. Pætur gjørdi hetta greitt í sínum vitnisburði fyri ísraelsmonnum, tá hann segði: *„Henda hevur Guð hevjað upp við síni høgru hond til høvdinga og frelsara til at veita Ísrael umvending og syndafyrigeving.“* Áp. 5,31. Vit kunnu eins lítið umvenda okkum, uttan at Kristi Andi vekir samvitskuna, sum vit kunnu fáa syndafyrigeving uttan Kristus.

Kristus er keldan til hvørt ynski um at gera tað rætta. Hann er tann einasti, sum kann planta fíggindskap ímóti syndini í hjartað. Hvør longsul eftir sannleika og reinleika, hvør sannføring um synd vitnar um, at hansara Andi virkar á okkara hjørtu.

Jesus hevur sagt:*„Og tá ið eg verði lyftur upp frá jørðini, skal eg draga allar til mín.“* Jóh. 12,32. Syndarin má síggja Kristus opinberaðan sum tann frelsara, sum doyði fyri heimsins syndir. Tá vit síggja Guds lamb á Golgata krossi, byrja vit at skilja loyndardómin í endurloysingini. Guds góðska leiðir okkum til umvending. Tá ið

Kristus doyði fyri syndarar, vísti hann ein kærleika, sum ikki er til at fata. Tá syndarin sær henda kærleika, vil kærleikin bloyta hjartað, røra sálina og vekja sorg í hjartanum um syndina.

Tað er rætt, at fólk stundum skamma seg um tað, tey hava gjørt [28] og leggja nakrar av sínum Ijótu vanum av, áðrenn tey gerast greið yvir, at Kristus er í ferð við at draga tey til sín. Men hvørja ferð tey royna at gera broytingar til tað betra, tí tey av hjarta ynskja at gera tað rætta, so er tað altíð Kristi kraft, sum dregur tey. Ein ávirkan, ið hesi ikki sjálv eru tilvitaði um, virkar á sálina. Samvitskan vaknar, og tað útvortis lívið batnar. Tá Kristus so fær tey til at hyggja á krossin og skoða hann, sum syndir teirra hava gjøgnumborað, so vil hansara boð virka á samvitsku teirra. Tað verður opinberað fyri teimum, hvørja ávirkan óndskapurin hevur havt í teirra lívi. Tey síggja eisini, hvussu djúpt inngrógvin syndin er í sálina. Tey byrja at skilja eitt sindur av Kristi rættvísi og rópa: Hvat er tó syndin fyri nakað, at hon skuldi krevja eitt slíkt offur fyri at frelsa syndaran? Var so stórur kærleiki, so nógv líðing og eyðmýking neyðug, fyri at vit ikki skuldu glatast, men hava eitt aevigt lív?

Syndarin kann standa ímóti hesum kærleika og nokta at lata seg draga til Kristus. Men um hann ikki setur seg ímóti, so vil hann verða drigin til Jesus. Kunnleiki um frelsuætlanina vil leiða hann til krossins fót í iðran um syndir sínar, ið vóru orsøkin til, at Guds kæri sonur leið.

Hin sami guddómsandi, sum virkar í náttúruni, talar til mannahjørtuni og skapar ein ósigandi longsul eftir nøkrum, ið tey ikki hava. Einki, sum heimurin kann bjóða, kann nøkta henda longsul. Guds Andi áminnir tey inniliga um at søkja tað einasta, sum kann geva frið og hvíld: Kristi náði og heilaga gleði. Við sjónli- [29] gari og ósjónligari ávirkan roynir Frelsari okkara støðugt at draga menniskjuni til tær ævigu signingar, ið tey kunnu fáa frá honum, og burtur frá tí ófullkomnu gleði, ið syndin gevur.Til allar tær sálir, sum til fánýtis royna at drekka av teimum ótøttu brunnunum í hesum heimi, Ijóðar enn hesin guddómligi boðskapur: *„Og tann, sum tystur er, hann komi! Hvør, sum vil, hann taki lívsins vatn fyri einki!“* Op. 22,17.

Tú, sum í hjarta tínum hevur ein longsul eftir nøkrum betri enn tí, sum hesin heimur hevur at bjóða, kanst vita, at hetta er rødd Guds í tínum sinni. Bið hann um at geva tær umvending og at opinbera

Kristus fyri tær í hansara æviga kaerleika og fullkomna reinleika. Í lívi sínum gav Frelsarin eitt fullkomið dømi um meginreglurnar í Guds lóg: kærleiki til Gud og kærleiki til menniskjuni. Góðar gerðir og ósjálvsøkin kærleiki var tað, sum var fremst í hansara huga. Tá ið vit hyggja at Frelsaranum, og Ijósið frá honum fellur á okk-um, síggja vit okkara egnu syndugu støðu.

Møguliga hava vit eins og Nikodemus smikrað okkum við, at okkara lív hevur verið reint og okkara atburður falsleysur. Vit meina kanska, at tað ikki er neyðugt hjá okkum at eyðmýkja okkara hjørtu fyri Gudi, soleiðis sum vanligir syndarar mugu gera. Men tá ið Ijósið frá Kristusi skínur inn í sál okkara, fáa vit at síggja, at vit ikki eru rein. Vit gerast var við, hvussu sjálvsøkni og fíggindskapur ímóti Gudi hava ávirkað lívið. Tá fara vit at skilja, at okkara egna rættvísi
[30] er sum eitt dálkað klæði, og at bert Kristi blóð kann reinsa okkum frá syndadálkan og endurnýggja okkara hjørtu eftir hansara egnu mynd.

Tá ein glæma av Guds kærleika og Kristi reinleika treingir ígjøgnum sálina, vil hon týðiliga vísa á hvønn syndablett og opinbera skeivleikarnar í muru menniskjans. Henda glæma vísir á vanhalgaða tráan, hvussu svikafult hjartað kann vera, og hvussu órein tungan kann vera. Syndarin sær sítt ólýdni og tær gerðir, har hann setti Guds lóg til viks. Andi hansara verður sannførdur og harmast um syndina, sum Guds rannsakandi Andi avdúkar. Hann leiðist við seg sjálvan, tá ið hann skoðar Kristi reina og óspilta lyndi.

Profeturin Dánjal kendi sín egna veikleika og ófullkomileika, tá hann sá ta dýrd, sum var rundan um himmalska sendiboðið, sum kom til hansara. Hann lýsir hetta soleiðis: *„Men tá ið eg hevði sæð hesa miklu sjón, var eingin megi eftir í mær, andlitið skifti lit og avskeplaðist, og eg kom burtur í einki.“* Dán. 10,8. Tað menniskja, ið upplivir nakað tílíkt, vil leiðast við sítt egna sjálvsøkni og eginkærleika. Gjøgnum Kristi rættvísi vil tað sóknast eftir tí hjartans reinleika, sum er í samsvari við Guds lóg og Kristi lyndiseyðkennir.

Paulus segði seg vera *„samsvarandi lógini ólastandi,“* nevniliga so leingi tað snúði seg um hansara útvortis gerðir. Fil. 3,6. Men tá ið hann skilti ta andaligu síðuna av lógini, sá hann seg sjálvan sum ein syndara. Hann hevði hildið seg frá synd, so langt sum dømast
[31] kundi eftir lógarinnar bókstavi, og soleiðis sum menniskjuni brúka hana útvortis. Men tá ið hann sá tann djúpa týdningin í Guds heilagu

boðum, og sá seg sjálvan, sum Gud sá hann, boygdi hann seg í eyðmýkt og játtaði synd sína. Hann segði: *„Eg livdi einaferð uttan lóg; men tá ið boðorðið kom, livnaði syndin við, men eg doyði.“* Róm. 7,9-10. Tá ið hann sá lógarinnar andaligu náttúru, vísti syndin seg í síni veruligu andstygd, og hann helt ikki longur so nógv um seg sjálvan.

Ikki allar syndir eru líka stórar í Guds eygum. Eftir hansara meting, eins væl og eftir menniskjans meting, eru ymisk stig av synd. Men hvussu týdningarleys hendan ella hin gerðin kann tykjast at vera í mannaeygum, er tó eingin synd lítil í Guds eygum. Menniskjað heldur ofta við øðrum partinum í eini sak, og dómur tess er ófullkomin. Gud sær hinvegin alt, sum tað í veruleikanum er. Tað verður hildið hánt um drykkjumannin og sagt verður við hann, at synd hansara steingir hann úti frá himlinum. Hinvegin verða hugmóð, sjálvsøkni og gírni ofta ikki átalað. Men hesar syndir eru serstakliga andstyggiligar fyri Gudi. Tær eru í stríð við hansara verumáta, miskunnsemi og tann ósjálvsøkna kærleika, sum er grundleggjandi eginleikin í tí syndafría heiminum. Tann, ið fellur í eina ella aðra stóra synd, kann hava eina kenslu av neyð og skomm og sær tørvin á Kristi náði. Men hugmóð kennir ongan tørv og steingir tí hjartað fyri Kristi og teimum ævigu signingum, sum hann kom fyri at veita okkum.

Hin neyðars tollarin bað:*„Guð náði meg syndara!“*Luk. 18,13. Hann sá seg sjálvan sum ein ógvuliga ógudiligan mann, og onnur [32]
hildu tað sama um hann. Men hann kendi, at hann hevði tørv á frelsu, og tyngdur av síni synd og skomm kom hann til Gud og bað um náði. Hjarta hansara var opið fyri Guds Anda, sum tí kundi fremja sítt náðarverk og loysa hann úr syndarinnar valdi. Men bønin, sum farisearin bað, var full av reypi og sjálvrættvísi. Hon vísti, at hjarta hansara var afturlatið fyri ávirkan frá Heilaga Andanum. Fjarstøðan milium hann og Gud var so stór, at hann onga tilvitan hevði um sína egnu syndigu støðu mótvegis Guds heilagleika og fullkomileika. Hann skilti ikki, at honum tørvaði nakað, og hann fekk tí einki.

Um tú sært tína syndugu støðu, so bíða ikki, tí tú vilt royna at gera teg sjálvan betri fyrst. Hvussu mong eru ikki tey, ið halda, at tey ikki eru nóg góð at koma til Kristus! Væntar tú at gerast betri við tínum egnu royndum? *„Kann Blámaðurin broyta skinslit og pantarin flekkir sínar? Tá høvdu eisini tit, sum eru so kønir í tí illa,*

*kunnað gjørt tað góða.“* Jer. 13,23. Tað er eingin hjálp hjá okkum at finna, uttan hjá Gudi. Vit eiga ikki at bíða eftir, at vit verða yvirtalað við størri kraft, ella at eitt betri høvi býðst okkum ella eftir einum meira heilagum sinnalagi. Vit kunnu einki gera fyri okkum sjálv. Vit mugu koma til Kristus, júst soleiðis sum vit eru.

Lat tó ongan lumpa seg sjálvan við tí hugsan, at Gud í sínum stóra kærleika og miskunnsomu náði vil frelsa enntá tey, sum vraka hansara náði. Bert í ljósinum av krossinum kann metast um, hvussu
[33] andstyggilig syndin er. Tá ið menniskjuni siga, at Gud er ov góður til at kasta syndarar frá sær, so eiga tey at hyggja á Golgata.Tað, sum hendi har, vísir, at frelsan ikki kundi vinnast á annan hátt. Tað er ógjørligt fyri menniskju uttan Kristi offur at sleppa undan smittandi megini í syndini og aftur verða saman við heilagum skapningum. Menniskju kunnu ikki sjálv fáa lut í tí andaliga lívinum aftur. Tí átók Kristus sær skuld hina ólýdnu og leið í syndara stað. Kærleikin, sum Guds sonur vísti, líðing og deyði hansara, eru prógv um, hvussu andstyggilig syndin er. Hetta vísir, at tað finst eingin frelsa frá syndarinnar mátti, eingin vón um eitt hægri lív, uttan at sálin gevur seg yvir til Kristus.

Tey óumvendu umbera seg viðhvørt við at siga um tey, sum kalla seg kristin: „Eg eri líka góður sum tey. Tey nokta ikki sær sjálvum meira enn eg. Tey eru ikki meira fráhaldandi í rúsdrekka ella varin í síni framferð enn eg eri. Tey elska stuttleikar og njóting, eins og eg geri.“ Soleiðis brúka tey mistøk hjá øðrum sum umbering fyri at misrøkja sínar egnu skyldur. Men syndir ella brek hjá øðrum kunnu ikki umbera nakran, tí Harrin hevur ikki givið okkum eitt ófullkomið menniskjaligt mynstur at fylgja. Guds lýtaleysi sonur er okkara fyridømi. Og tey, ið klaga um vánaligu framferð teirra navnkristnu, eru just tey menniskju, sum áttu at livað eitt betri lív og víst eitt meira hásinnað fyridømi. Um tey hava eina so høga hugsjón um, hvussu ein kristin eigur at vera, er tá ikki teirra egna synd nógv størri? Tey vita, hvat ið er rætt, men gera tað kortini ikki.

[34] Ansa tær fyri at útseta tað, bíða ikki til eina aðru ferð við at avnokta syndirnar og fáa hjarta títt reinsað í Jesu blóði. Túsundavís av menniskjum eru farin skeiv her, til teirra ævigu glatan. Eg ætli ikki at dvølja við, hvussu óvist og stutt lívið her á jørð kann vera. Men um vit bíða við at lurta eftir rødd Heilaga Andans, so kann hetta koma okkum í ræðuligan vanda - ein vanda, sum nógv ikki

skilja nóg væl. Tí tað at bíða merkir í veruleikanum, at vit velja at liva í synd. Og hvussu lítla ein enn heldur syndina vera, kann ein ikki geva seg yvir til hana uttan vanda fyri ævigari glatan. Tað, sum vit ikki vinna á, vinnur á okkum og virkar fyri okkara egnu oyðing.

Adam og Eva hugsaðu sum so, at eitt so lítið mál sum at eta av tí forbodnu fruktini ikki kundi føra so ræðuligar fylgjur við sær, sum Gud hevði sagt. Men hetta ‚lítla' mál var brot á Guds heilagu, óbroytiligu lóg, og skilti tey frá Gudi, opnaði deyðans portur og hevði við sær vesældóm og vanlukku inn í henda heim. Øld eftir øld hava neyðarróp og klagur stigið upp frá jørðini, og allur skapningurin hevur stynjað í pínu. Hetta er avleiðingin av fyrsta ólýdni menniskjans. Himmalin sjálvur fekk at kenna árinið av uppreistrinum ímóti Gudi. Krossurin stendur sum eitt minni um tað undurfulla offur, sum var neyðugt fyri at gera sátt fyri brotið á ta guddommiligu lógina. Lat okkum ikki líta at synd, sum um hon einki hevur at týða.

Hvørt misbrot og hvør hending, har Kristi náði verður sett til viks og vrakað, fellur aftur á teg sjálvan. Tað forherðar hjartað, skaðar [35]
viljan og doyvir vitið. Bæði hugurin og evnini til at geva eftir fyri mildu kallanini frá Heilaga Andanum vikna.

Mong troysta sína tyngdu samvitsku við, at tey kunnu broyta teirra ringa atburð, tá ið tey vilja. Tey halda seg kunna ganga lætt um innbjóðing náðinnar, og tó aftur og aftur ávirkast av Andanum. Tey meina, at hóast tey hava víst vanvirðing fyri Anda náðinnar og hava brúkt teirra ávirkan á Satans síðu, so kunnu tey víkja frá teirra ónda vegi, um tey skuldu komið í dýrastu neyð. Men hetta er alt annað enn lætt. Uppaling og royndir ígjøgnum eitt heilt lív hava so dyggiliga myndað teirra lyndi, so at bert fá tá ynskja at broytast eftir Jesu mynd.

Bert eitt skeivt frávik í lyndishátti, bert eitt syndugt ynski, sum ein heldur fast við, kann til endans gera kraftina í gleðiboðskapinum til einkis. Øll njótan av synd, hvør hon so er, styrkir mótstøðuna móti Gudi í sinninum. Tann, sum vísir harðvunna og treiska vantrúgv ella dølska líkasælu ímóti sannleika Guds, heystar bert tað, sum viðkomandi hevur sáað. Í allari Bíbliuni finst ikki nøkur ræðuligari ávaring ímóti at fara lætt um tað ónda, enn hjá tí vísa manninum: *„Hin gudleysi verður fangaður í misgerðum sínum, verður fastur í syndabondum sínum.“* Orðt. 5,22.

Kristus er til reiðar at frelsa okkum frá synd, men hann noyðir ongan. Um vit halda áfram í misbrotum okkara, treiskast í tí ónda og
[36] ikki ynskja at verða frelst og taka ímóti náðini, hvat meira kann hann so gera? Tað er okkara egna skuld, at vit glatast, tá ið vit áhaldandi og viljafast kasta kærleika hansara aftur. *„Sí, nú er tað ein sonn gævustund, sí, nú er tað ein frelsudagur!“ „Í dag, um tit hoyra rødd hansara, tá forherðið ikki hjørtu tykkara.“* 2. Kor. 6,2; Hebr. 3,7-8.

*„Maður hyggur at tí, ið væl stendur í eygunum, men Guð hyggur at hjartanum.“*1. Sám.16,7. Hann sær mannahjartað við tess gleði og sorgum; hetta óróliga, vilsta hjarta, sum ikki er reint og sakleyst. Hann kennir tess grundir, innastu endamál og ætlanir. Far til hansara við sál tíni - við øllum teim lýtum, sum hon hevur. Opna kømur hennara eins og sálmaskaldið fyri tí alt síggjandi eyga og rópa:*„Kanna meg, Guð, og kenn mítt hjarta, rannsaka meg og kenn mína hugsan! Vita, um eg gangi á glatunarvegi og leið meg hin æviga vegin!“* Sálm. 139,23-24.

Mong hava eina trúgv, har tey vita, hvat ið er rætt, men hjartað er ikki reinsað. Hesi hava bert eitt eiti av gudsótta. Lat bøn tína vera: *„Skapa, Guð, mær hjarta reint, gev mær av nýggjum fastan anda mær í brósti.“* Sálm. 51,12. Ver reinmeintur móti tíni egnu sál. Ver líka álvarsamur og áhaldin, sum tú hevði verið, um tú vart í lívsvanda. Hetta er ein søk, sum má avgerast millum Gud og teg sjálvan, og avgerðin hevur ævigan týdning. Ein vón, sum ikki er annað enn heilaspuni, vil verða tær til óbótaligan skaða.

Rannsaka orð Guds í bøn. Guds lóg og Kristi lív lýsa tær stóru
[37] grundreglurnar í heilagleika: *„Tráið eftir friði við øll og eftir halgan; tí at uttan hana skal eingin síggja Harran.“* Hebr. 12,14. Guds orð sannførir um synd og opinberar týðiliga vegin til frelsu. Gev hesum ans, tí hetta er Guds rødd, ið talar til tín.

Tá ið tú sært, hvussu ræðulig syndin er, og tú sært teg sjálvan, sum tú í veruleikanum ert, so fall ikki í fátt. Kristus kom júst fyri at frelsa syndarar. Vit skulu ikki sjálv gera Gud sáttan við okkum. Men hvør undurfullur kærleiki: „Tað var Guð, sum í Kristi gjørdi heimin sáttan við seg.“ 2. Kor. 5,19. Í sínum eyma kaerleika bjóðar hann vinarliga sínum burturvilstu børnum at koma til sín. Eingi jarðisk foreldur kunnu vera so tolin við mistøkunum hjá sínum børnum, sum Gud er við teimum, ið hann roynir at frelsa. Eingin kann áminna lógbrótarar blídligari. Ongar mannavarrar hava nakrantíð

givið eina inniligari innbjóðing til tey burturvilstu. ØII hansara lyftir og ávaringar vísa ikki nakað annað enn stóran kærleika.

Tá ið lllimaður kemur og sigur, at tú ert ein stórur syndari, so skalt tú líta á Frelsara tín og tala um tað, sum hann hevur gjørt. Ljós Frelsarans skal verða tín hjálp. Játta, at tú hevur syndað, men sig við fíggindan: *„Kristus Jesus kom í heimin at frelsa syndarar.“* 1. Tim. 1,15. Og tí kanst tú verða frelstur við hansara botnleysa kærleika. Jesus spurdi Símun ein spurning um tveir skuldarar. Annar skyldaði Harra sínum bert eitt sindur, hin nógv. Harri teirra eftirgav báðum tað, teir skyldaðu, og Jesus spurdi Símun, hvør av hesum skuldarum vildi elska harra sín mest. Símun svaraði: *„Eg haldi, tann, sum* [38]
*hann gav meira eftir.“* Luk. 7,43. Vit hava verið stórir syndarar, men Kristus doyði, fyri at vit kundu fáa fyrigeving. Virðið av hansara ofri er nóg stórt til, at hann kann koma fram fyri faðirin við tí, til gagns fyri okkum. Tey, ið hava fingið mest fyrigivið, vilja eisini elska hann mest. Hesi vilja standa nærmast trúnu hansara fyri at prísa honum fyri hansara stóra kærleika og æviga offur. Tá vit fata Guds kærleika til fulnar, skilja vit betur andstygd syndarinnar. Tá síggja vit, hvussu langt Gud strekti seg fyri at frelsa okkum. Og vit skilja nakað av tí ósigandi ofri, Kristus hevur latið fyri okkum. Hetta ger, at hjartað ikki verður hart longur, men fyllist við djúpari iðran.

## [39] 4. Syndajáttan

*„Tann, sum dylur misgerðir sínar,*
*fær ongo eydnu, men tann,*
*sum gongur við tær“ og vendir sær*
*frá teimum, „skal finna miskunn.“*
*Orðt. 28,13.*

Treytirnar fyri at fáa miskunn Guds eru rættvísar, einfaldar og rímiligar. Harrin krevur ikki, at vit skulu gera nakað torført fyri at fáa syndafyrigeving. Okkum nýtist ikki at fara á langar og tungar pílagrímsferðir, fyri at Gud í himli kann taka ímóti okkum. Heldur ikki mega vit líða torførar og pínufullar bótsgerðir fyri at bøta fyri misgerðir okkara. Tann, sum játtar synd sína og vendir sær frá henni, skal fáa miskunn.

[40] Ápostulin sigur: *Játtið tí syndirnar hvør fyri øðrum og biðið hvør fyri øðrum, fyri at tit mega verða grøddir.“* Ják. 5,16. Játtið syndir tykkara fyri Gudi, sum eina kann fyrigeva, og játtið misbrot tykkara fyri hvørjum øðrum. Um so er, at tú hevur gjørt tínum vini ella granna óraett, eigur tú at játta hetta. Og tað er tá hansara skylda at vilja fyrigeva tær. Síðani eigur tú at biðja Gud um fyrigeving, tí tann bróðir, ið tú hevur sárað, hoyrir Gudi til - og við at særa hann syndaði tú ímóti skapara og loysnara tínum. Málið verður lagt fram fyri okkara einasta sanna semingsmann, okkara stóra høvuðsprest, *„sum er freistaður á allan hátt líka við okkum, tó uttan synd,“ og „kann hava várkunn við veikleikum okkara.“* Hebr. 4,15. Hann hevur máttin at taka burtur hvørt vet av órættvísi.

Tey, sum ikki hava eyðmýkt seg fyri Gudi og játtað syndaskuld sína, hava enn ikki lokið fyrstu treytina fyri, at Gud kann taka ímóti teimum. Vit hava aldri av sonnum strembað eftir syndafyrigeving, um vit ikki hava vent um av heilum huga og játtað okkara syndir í sannari eyðmýkt, við sundurbrotnum anda, so vit fingu andstygd fyri órættvísi. Og um vit aldri hava roynt tað, so hava vit heldur ikki ognað okkum Guds frið. Um vit ikki hava fingið syndafyrigeving

fyri gjørdar gerðir, kann hetta bert vera, tí at vit ikki hava vilja ella hug til at eyðmýkja okkara hjarta og raetta okkum eftir treytunum í Guds orði. Bíblian er greið í hesum máli. Annaðhvørt syndajáttanin er gjørd í einrúmi ella fyri øðrum, so eigur hon at vera falsleys og av heilum huga. Eingin eigur at verða noyddur til tess. Játtanin má ikki gerast linliga ella í líkasælu. Ei heldur má hon noyðast burtur úr [41]
teimum, sum ikki hava greiða fatan av, hvussu andstyggilig syndin er. Tann syndajáttan, sum kemur innast úr hjartanum, finnur leiðina til hin æviga miskunnsama Gud. Sálmaskaldið sigur: *„Nær er Harrin teimum staddur, ið hava sundurbrotið hjarta.“* Sálm. 34,19.

Sonn játtan er altíð serstøk og viðgongur ítøkiligar syndir. Summar eiga bert at verða játtaðar fyri Gudi. Aðrar eiga at verða játtaðar fyri menniskjum, ið ein hevur gjørt órætt ella skaðað. Ella tær kunnu vera av almennum slagi. Hesar eiga so at verða játtaðar alment. Øll játtan má vera beinrakin og halda seg til evnið, so ein játtar júst tær syndir, sum ein hevur gjørt seg sekan í.

Á døgum Sámuels viku ísraelsmenn burtur frá Gudi. Teir máttu líða fyri syndir sínar, tí teir høvdu mist trúnna á Gud. Teir skiltu ikki longur mátt hansara og vísdóm til at leiða fólkið. Teir høvdu mist álitið á hansara evnir til at verja og hevda sína sak. Teir vendu sær burtur frá alheims drotti og ynsktu sær eina líknandi stjórn, sum tjóðirnar runt teir høvdu. Eftir hetta funnu teir ikki frið, fyrr enn teir góvu hesa týðiligu játtan, at *„vit hava lagt aftur at øllum syndum okkara hesa misgerð at biðja um kong“* 1. Sám. 12,19. Teir máttu játta just ta synd, ið teir høvdu gjørt seg sekan í. Teirra ótakksemi nívdi teir og skilti teir frá Gudi.

Syndajáttan kann ikki góðtakast av Gudi uttan sanna iðran og umvending. Avgerandi broytingar mugu koma í lívin- um. Alt, [42]
sum er ímóti vilja Guds, má leggjast av. Tað svitast ikki, at slík broyting leiðir til sanna sorg yvir syndina. Tað, sum vit eiga at gera, er lagt týðiliga fram fyri okkum: *„Tváið tykkum, reinsið tykkum og fáið illgerðir tykkara burtur frá ásjón míni;... Lærið at gera tað góða, leggið dent á tað, sum rætt er, hjálpið neyðstøddum, fremjið rættin hjá faðirloysingum og verjið mál einkjunnar.“* Jes. 1,16-17. Tá ið tann gudleysi *„letur tað veðsetta frá sær aftur, endurgeldur tað, sum hann hevur rænt, og fer eftir lívsins lógum, so at hann ikki meira fremur órætt, hann skal lívi halda og ikki doyggja.“* Ez. 33,15. Paulus sigur soleiðis um umvending: *„Tí at, sí, hetta sama, at tit*

*fingu sorg eftir Guðs sinnalagi, hvussu stóran áhuga virkaði tað ikki hjá tykkum, ja vørn, ja gremjan, ja ótta, ja longsil, ja íðinskap, ja revsing! Á ein og hvønn hátt hava tit nú sýnt, at tit vóru sakleysir í hesi søk.“* 2. Kor. 7,11.

Syndin ger lógbrótaran dólskan, so hann ikki sær skeivleikarnar í sínum lyndishátti. Hann skilur ikki, hvussu stóra synd hann hevur gjørt. Um hann ikki gevur eftir fyri kraft og sannføring Heilaga Andans, vil hann framhaldandi vera meira ella minni blindur fyri synd síni. Syndajáttan verður ikki av hjarta og í álvara. Hvørja ferð hann viðgongur at hava gjørt nakað skeivt, leggur hann eina umbering aftrat fyri at pynta um sín atburð. Hann sigur, at hevði tað ikki verið fyri ávísar umstøður, so hevði hann ikki havt gjørt hetta ella hatta, sum hann nú verður átalaður fyri.

Tá Adam og Eva høvdu etið av forbodnu fruktini, skammaðust
[43] tey og vóru bangin. Fyrsta hugsan teirra var, hvussu tey kundu umbera sína synd og sleppa undan tí ræðuliga deyðadóminum. Tá ið Gud spurdi tey viðvíkjandi synd teirra, royndi Adam lutvíst at geva Gudi skyldina og lutvíst konu síni. Hann svaraði: *„Konan, ið tú setti mær við lið, gav mær av trænum, og eg át.“ Kvinnan gav orminum skyldina og segði: „Tað var ormurin, ið tøldi meg, so at eg át!“* 1 .Mós. 3,12-13. Hví skapaði tú slanguna? Hví loyvdi tú henni at koma inn í Eden? Hesir spurningar liggja í svari hennara sum ein umbering fyri syndina. Soleiðis gav hon Gudi ábyrgdina fyri sínum falli. Hetta lyndi at rættvísgera seg sjálvan hevur sín uppruna hjá faðir lygnanna, og tað hevur síðani víst seg hjá øllum Adams synum og døtrum. Hetta slag av syndajáttan er ikki av Anda Guds og verður ikki góðtikið av Gudi. Sonn iðran vil fáa eitt menniskja til sjálvt at bera sína skuld og at játta hana uttan undanførslu og kávalæti. Eins og hin neyðars tollarin, sum enn ikki vildi hevja eygu síni upp móti himli, vil tað rópa: *„Guð náði meg syndara.“* Luk. 18,13. Og tey, sum játta synd sína, verða rættvísgjørd, tí Jesus vil bera fram sítt blóð sum bót fyri hvørt iðrandi menniskja.

Dømini í Guds orði um sanna iðran og eyðmýkt vísa ein fúsleika til játtan, sum ikki gevur rúm fyri umbering fyri syndina ella royndum at rættvísgera seg sjálvan. Paulus royndi ikki at umbera seg. Hann lýsir sína synd við daprastu litum, og uttan at gera nakra roynd at gera skuld sína minni enn hon var. Hann sigur: *„Eg koyrdi mong av hinum heilagu í fangahús, tá ið eg hevði fingið fullmakt frá*

*høvuðsprestunum at gera tað; og tá ið tey vórðu tikin av lívi, gav eg* [44]
*mína atkvøðu til tess; og víða um í øllum samkomuhúsum revsaði eg tey tíðum og noyddi tey at spotta; og eg var so út av lagi óður móti teimum, at eg elti tey líka til bygdirnar uttanlands." Áp. 26,10-11. Víðari sigur hann: „Kristus Jesus kom í heimin at frelsa syndarar, og teirra millum eri eg fremstur."* 1.Tim. 1,15.

Tað eyðmjúka, sundurbrotna hjartað, sum av sonnum angrar, vil síggja nakað av Guds kærleika og Jesu líðingum á krossinum. Tann, sum av sonnum angrar, vil bera allar sínar syndir fram fyri Gud á sama hátt sum sonur, ið játtar syndir fyri faðir sínum, sum elskar hann. Og skrivað stendur: *„Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi." 1. Jóh. 1,9.*

[45]

## 5. Halgan

*Gud hevur lovað, at „spyrja tit eftir mær, skulu tit finna meg; og leita tit eftir mær av heilum huga, skal eg lata tykkum finna meg.“ Jer. 29,13.*

Um Guds mynd skal endurnýggjast í okkum, mugu vit geva okkum yvir til hansara av heilum huga. Vit eru av náttúru fremmand fyri Gudi. Heilagi Andin lýsir okkara støðu soleiðis: *„Deyðir í misgerðum og syndum tykkara.“ „Høvdið er alt tey beru sár, og hjartað alt er sjúkt,... einki heilt“*. Vit sita føst í *„snerru djevulsins, fangaðir av honum til at gera hansara vilja“* Ef. 2,1; Jes. 1,5-6; 2. Tim. 2,26. Gud ynskir at grøða okkum og gera okkum fræls. Men av tí at hetta krevur eina fullkomna broyting og endurnýggjan av allari okkara náttúru, mega vit fult og heilt geva okkum yvir til
[46] hansara. Stríðið um okkara jarðiska sinni er harðasti bardagin, sum nakrantíð hevur verið stríddur. At geva seg sjálvan og alt undir Guds vilja krevur stríð. Men sinnið má geva seg undir Gud, áðrenn tað kann endurnýggjast í heilagleika.

Satan roynir at fáa Guds stjórnarlag at síggja út, sum um vit bara skulu vera undirbrotlig og undir støðugum eftirliti. Men soleiðis er ikki. Stjórnarlag Guds talar til vitið og samvitskuna. Hann vil tala við okkum um tað, sum er rætt. Jes. 1,18. Gud tvingar ongan til at vera undirbrotligan. Hann kann ikki taka ímóti eini tilbiðjan, sum ikki er givin av egnum vilja og fullum huga. Um ein var tvungin til at vera undirbrotligur, hevði tað forðað allari veruligari menning av sinninum og lyndinum. Tað hevði bert gjørt okkum til maskinur, og hetta er ikki skaparans ætlan. Hann vil, at menniskjað, sum er krúnan á skapanarverkinum, skal náa ta hægst møguligu menning. Hann vísir okkum tær óavmarkaðu signingar, sum hann í síni náði vil leiða okkum fram til. Hann bjóðar okkum at geva okkum yvir til hansara, so hann kann virka sín vilja í okkum. Tað er upp til okkum

sjálv at velja, um vit vilja verða loyst úr syndarinnar trældómi og fáa lut í tí heilaga frælsinum, sum Guds børn hava.

Tá ið vit geva okkum yvir til Gud, mugu vit sleppa øllum tí, sum skilir okkum frá honum. Tí sigur Frelsarin: *„Somuleiðis kann heldur eingin tykkara, sum ikki avsigur alt tað, ið hann eigur, vera lærusveinur mín."* Luk. 14,33. Alt tað, sum dregur hjartað burtur frá Gudi, má takast burtur. Mong dýrka mammon. Kærleiki til pening og hugur til ríkidømi er gylta leinkjan, sum bindur tey til Satan. [47]
Onnur tráa eftir rósi og verðsligari æru. Aftur onnur dýrka eitt lív í sjálvgóðsku, leti og ábyrgdarloysi. Men slík trælabond mugu fáast burtur. Vit kunnu ikki hoyra bæði Gudi og heiminum til samstundis. Vit eru ikki Guds børn, uttan at hann eigur okkum heilt og fult.

Summi siga seg tæna Gudi, men líta bert á egnar royndir fyri at lýða lóg hansara, menna eitt gott lyndi og soleiðis verða frelst. Hjørtu teirra hava onga djúpa fatan av Kristi kærleika. Tey royna at liva eitt kristiligt lív, tí tey halda, at Gud krevur hetta av teimum, fyri at tey kunnu vinna himmalin. Slíkur kristindómur er virðisleysur. Tá ið Kristus býr í hjartanum, er sálin so fylt av kærleika hansara og av gleði yvir samveruna við hann, at eitt slíkt menniskja gloymir seg sjálvan. Kærleikin til Kristus verður keldan og drívmegin til alt, sum tað ger. Tey, sum merkja, at kærleiki Guds tvingar tey, spyrja ikki um, hvussu lítið tey kunnu gera fyri at lýða boð Guds. Tey spyrja ikki eftir lágmarkinum, men stevna heldur eftir fullkomnum samljóði við vilja endurloysarans. Tey hava ein inniligan longsul eftir at geva honum alt. Tey vísa ein áhuga fyri Guds verki, sum stendur í mun til virðið av tí máli, ið tey royna at náa. At játta Kristus uttan at eiga henda djúpa kærleika er bert prát, innantómt tos og ein tungur trældómur.

Heldur tú, at tað er ov stórt offur at geva alt yvir til Kristus? Set tær sjálvum henda spurning: Hvat hevur Kristus gjørt fyri meg? Sonur Guds gav alt - kærleika, líðing, ja, sítt lív fyri okkara endur- [48]
loysing. Kann tað hugsast at vit, sum eru so óverdug til henda stóra kærleika, nokta Jesusi at koma inn í okkara hjarta? Hvørja løtu í lívi okkara hava vit fingið hansara náðiríku signingar. Tí kunnu vit ikki til fulnar fata, hvat tað er fyri eitt dýpi av fákunnu og neyð, vit eru frelst frá. Kunnu vit líta at honum, sum okkara syndir hava gjøgnumstungið, og kortini lítisvirða allan hansara kærleika og offur? Tá ið vit hugsa um, hvussu óendaliga lágt Dýrdardrotturin boygdi seg

niður, skulu vit so knarra, tí vit ikki kunnu ganga inn til lívið uttan stríð og uttan at nokta okkum sjálvum nakað?

Í mongum stoltum sinni Ijóðar hesin spurningur: Hví skal eg angra og eyðmýkja meg, áðrenn eg kann fáa vissu fýri, at Gud tekur ímóti mær? Eg vísi tær á Kristus. Hann var syndafríur, ja enn meira: hann var høvdingi í himlinum. Men hann varð gjørdur til synd fyri menniskjans skuld. Hann *„varð taldur millum misgerðarmanna - hann, sum bar syndina hjá mongum og bað fyri misgerðamonnum.“* Jes. 53,12.

Men hvat geva vit frá okkum, tá ið vit geva alt? Eitt syndadálkað hjarta, sum Jesus má reinsa við sínum egna blóði og frelsa í sínum óendaliga kærleika. Og tó halda menniskju, at tað er hart at lata alt frá sær. Eg skammist við at hoyra slík orð og við at skriva tey.

Gud krevur ikki, at vit skulu sleppa nøkrum, sum er gagnligt fyri
[49] okkum. Í øllum, sum hann ger, hevur hann vælferðina hjá børnum sínum fyri eyga. Gævi at øll, sum ikki hava valt Kristus sum sín frelsara, kundu fata, at hann bjóðar teimum nakað, sum er óendaliga nógv betri enn tað, ið tey sjálv leita eftir. Tá eitt menniskja hugsar og ger ímóti Guds vilja, er hetta til stóran skaða fyri tað. Eitt slíkt menniskja fremur stóran órætt ímóti síni egnu sál. Eingin sonn gleði er at finna á tí vegi, sum er noktaður av honum, sum veit hvat er best, og sum ger alt, sum er best fyri sínar skapningar. Vegur syndarinnar er leiðin til vesaldóm og oyðilegging.

Tað er eitt mistak at halda, at Gud vil, at hansara børn skulu líða. Allur himmalin ynskir, at menniskjuni skulu vera eydnusom. Okkara himmalski faðir letur ikki hurð gleðinnar aftur fyri nøkrum av sínum skapningum. Boðið av himli er, at vit skulu skýggja tað slagi av njótan, sum elvir til líðingar og vónbrot, og sum letur dyrnar til eydnuna og himmalin aftur fyri okkum. Heimsins Frelsari tekur ímóti menniskjum júst so, sum tey eru, við øllum tí, sum trýtur - við ófullkomileikum og veikleikum. Hann vil ikki bert reinsa tey frá synd og geva teimum endurloysing við blóði sínum. Hann vil eisini geva teimum tað, sum tey innast inni tráa eftir, um tey samtykkja at taka á seg ok hansara og bera byrðar hansara. Hann gevur øllum hvílu og frið, sum leita til hansara fyri at fáa lívsins breyð. Hann biður bert um, at vit skulu gera tær skyldur, sum leiða okkum fram til tær himmalsku signingar, sum tey ólýdnu aldri kunnu fáa lut í.

Hitt sanna og gleðiríka lívið fyri mannasálina er, at Kristus, vón dýrdarinnar, tekur bústað í hjarta okkara.

Mong spyrja: Hvussu skal eg bera meg at við at boyggja meg [50]
fyri Gudi? Tú ynskir at geva teg yvir til hansara, men tín andaliga styrki er lítil.Tú ert bundin av iva, og vanar frá einum lívi í synd ráða yvir tær. Tíni lyftir og avgerðir kunnu verða sum eitt reip gjørt av sandi. Tú kanst ikki altíð stýra tínum tonkum, lyndi ella kenslum. Tú minnist tey lyftir, tú hevur brotið, og tær avgerðir, sum tú hevur latið vera við at taka. Hetta ger, at tín tiltrúgv á egnan heiðurleika viknar, og tú heldur, at Gud ikki kann taka ímóti tær. Men tær nýtist ikki at falla í fátt. Tað, sum tær tørvar, er at skilja ta sonnu styrkina í viljanum. Viljin er tann stýrandi mátturin í náttúruni hjá menniskjanum - evnini at taka avgerðir og at velja ímillum gott og ilt. Alt velst um at brúka viljan rætt. Gud hevur givið menniskjunum evnir til at velja. Tú kanst ikki broyta hjarta títt. Tú kanst ikki av tær sjálvum elska Gud, men tú kanst velja at tæna honum. Tú kanst lata Gud ávirka tín vilja, so vil hann virka í tær bæði at vilja og at virka eftir góða vilja sínum. Soleiðis kann alt sinnalag títt verða ávirkað av Kristi Anda. Tín longsul verður vendur til hansara, og tínir tankar verða í samljóði við hansara tankar.

Tráan tín eftir góðsku og heilagleika er góð, men steðgar tú her, so gagnar hon tær einki. Mong munnu glatast, meðan tey vóna og ynskja at gerast kristin. Tey koma ikki so langt, at tey loyva Gudi at ráða yvir teirra vilja. Tey velja ikki at gerast ein sannur kristin beinanveg.

Men fær viljin ta røttu kósina, kann ein fullkomin vend koma
í lív títt. Tá ið tú gevur vilja tín til Kristus, sameinir tú teg við ein [51]
mátt, sum er sterkari enn allur annar máttur.Tú fært styrki omanífrá, ið kann varðveita teg. Við støðugt at geva teg yvir til Gud, verður tú førur fyri at liva eitt nýtt lív, eitt trúarinnar lív.

[52] # 6. Trúgv og frelsa

[53]

So við og við sum Heilagi Andin vekir tína samvitsku, vilt tú í ein ávísan mun síggja, hvussu andstyggilig syndin er. Tú vamlast við hana og hennara óndskap, pínu og mátt. Tú merkir, hvussu syndin hevur skilt teg frá Gudi, og at tú ert í trældómi og í valdi hins illa. Jú meira tú stríðist fyri at gera teg leysan, jú meira sært tú títt hjálparloysi. Tínar ætlanir hava ikki altíð verið reinar, og tað er hjarta títt heldur ikki. Tú sært, at eginkærleiki hevur verið í lívi tínum, og tær leingist eftir fyrigeving, at verða reinsaður og fáa frælsi. Hvussu kann man verða sáttur við Gud og koma at líkjast honum meira?

Tær tørvar frið - at merkja Guds fyrigeving, frið og kærleika. Hesin friður kann ikki keypast fyri pening. Klókskapur ella vísdómur
[54] kunnu ikki fáa hann til vega, ei heldur tínar egnu royndir. Men Gud býður tær hann sum gávu, uttan silvur, uttan samsýning. Jes. 55,1. Friðurin stendur tær í boði, um tú bert rættir út hondina og tekur ímóti honum. Gud sigur: *„Um syndir tykkara eru sum skarlak, kunnu tær verða hvítar sum mjøll; um tær eru reyðar sum purpur, kunnu tær verða hvítar sum ull.“* *„Eg gevi tykkum nýtt hjarta og leggi nýggjan anda tykkum í bróst.“* Jes. 1,18; Ez. 36,26.

Tú hevur játtað syndir tínar og av hjarta lagt tær av. Tú hevur sett tær fyri at geva teg yvir til Gud. Far tá til hansara og bið hann um at tváa burtur syndir tínar og geva tær eitt nýtt hjarta. Trúgv so, at hann ger tað, av tí at hann hevur lovað tað. Hetta er tað, Jesus lærdi, tá ið hann var her á jørðini. Tann gáva, sum Gud hevur lovað, er okkara, tá ið vit trúgva, at vit fáa hana. Jesus grøddi sjúkur fólksins, tá ið tey trúðu á hansara megi. Hann hjálpti teimum við tí, sum tey kundu síggja, og gav teimum soleiðis álit til sín um tað, sum tey ikki kundu síggja. Hetta gjørdi, at tey eisini trúðu á mátt og megi hansara til at fyrigeva syndir. Jesus segði hetta týðiliga, tá ið hann grøddi tann giktsjúka mannin: *„Men fyri at tit skulu vita, at menniskjusonurin hevur vald á jørð til at fyrigeva syndir, tá sigur hann við hin giktsjúka: - Statt upp, tak song tína og far heim*

*til húsa!"* Matt. 9,6. Jóhannes sigur soleiðis um Jesu undurverk: *„Men hetta er skrivað, til tess at tit skulu trúgva, at Jesus er Kristus, sonur Guðs, og til tess, at tit, tá ið tit trúgva, skulu hava lív í navni hansara."* Jóh. 20,31.

Vit læra, hvussu vit skulu trúgva á Jesus og fáa syndafyri-geving, av teimum einføldu frásagnunum um, hvussu hann grøddi tey sjúku. [55]
Eitt dømi er sjúki maðurin við Betesda hylin. Hesin neyðars maður var púra hjálparleysur og hevði ikki kunnað brúkt limir sínar í 38 ár. Men Jesus segði við hann:*„Reis teg upp, tak song tína og gakk."* Jóh. 5,8. Tann sjúki kundi sagt: „Harri, um tú vilt grøða meg, vil eg lýða tíni boð." Men nei, hann trúði tí, sum Jesus segði. Hann trúði, at hann var grøddur, og hann gjørdi beinanvegin eftir boðum Frelsarans. Hann setti sær fyri at ganga, og hann gekk. Hann var Kristi boðum lýðin, og Gud gav honum styrki. Hann var vorðin frískur.

Sum syndari ert tú í eini líknandi støðu. Tú kanst ikki bøta fyri fyrru syndir tínar, tú kanst ikki broyta títt hjarta og gera teg sjálvan heilagan. Men Gud lovar at gera alt hetta fyri teg við Kristi hjálp. Tú trýrt hesum lyfti, tú játtar tínar syndir og gevur teg sjálvan til Gud. Tú vilt tæna honum. Og líka so vist, sum tú gert hetta, so vil Gud gera eftir orði sínum. Um tú trýrt fyrijáttanini - at tú hevur fingið fyrigeving og ert vorðin reinsaður - so ger Gud hetta til veruleika. Tú verður grøddur, eins og Jesus gav hinum giktsjúka manninum megina til at ganga aftur, tá ið hann trúði, at hann varð grøddur. Tað er soleiðis, um tú trýrt tí.

Bíða ikki til tú hevur kensluna av, at tú ert grøddur, men sig: „Eg trúgvi tí, sum er hent, ikki tí at eg havi kensluna av tí, men tí at Gud hevur lovað tað."

Jesus sigur:*„Alt tað, sum tit biðja um og tráa eftir, trúgvið, at tit hava fingið tað, tá skal tað verða tykkum fyri."* Mark. 11,24.
Til hetta lyfti eru knýttar treytir, nevniliga at vit biðja í samsvari [56]
við Guds vilja. Men vilji hansara er at reinsa okkum frá synd, gera okkum til Guds børn og gera okkum før fyri at liva eitt heilagt lív. Tí kunnu vit biðja um hesar signingar og trúgva, at vit fáa tær, og takka Gudi fyri, at vit hava fingið tær. Tað er okkara framíhjárættur at kunna koma til Jesus, verða reinsað og standa fyri lógini uttan skomm ella samvitskubit. *„So er t nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi."* Róm. 8,1.

Eftir hetta eru tit ikki longur tykkara egnu, tit eru dýrt keypt. Tit eru ikki leyskeypt við *„forgongiligum lutum, silvuri ella gulli, ... men við dýrmæta blóði Krists sum einum lýtaleysum og meinaleysum Iambi.“* 1. Pæt. 1, 18-19. Tú ert farin at trúgva á Gud, og gjøgnum hesa einføldu gerð hevur Heilagi Andin endurføtt hjarta títt. Tú ert eitt barn, sum er føtt inn í Guds familju, og hann elskar teg, sum hann elskar son sín.

Tá ið tú nú hevur givið teg í Jesu hendur, vend tær so ikki aftur frá honum, men sig hvønn dag:„Eg hoyri Kristusi til, eg havi givið meg í hansara hendur.“ Bið Gud um at geva tær sín Heilaga Anda og varðveita teg í síni náði. Eins og tú gjørdist Guds barn við at geva teg í hansara hendur og trúgva á hann, soleiðis eigur tú at liva í Kristusi. Ápostulin sigur: *„Líkasum tit tí hava tikið ímóti Kristi Jesusi, Harranum, soleiðis skulu tit liva í honum.“* Kol. 2,6.

Summi tykjast hugsa, at tey eiga at verða roynd og prógva [57] teirra umvending fyri Harranum, áðrenn tey kunnu vænta sær at fáa hansara signing. Men tey kunnu taka ímóti Guds signing longu nú. Tey mega fáa Guds náði og Kristi Anda at hjálpa sær í veikleika teirra, annars kunnu tey ikki standa ímóti tí ónda. Jesus ynskir, at vit skulu koma til hansara, just sum vit eru: syndug, hjálparleys og við stórum tørvi á honum. Vit mega koma við øllum okkara veikleikum, dáragerðum og syndum, og í iðran kasta okkum niður fyri hansara føtur. Tað er heiður hansara at taka okkum í sín kærleiksfulla favn, binda um sár okkara og reinsa okkum frá allari óreinsku.

Fólk í túsundatali fara skeiv á hesum øki. Tey trúgva ikki, at Kristus fyrigevur teimum persónliga. Tey taka ikki Gud upp á orðið. Men øll, sum gera eftir treytunum, hava tann framíhjárætt at vita, at Gud í síni náði hevur fyrigivið hvørja einastu synd. Rek ta hugsan burtur, at Guds fyrijáttanir ikki hoyra tær til. Tær hoyra hvørjum syndara til, sum angrar. Vit fáa styrki og náði gjøgnum Kristus, og tænandi einglar koma við hesum til hvørja einastu trúgvandi sál. Eingin er so syndugur, at hann ikki kann fáa styrki, reinleika og rættvísi í Jesusi, sum doyði fyri hann. Kristusi leingist eftir at taka burtur tey syndadálkaðu pløggini og lata menniskju í sín hvíta rættvísis klædning. Hann bjóðar teimum til at liva og ikki til at doyggja.

Gud fer ikki við okkum, sum deyðilig menniskju fara við hvørjum øðrum. Hansara tankar eru fullir av miskunnsemi, kærleika

og inniligari samkenslu. Hann sigur: *„Hin gudleysi vendi um frá vegi sínum, og órættarmaður frá svikaráðum sínum og vendi sær* [58] *til Harrans, tá skal hann miskunna honum, til Guðs várs, tí at hann fyrigevur ríkiliga.“ „Sum royk eg striki út tíni misbrot og sum skýggj tínar syndir.“* Jes. 55,7; 44,22.

*„Tí at eg havi onga gleði av deyða syndarans, sigur Harrin.“* Ez. 18,32. Satan stendur og bíðar eftir at taka okkara dýrabaru fullvissu frá okkum. Hann ynskir at taka hvønn vónarneista og hvørja Ijósglæmu frá tær, men tað mást tú ikki loyva honum at gera. Lurta ikki eftir freistaranum, men sig: Jesus doyði, fyri at eg skal liva. Hann elskar meg og vil ikki, at eg skal glatast. Eg havi ein miskunnsaman faðir í himli, og hóast eg havi vrakað kærleika hansara og oyðslað burtur tær signingar, hann hevur givið mær, vil eg reisa meg og fara til faðir mín og siga við hann“ *„Faðir, eg havi syndað ímóti himlinum og ímóti tær; ikki eri eg longur verdur at eita sonur tín; lat meg sleppa at vera sum ein av bønarmonnum tínum.“* Líknilsið um burturvilsta sonin sigur frá, hvussu tikið verður ímóti honum:*„Men meðan hann enn var langt burtur, sá faðir hansara hann og tókti stórliga synd í honum; og hann kom rennandi og hálsfevndi hann og kysti hann.“* Luk. 15,18-20.

Men sjálvt hetta líknilsi, so hugtakandi tað enn er, kann ikki til fulnar siga frá tí óendaliga miskunnsemi, sum okkara himmalski faðir hevur. Harrin sigur við profetinum: *„Við ævigum kærleika havi eg elskað teg, tí vart tú leiddur av miskunn míni.“* Jer. 31,3. Meðan syndarin enn er langt burtur frá faðirhúsinum og oyðir burtur ognir sínar í fremmand- um landi, leingist faðirinum í hjarta sínum eftir [59] honum. Hvør longsul, sum vekist í sinninum um at venda aftur til Gud, er Andans blíða kallan, ið roynir at yvirtala, áminna og draga tann burturvilsta heim aftur til faðirins kærleiksfulla hjarta.

Við Bíbliunnar ríku lyftum fyri eyga - kanst tú so ivast? Kanst tú trúgva, at tá hinum arma syndaranum leingist eftir at venda heim aftur og leggja syndir sínar av, so vil Harrin vera strangur og forða honum at koma til sín? Burtur við einari slíkari hugsan! Einki kann skaða teg meira enn at hugsa soleiðis um tín himmalska faðir. Hann hatar synd, men elskar syndaran. Og í Kristusi gav hann seg sjálvan fyri at øll, sum vilja, kunnu verða frelst og fáa æviga sælu í Guds dýrdarríki. Kundi hann havt nýtt eymari og kraftmiklari orð fyri at siga frá kærleika sínum til okkara, enn tey, sum hann valdi? Hann

sigur:*„Man kona gloyma bróstabarn sítt, ein móðir tað barn, sum hon bar undir hjarta? Hesar mega gloyma, men eg gloymi ikki teg.“* Jes. 49,15.

Lít upp, tú, sum ivast og skelvir, tí Jesus livir og stígur fram fyri faðirin í okkara stað. Takka Gudi fyri, at hann gav sín kæra son. Bið um, at hann ikki má vera deyður til einkis fyri teg. Andin kallar á teg í dag. Kom við heilum huga til Jesus, so fært tú vissuliga hansara signingar.

Tá ið tú lesur hansara fyrijáttanir, so minst til at tær siga frá ósigandi kærleika og miskunn. Æviga, kærleiksfulla hjartað er vent ímóti syndarum við markleysari samkenslu:

[60] *„Vit hava endurloysingina ... við blóði hansara, fyrigeving syndanna, samsvarandi náðiríkidømi hansara.“* Ef. 1,7. Ja, lít bert á, at Gud er hjálpari tín. Hann ynskir at endurnýggja mynd sína í menniskjanum. Tá ið tú kemur til hansara við syndajáttan og iðran, vil hann koma nær til tín við miskunnsemi og fyrigeving.

## 7. Eyðkenni fyri Jesu lærusveinar [61]

*„Tí, um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur;*
*hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!“*
*2. Kor. 5,17.*

Øll kunnu kanska ikki siga við vissu, nær og hvar tey komu til trúgv, ella vísa á umstøðurnar í sambandi við umvendingina. Hetta vísir tó ikki, at tey eru óumvend. Kristus segði við Nikodemus: *„Vindurin blæsur, hvar sum hann vil, og tú hoyrir dunið av honum; men tú veitst ikki, hvaðan hann kemur, og hvar hann fer; soleiðis er tað við einum og hvørjum, sum er føddur av andanum.“* Jóh. 3,8. Vindurin er ósjónligur, men ávirkanin sæst og merkist tó týðiliga. Soleiðis er eisini við ávirkanini av Guds Anda í menniskjanum. Henda endurføðandi megi, sum einki mannaeyga kann síggja, gevur sálini nýtt lív og skapar eitt nýtt menniskja í Guds mynd.

Verk Andans henda stillisliga og uttan, at ein varnast tað, men [62] ávirkanin sæst týðiliga. Um hjartað er vorðið endurnýggjað við Guds Anda, so kemur tað til sjóndar í lívinum. Vit kunnu ikki sjálvi broyta hjartað ella koma í samljóð við Gud. Og meðan vit als ikki mega líta á okkum sjálv og á okkara góðu gerðir, vil lív okkara vísa, um Guds náði býr í okkum ella ikki. Ein umbroyting sæst í okkara lyndiseyðkennum, vanum og áhugamálum. Munurin ímillum tað, sum vit vóru, og tað, vit eru, verður týðiligur. Lyndið í einum menniskja sæst av, hvussu viðkomandi dagliga talar og ber seg at, og ikki bert av tilvildarligum góðum ella ringum gerðum.

Satt er tað, at okkara framferð kann tykjast lýtaleys, uttan at vit eiga Kristi endurnýggjandi kraft. Hugurin til at vinna sær ávirkan og virðing frá øðrum kann gera, at fólk royna at liva eitt gott og heiðurligt lív. Sjálvsvirðing kann leiða okkum til útvortis at halda okkum frá tí illa. Eitt sjálvsøkið hjarta kann fremja heiðurligar gerðir. Men hvussu kunnu vit tá vita, á hvørjari síðu vit standa?

Hvør ræður í okkara hjarta? Hvat liggur fremst í okkara huga? Hvønn vilja vit helst tosa um? Hvørjum geva vit okk-ara inniligastu

kenslur og bestu orku? Um vit hoyra Kristusi til, hugsa vit um hann, og okkara yndistankar vilja snúgva seg um hann. Alt tað, vit eru og hava, er halgað honum. Okkum leingist eftir at verða honum lík, verða leidd av hansara Anda, gera vilja hansara og gera honum til vildar í øllum.

[63] Tey, sum gerast nýggir skapningar í Kristi Jesusi, vilja bera fruktir Andans, sum eru: *„Kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildi, góðvild, trúskapur, spakføri, fráhald.“* Gal. 5,22. Tey hava ikki hug til gomlu áhugamálini longur, men við trúnni á Guds son vilja tey ganga í hansara fótasporum, endurspegla hansara lyndi og reinsa seg sjálvan, líkasum hann er reinur. Tað, ið tey fyrr hataðu, elska tey nú. Og tað, ið tey fyrr elskaðu, hata tey. Hini stoltu og stívrendu gerast spakfør og eyðmjúk av hjarta. Tey hástóru og hugmóðigu gerast álvarsom og lítillátin. Drykkjumaðurin leggur av at drekka brennivín, og tann ósiðiligi vil liva eitt siðiligt lív. Heimsins móti og hugmóðigu siðir verða avlagdir. Kristus leitar ikki eftir útvortis prýði, men eftir *„óforgongiliga prýði hins spakføra og stilla anda, sum er dýrmett í Guðs eygum.“* 1. Pæt. 3,4.

Einki prógv er fyri, at menniskju hava umvent seg, um hetta ikki virkar til eina vend til tað betra. Um syndarin heldur sítt lyfti og ber aftur tað, ið hann á óreiðiligan hátt hevur drigið inn undir seg, játtar syndir sínar og elskar Gud og síni medmenniskju, tá kann hann vera vísur í, at hann er gingin yvirum frá deyðanum til lívið.

Tá ið vit sum vilstir syndugir skapningar koma til Kristus og við hansara náði fáa lut í syndafyrigevingini, spírar kærleikin fram í hjartanum. Eingin byrða verður tung, tí tað ok, sum Kristus áleggur okkum, er lætt. Vit gera okkara skyldur av góðum huga og hjálpa við
[64] gleði øðrum menniskjum. Tann gøtan, sum fyrr var fjald í myrkri, verður upplýst av Ijómanum frá rættvísis sólini.

Kristi elskuliga lyndi vil koma til sjóndar hjá teimum, ið fylgja honum eftir.Tað var hansara gleði at gera vilja Guds. Kærleikin til Gud og brennandi áhugi fyri at geva honum æru var berandi kraftin í lívi Frelsarans. Kærleikin myndaði og prýddi alt, sum hann gjørdi. Kærleikin er av Gudi. Tað óumvenda hjartað kann ikki skapa ella framleiða hann. Kaerleikin er í tí hjarta, har sum Jesus býr. *„Vit elska, tí at hann elskaði okkum fyrst.“* 1. Jóh. 4,19. í tí hjarta, sum er endurnýggjað av Guds náði, er kærleikin drívmegin til alt. Hann myndar lyndið, stjórnar hugsanum, ræður yvir ovurhuga, vinnur

á fíggindskapi og styrkir tær góðu kenslurnar. Tá hesin kærleiki mennist í sálini, ger hann lívið Ijósari og hevur eina reinsandi ávirkan allastaðni rundan um okkum.

Tað eru tvinnandar villur, sum Guds børn mega vera á varðhaldi fyri - serliga tey, sum nýliga eru byrjað at líta á hansara náði. Fyrstu villuna hava vit longu umrøtt.Tað er at líta á sínar egnu gerðir fyri at koma í samljóð við Gud. Tann, sum roynir at gerast heilagur við egnum gerðum, við at halda lógina, roynir tað ómøguliga. Alt, sum menniskjað kann gera uttan Kristus, er ávirkað av eginkærleika og synd. Tað er eina Kristi náði, sum við trúnni kann halga okkum.

Hin villan er ikki minni vandafull, og er júst tað øvugta av tí fyrru. Hon er at trúgva, at Kristus sleppur okkum undan at lýða og [65]
halda Guds lóg, av tí at tað eina er við trúnni, at vit fáa lut í Kristi náði.

Men legg í hesum sambandi til merkis, at lýdni ikki bert er útvortis samsvar við Guds krøv, men ein kærleikans tænasta. Guds lóg lýsir hansara egnu náttúru, sum inniheldur ta stóru meginreglu kærleikans, og tí er hon Guds stjórnar grundvøllur bæði í himli og á jørð. Um okkara hjørtu eru endurnýggjað eftir Guds mynd, um Guds kærleiki er gróðursettur í sálina, vil so ikki Guds lóg eisini koma til sjóndar í lívinum?

Tá kærleikans meginregla hevur fest røtur í hjartanum, og menniskjað er endurnýggjað eftir Guds mynd, sum skapaði tað, tá fer fyrijáttanin í nýggja sáttmálanum at ganga út: *„Lógir mínar skal eg geva í hjørtu teirra, og í huga teirra skal eg skriva tær.“* Hebr. 10,16. Og er lógin skrivað í hjartað, vil hon so ikki seta dám á lívið? Lýdni - trúskapur og kærleik-ans tænasta - er tað rætta eyðkennið á einum lærusveini. Tí sigur Skriftin: *„Tí at hetta er kærleikin til Guðs, at vit halda boð hansara; og boð hansara eru ikki tung;“ og „tann, sum sigur: „Eg kenni hann,“ og ikki heldur boð hansara, hann er ein lygnari, og í honum er sannleikin ikki.“* 1. Jóh. 5,3; 2,4. Í staðin fyri at trúgvin sleppur menniskjunum undan lýdni, so er trúgvin tað einasta, sum gevur okkum lut í Guds náði, so at vit verða før fyri at verða lýðin.

Vit vinna ikki frelsuna við okkara lýdni, tí frelsan er Guds gáva, sum má takast ímóti í trúgv. Men lýdni er ávøkstur trúarinnar: *„Og* [66]
*tit vita, at hann varð opinberaður, fyri at taka burtur syndirnar; og í honum er ikki synd. Hvør tann, sum verður verandi í honum, syndar*

*ikki; hvør tann, sum syndar, hevur ikki sæð hann og kennir hann ikki heldur.“* 1. Jóh. 3,5-6. Hetta er tað sanna eyðkennið. Um vit verða verandi í Kristusi, og Guds kærleiki býr í okkum, vilja okkara kenslur, tankar og gerðir vera í samljóð við Guds vilja, soleiðis sum hann kemur fram í hansara heilagu lóg. *„Børn míni, latið ongan villa tykkum! Tann, sum fremur rættvísi, er rættvísur, eins og hann er rættvísur!“* 1. Jóh. 3,7. Guds heilaga lóg, soleiðis sum hon Ijóðar í teimum tíggju boðunum frá Sinai, vísir hvat raettvísi er.

Tann sonevnda trúgv á Kristus, sum sigst at kunna sleppa menniskjum undan lýdni móti Gudi, er ikki trúgv, men manglandi virðing fyri Gudi. *„Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv.“ “ Líkaleiðis eisini trúgvin; um hon ikki hevur gerningar, er hon deyð í sjálvari sær.“* Ef. 2,8; Ják. 2,17. Jesus segði um seg sjálvan, áðrenn hann kom á jørðina: *„At gera vilja tín, mín Guð, til tess er hugur mín, tín lóg er mær inst í hjarta.“ Sálm. 40,9. Og júst áðrenn hann fór til himmals segði hann: „Eg havi hildið boð faðirs míns og verði verandi í kærleika hansara.“* Jóh. 15,10. Skriftin sigur: *„Og av hesum vita vit, at vit kenna hann, um vit halda boð hansara. ... Tann, sum sigur, at hann verður í honum, hann eigur eisini sjálvur at liva, soleiðis sum hann livdi.“ „Kristus leið eisini fyri tykkum og eftirlæt tykkum eina fyrimynd, fyri at tit skulu fylgja fótasporum hansara.“* 1. Jóh. 2,3-6; 1. Pæt. 2,21.

[67] Treytin fyri at fáa eitt ævigt lív er júst tann sama, sum hon altíð hevur verið - og tann sama sum í Paradísinum, áðrenn okkara fyrstu foreldur fullu í synd: fullkomið lýdni móti Guds lóg, fullkomið rættvísi. Um ævigt lív varð givið við minni treytum enn hesum, so vildi øll alheimsins eydna verið sett í váða.Tað hevði gjørt tað møguligt fyri syndina at hildið áfram um allar ævir við allari síni neyð og vesaldómi.

Undan syndafallinum var tað møguligt hjá Adami at hava eitt rættvíst lyndi og vera lýðin ímóti Guds lóg. Men tá ið hann syndaði, miseydnaðist hetta hjá honum. Og orsakað av, at hann syndaði, er okkara náttúra spilt, so at vit ikki kunnu rættvísgera okkum sjálv. Av tí at vit eru syndafull, og ikki heilag, kunnu vit ikki til fulnar vera eini heilagari lóg lýðin. Av okkum sjálvum eru vit ikki rættvís og kunnu ikki fullføra Guds lógarkrøv. Men Kristus hevur gjørt okkum ein útveg. Hann livdi á jørðini undir somu korum, royndum og freistingum, sum møta okkum. Hann livdi eitt syndafrítt lív. Hann

doyði fyri okkum, og nú bjóðar hann okkum at átaka sær okkara syndir og geva okkum rættvísi. Um tú gevur teg í hansara hendur og tekur ímóti honum sum tínum Frelsara, vilt tú fyri hansara skuld verða roknaður sum rættvísur, hvussu syndafult lív títt enn kann hava verið. Kristi lyndi verður sett ístaðin fyri títt egna lyndi, og Gud tekur ímóti tær, sum um tú aldrin hevði syndað.

Ja, meira enn tað: Kristus broytir hjartað, við tað at hann við
trúnni býr í hjarta tínum. Tú mást støðugt hava samband við hann [68]
og geva tín vilja í hansara hendur. Og so leingi sum tú gert hetta, vil hann virka í tær bæði at vilja og at virka eftir góða vilja sínum. *Tá kanst tú siga: „Tað, sum eg nú livi í holdinum, tað livi eg í trúnni á Guðs son, sum elskaði meg og gav seg sjálvan upp fyri meg.“ Gal. 2,20. Jesus segði lærusveinunum: „Tí at ikki eru tað tit, ið tala, men andi faðirs tykkara, ið talar í tykkum.“* Matt. 10,20. Tá ið Kristus soleiðis virkar í tær, vilt tú vísa tann sama anda og gera somu gerðir - í rættvísi og í lýdni.

Vit hava tí einki í okkum sjálvum til at rósa okkum av, og tí er eingin grund til sjálvshevjan. Einasta grundarlagið fyri vón okkara er Kristi rættvísi, sum verður tilroknað okkum og tað verk, sum Andi hansara virkar í og ígjøgnum okkum.

Tá ið talað verður um trúgv, mugu vit minnast, at meira enn eitt slag av trúgv er til. Eitt slag av sannføring finst, sum er heilt ymisk frá kristnari trúgv. Guds tilvera, máttur og sannleiksorð eru royndir lutir, sum sjálvur Satan og hansara herur ikki kunnu nokta fyri innast inni. Bíblian sigur: *„Hinir illu andarnir trúgva tað við og skelva.“* Ják. 2.19 Men hetta er ikki kristin trúgv. Tann, sum ikki bara ásannar orð Guds, men eisini gevur seg undir hansara vilja, gevur soleiðis Gudi sítt hjarta og sín kærleika. Eitt slíkt menniskja hevur trúgv - eina trúgv, sum er virkin í kærleika og reinsar sálina. Við hesari trúgv endurnýggjast hjartað eftir Guds mynd. Og tað hjarta, sum í óumvendu støðuni ikki var Guds lóg lýðin, og heldur ikki kundi vera tað, gleðir seg um hansara heilagu boð og vil við
sálmaskaldinum kunna siga: *„Eg lóg tína elski, allan dagin hon er* [69]
*mær í huga.“* Sálm. 119,97. Rættvísi lógarinnar verður fullgjørt í okkum, *„sum ikki ganga eftir holdi, men eftir anda.“* Róm. 8,4.

Summi fólk hava lyndi til at ivast um, hvørt hjørtu teirra eru endurnýggjað við Heilaga Andanum, hóast tey hava upplivað Kristi fyrigevandi kærleika og av sonnum ynskja at verða Guds børn. Hesi

síggja sítt ófullkomna lyndi og eitt lív fult av mistøkum. Við hesi vil eg siga: Vendið tykkum ikki burtur í vónloysi. Vit mega ofta boyggja okkum niður við Jesu føtur og gráta um okkara ófullkomileika og brek, men vit mega ikki falla í fátt. Sjálvt um fíggindin stundum vinnur á okkum, so sleppur Gud okkum ikki. Nei, Kristus er við Guds høgru hond og biður fyri okkum. Johannes, lærusveinurin, sum Jesus elskaði, segði: *„Hetta skrivi eg til tykkara, fyri at tit ikki skulu synda. Og tó at onkur syndar, tá hava vit ein talsmann hjá faðirinum, Jesus Krist hin rættvísa.“* 1. Jóh. 2,1. Gloymið ikki, at Kristus segði: *„Faðirin sjálvur elskar tykkum.“* Jóh. 16,28. Hann tráar eftir at taka teg til sín aftur og at síggja sín reinleika og heilagleika endurspeglast í tær. Um tú bert vil leggja teg í hansara hendur, so vil hann, sum byrjaði gott verk í tær, fullføra tað til dag Jesu Krists. Bið meira inniliga til Gud, hav sterkari trúgv. Tá vit síggja okkara egnu veikleikar, so latið okkum lita á styrki Frelsarans. Tá skulu vit lova og prísa honum, sum lýsir fyri okkum.

Jú nærri tú kemur Jesusi, jú meira ófullkomnan sært tú teg sjál-
[70] van, tí sjón tín verður klárari, og tín ófullkomileiki verður týðiligari í mun til hansara fullkomnu náttúru. Hetta er prógv um, at Satans villleiðingar hava mist sína megi, og at ávirkanin av Guds lívgevandi Anda er í ferð við at vekja teg.

Eingin djúpur kærleiki til Jesus kann búgva í tí hjarta, sum ikki sær sína egnu synd. Tann, sum verður broyttur við Kristi náði, vil síggja upp til hansara guddómliga lyndi. Men um vit ikki síggja okkara egnu skeivleikar, so er tað eitt óreingjandi prógv um, at vit ikki hava sæð Kristi fagurleika og tign.

Jú minni vit síggja, sum vit kunnu virðismeta hjá okkum sjálvum, tess meira vilja vit síggja og hámeta Frelsarans óendaliga reinleika og kærleika. Tá vit síggja okkara egnu syndastøðu, leita vit til hansara, sum hevur mátt til at fyrigeva. Og tá menniskjað fatar sítt egna hjálparloysi og leitar til Kristus, vil hann opinbera seg í allari sínari megi. Jú meira kenslan av okkara neyð dregur okkum til hansara og til Guds orð, tess meira hámeta vit hansara lyndiseyðkenni, og jú meira fullkomið vilja vit enduspeglast í hansara mynd.

## 8. Kristin vøkstur [71]

Tá vit verða Guds børn, kemur ein broyting í hjartað, sum í Bíbliuni verður nevnd føðing. Hon er eisini líknað saman við tað góða sáðið, sum spírar á akrinum. Á líknandi hátt mega tey nýumvendu sum *„nýfødd børn“ „vaksa upp“* og búnast til menn og kvinnur í Kristi Jesusi. 1. Pæt. 2,2; Ef. 4, 15. Tey skulu vaksa og bera ávøkst eins og tað góða sáðið, sum verður sáað á akrinum. Jesaja sigur, at tey skulu kallast *„rættlætis eikir ... av Harranum settar niður honum til heiðurs.“* Jes. 61,3. Soleiðis verða myndir úr náttúruni brúktar til at hjálpa okkum, so vit betri kunnu fata loyndarfullu sannleikarnar um tað andaliga lívið.

Allur vísdómur og dugnaskapur, sum menniskjað hevur, kann ikki kveikja lív í hin minsta smálutin í náttúruni. Einans lív frá Gudi [72]
sjálvum kann gera, at plantur og dýr kunnu liva. Á sama hátt er tað bert Gud, sum kann gróðurseta tað andaliga lívið í mannahjørtuni. Eingin kann fáa lut í lívinum, sum Kristus vil geva honum, *„uttan hann verður føddur av nýggjum.“* Jóh. 3,3.

Gud gevur lív, og hann gevur eisini vøkstur. Gud letur blómuknoppin búnast og verða til blómu, sum síðani verður til frukt. Tað er við hansara mátti, at sáðkornið búnast, *„fyrst nálir, síðani aks og síðani fult korn í aksinum.“* Mark. 4,28. Og profeturin Hósea sigur um Ísrael, at *„eins og liljur skal hann blóma.“* Tey skulu „dyrka korn og blóma sum vínviður.“ Hós. 14,6-8. Jesus sigur: *„Gevið gætur eftir liljunum, hvussu tær vaksa.“* Luk. 12,27. Plantur og blómur vaksa ikki av síni egnu umsorgan, stremban ella stríði, men av at taka ímóti tí, sum Gud veitir teimum. Soleiðis verður teimum lív lagað. Barnið kann ikki gera seg størri, enn tað er, við síni egnu stremban ella styrki. Tú kanst eins lítið skapa andaligan vøkstur við egnari stremban og megi. Plantan og barnið vaksa við at fáa tað úr umhvørvinum, sum er neyðugt fyri at halda lív í teimum - fríska luft, sólarljós og føðslu. Tað, sum náttúrunnar gávur eru fyri djór og urtir, er Kristus fyri tey, sum líta á hann. Hann er teimum *„ævigt ljós,“ „sól og skjøldur“*. Jes. 60,19; Sálm. 84,12. Hann man *„vera Ísrael*

*sum døggin"*. Hann man falla *„sum døgg á grasið."* Hós. 14,6; Sálm. 72,6. Hann er tað livandi vatnið, Guds breyð, *„sum kemur niður av himni og gevur heiminum lív."* Jóh. 6,33.

[73] Gud gav sín egna son, og við hesi framúr góðu gávu hevur hann fylt heimin við síni náði. Hetta er líka veruligt sum tann luftin, ið liggur um klótuna. Øll, sum velja at anda hesa lívgevandi luft, fara at liva og búnast til fullvaksin andalig menniskju í Jesusi Kristi.

Blómurnar venda sær móti sólini, so ljósið frá henni kann geva teimum fullkomnan vakurleika og skap. Soleiðis mega vit eisini venda okkum móti rættvísis sólini, so at ljós Guds kann lýsa á okkum og menna okkara lyndi, so vit líkjast Jesusi.

Jesus lærir okkum hetta, tá ið hann sigur: *„Verðið í mær, so verði eg eisini í tykkum: Eins og greinin ikki kann bera ávøkst av sær sjálvari, uttan hon verður í víntræinum, soleiðis kunnu ikki heldur tit, uttan at tit verða í mær... Tí at uttan meg kunnu tit als einki gera."* Jóh. 15,4-5. Tú kanst eins lítið liva eitt heilagt lív uttan Kristus, sum greinin kann vaksa og bera ávøkst uttan at verða verandi á trænum. Tað merkir, at uttan hann hevur tú ikki andaliga lívið í tær. Tú hevur ongan mátt til at standa ímóti freistingum ella vaksa í náði og heilagleika. Men tá ið tú verður verandi í honum, kanst tú bæði blóma og trívast. Tekur tú føðslu frá honum, følnar tú ikki ella ert uttan ávøkst. Tú verður sum træið, sum er plantað við løkir við rennandi vatni.

Mong halda, at tey sjálv mugu gera ein part av arbeiðinum. Tey
[74] litu á Jesus fyri at fáa syndafyrigeving, men nú royna tey at liva eitt rættvíst lív sjálv uttan hjálp. Men allar slíkar royndir fara at miseydnast. Jesus sigur: *„Uttan meg kunnu tit als einki gera."* Okkara vøkstur í náðini, okkara gleði og hvat gott vit so kunnu gera, er grundað á sambandið við Kristus. Tá vit hava samband við hann hvønn dag og hvørja stund - og verða verandi í honum - so vilja vit vaksa í náðini. Hann er ikki bara byrjan trúarinnar, men eisini tann, sum fullførir hana. Kristus er fyrstur, síðstur og til allar tíðir. Hann má vera við okkum í byrjanini á leiðini og í endanum, men eisini fyri hvørt fótafet. Dávid segði, at hann altíð hevði Harran fyri eyga. *„Við honum til høgru handar... eg fastur standi."* Sálm. 16,8.

Tú spyrt kanska: Hvussu kann eg vera verandi í Kristusi? Á sama hátt sum tú tókst ímóti honum í fyrstuni. *„Líkasum tit tí hava tikið ímóti Kristi Jesusi, Harranum, soleiðis skulu tit liva í honum."*

*„Men hin rættvísi mín skal liva av trúgv."* Kol. 2,6; Hebr. 10,38. Tú gavst teg fult og heilt í Guds hendur fyri at tæna honum og vera honum lýðin. Tú tókst ímóti honum sum tínum Frelsara. Tú kundi ikki sjálvur gera bót fyri tínar syndir ella broyta títt hjarta. Men tá ið tú hevði givið teg yvir til Gud, tá trúði tú, at hann fyri Kristi skuld gjørdi alt hetta fyri teg. Við trúgv gjørdist tú Kristi ogn, og við trúgv eigur tú at vaksa upp til hansara - við at geva og taka ímóti. Tú mást geva alt: títt hjarta, tín vilja og tænastu. Tú mást geva teg yvir til hansara fyri at kunna lýða øll boð hansara. Og tú mást taka ímóti øllum: taka ímóti Kristusi og hansara fullu signing, so hann kann búgva í tínum hjarta og vera tín styrki, tín rættvísi og ævigi hjálpari. [75]
Soleiðis kanst tú fáa megi til altíð at vera honum lýðin.

Tú mást halga teg til Gud á hvørjum morgni. Lat tað vera tað fyrsta, tú gert, og lat tína bøn vera: „Tak meg, Harri, at eg má vera barn títt, heilt og fult. Tað, sum eg havi í huga at gera, leggi eg í tínar hendur. Brúka meg í dag í tíni tænastu. Verð hjá mær og lat øll verk míni vera í samljóð við tín vilja." Ger hetta dagliga. Halga teg til Gud á hvørjum morgni fyri dagin. Legg allar ætlanir í hansara hendur og lat hansara forsjón gera av, um tær skulu útinnast ella ikki. Soleiðis kanst tú hvønn dag geva títt lív í Guds hond, og soleiðis verður tað meira og meira líkt Kristi lívi.

Lívið í Kristi er friðsælt.Tú merkir kanska ikki altíð tær sterku kenslurnar, men tú eigur altíð at hava eitt støðugt og friðsælt treysti á Gud. Tín vón er ikki grundfest í tær sjálvum, men í Jesusi. Veikleiki tín er sameindur við hansara styrki, títt óskynsemi við hansara vísdóm og títt máttloysi við hansara megi. Tí mást tú ikki hyggja at tær sjálvum ella lata tankarnar dvølja við teg sjálvan, men hyggja á Kristus. Hygg at hansara kærleika og vakra, fullkomna lyndi. Hansara ósjálvsøkni, reinleiki, heilagleiki og ómetaligi kærleiki er tað evni, ið mannasálin eigur at hugsa nógv um. Tá vit elska hann, gera sum hann og líta á hann, umbroytast vit so við og við til at verða honum meira lík.

Jesus sigur: *„Verðið í mær."* Hesi orð goyma í sær hvíld, fastleika og álit. Aftur sigur hann: *„Komið higar til mín ... og eg vil* [76]
*veita tykkum hvílu."* Matt. 11,28. Sálmaskaldið sigur: *„Ver tú fyri Harranum stillur og honum bíða." Og Jesaja vitnar, at „í tolinmóði og troysti skal styrki tykkara vera."* Sálm. 37,7; Jes. 30,15. Henda hvíld er ikki at finna í yrkisloysi, tí í boði Frelsarans er lyftið um

hvíld knýtt at kalli hansara til at arbeiða: *„Takið upp á tykkum ok mítt ... og tá skulu tit finna hvílu fyri sálum tykkara.“* Matt. 11,29. Tann, sum í hjarta sínum hvílir fullkomiliga í Kristusi, er tann ídnasti og mest virksami í hansara verki.

Tá vit lata tankarnar mala um okkum sjálv, vendast teir burtur frá Kristusi, ið er keldan til lív og megi. Tí roynir Satan altíð at beina hugin burtur frá Frelsaranum og soleiðis forða fyri, at mannasálin hevur samband og samveru við Kristus. Freistarin roynir at leiða tankarnar til heimsins stuttleikar, lívsins ótta, sorg og sút, til mistøk hjá øðrum ella tíni egnu mistøk og ófullkomileika. Lat teg ikki villleiða av hansara svikaráðum. Hann fær alt ov ofta mong, sum av sonnum eru samvitskufull og royna at liva nær Gudi, til at festa seg ov mikið við síni egnu mistøk og veikleikar. Og við soleiðis at skilja tey frá Kristusi, vónar hann at vinna sigur á teimum. Vit eiga ikki at lata alt snúgva seg um okkum sjálv ella stúra og óttast viðvíkjandi okkara egnu frelsu. Alt slíkt leiðir mannasálina burtur frá kelduni, sum er okkara styrki.

Lat Gud hava umsorgan fyri tær og lít á hann. Lat talu og hugsan tína snúgva seg um Jesus, og lat hann koma framum teg sjálvan.
[77] Kasta frá tær allan iva og halt uppat at óttast. Sig sum ápostulin Paulus: *„Eg eri krossfestur við Kristi; og tað eri ikki longur eg, sum livi, men Kristus livir í mær. Men tað, sum eg nú livi í holdinum, tað livi eg í trúnni á Guðs son, sum elskaði meg og gav seg sjálvan upp fyri meg.“*Gal. 2,20. Hvíl í Gudi. Hann hevur mátt til at varðveita tað, sum tú hevur litið honum til. Um tú gevur teg í hansara hendur, so er hann mentur til at lata teg meira enn sigra við honum, hann sum hevur elskað teg.

Tá ið Kristus tók á seg náttúru menniskjans, bant hann mannaættina til sín við einum kærleiksbandi, sum ikki kann slítast av nøkrum øðrum enn av menniskjans egna vali. Við sínum freistingum roynir Satan áhaldandi at tøla og lokka okkum til at slíta hetta band og at velja tað, sum skilur okkum frá Kristi. Tí mega vit vakja og biðja og strevast álvarsliga, so at einki kann fáa okkum til at velja nakran annan harra enn Kristus. Tað stendur okkum altíð frítt at velja. Men lat okkum hava eyguni fest á Jesus, so hann kann varðveita okkum. Vit eru trygg, meðan vit hyggja upp á hann, og eingin kann tá ríva okkum úr hansara hond. Við støðugt at hyggja á hann, broytast vit

*„til hina somu mynd frá dýrdleika til dýrdleika, við tað at tað kemur frá harra andans.“* 2. Kor. 3,18.

Á henda hátt gjørdust fyrstu lærusveinarnir líkir sínum kæra Frelsara. Tá teir hoyrdu Jesu orð, skiltu teir, at teimum tørvaðu hann. Teir leitaðu, teir funnu og teir fylgdu honum. Teir vóru saman við honum heima við hús, til borðs, í loynikamarinum og úti á markini. Teir vóru saman við honum sum næmingar við lærara sínum, og [78]
fingu hvønn dag undirvísing av varrum hansara um Guds heilaga sannleika. Teir litu á hann sum tænarar líta á meistara sín fyri at læra sínar skyldur. Hesir lærusveinar vóru menn, sum vóru undir somu korum sum vit. Teir høvdu sama stríð ímóti syndini sum vit, og teimum tørvaðu ta somu náði sum vit fyri at liva eitt heilagt lív.

Enntá Jóhannes, elskaði lærusveinurin, sum var mest líkur Frelsaranum og eina best endurspeglaði mynd hansara, hevði ikki frá náttúrunnar hond hetta elskuliga lyndi. Nei, umframt at vera tvørur og ærusjúkur var hann eisini bráðsintur og hevnisamur, tá ið órættur varð gjørdur móti honum. Men tá ið hann sá Jesu lyndi, sá hann, hvat ið vantaði í hjá sær av broytingum, og hann gjørdist sera lítillátin. Hann sá styrkina og tolið, máttin og mildleikan, hátignina og spaklyndið í dagliga lívinum hjá Guds soni. Og hetta fylti hansara sinni við undran og kærleika. Hvønn dag varð hjarta hansara drigið nærri at Jesusi, til hann misti seg sjálvan burtur av kærleika til Meistaran. Hitt hevnisama og ærusjúka sinnalagið broyttist av Kristi ávirkan. Heilagi Andin endurføddi hansara hjarta, og Kristi kærleiksmegi broytti hansara lyndi. Hetta er altíð úrslitið av felagsskapi við Jesus. Tá ið hann býr í hjartanum, broytist øll okkara náttúra. Kristi Andi og kærleiki ger hjartað milt, fær tamarhald á sinninum og lyftir tankar og ynskir upp eftir til Gud og himmalin.

Tá Kristus steig upp til himmals, høvdu lærusveinar hansara
enn eina kenslu av hansara nærveru. Tað kendist, sum var hann [79]
persónliga hjástaddur, fullur av kærleika og Ijósi. Jesus - Frelsarin - hevði gingið, talað og biðið saman við teimum og við orðum sínum fylt teirra hjarta við vón og troyst. Hann varð tikin upp til himmalin, meðan friðarorðini enn Ijóðaðu frá hansara varrum. Ljóðið av rødd hansara kom aftur til teirra, í tí at einglaskarin tók ímóti honum:*„Sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraIdar enda.“* Matt. 28,20. Hann fór upp til himmals í mannalíki. Teir vistu, at hann stóð framman fyri Guds trónu og enn var teirra vinur og Frelsari, at

samkensla hansara var óbroytt, og at hann framvegis var sameindur við líðandi mannaættina. Hann legði fram fyri Gud virðið av sínum egna dýrabara blóði, og sýndi fram sárini á hondum og fótum sínum, sum mintu á, hvussu dýrt hann hevði keypt síni endurloystu. Teir vistu, at hann var farin upp til himmalin at gera teimum stað til reiðar, og at hann fór at koma aftur at taka teir til sín.

Tá ið teir komu saman aftan á himmalsferð hansara, løgdu teir fúsir sínar bønir fram fyri faðirin í Jesu navni. Teir boygdu høvdið í hátíðarligari bøn og endurtóku Jesu lyfti: *„Hvat tit so biðja faðirin um, tað skal hann geva tykkum í navni mínum. ... Biðið og tit skulu fáa, fyri at gleði tykkara kann verða fullkomin."* Jóh. 16,23-24. Teir rættu trúarinnar hond hægri og hægri upp, tí teir vistu, at *„Kristus Jesus er tann, sum deyður er, og meira enn tað, er risin upp frá deyðum, hann sum er við høgru hond Guðs, hann sum eisini gongur í forbøn fyri okkum."* Róm. 8,34. Og á hvítusunnu kom talsmaðurin til teirra. Kristus hevði sagt: *„Hann skal verða hjá tykkum allar*
[80] *ævir."* Og *„tað er tykkum at gagni, at eg fari burtur. Tí at fari eg ikki burtur, kemur talsmaðurin ikki til tykkara; men fari eg burtur, skal eg senda hann til tykkara."* Jóh. 14,16; 16,7.

Eftir ta tíð vildi Kristus við Anda sínum støðugt búgva í hjørtunum hjá børnum sínum.Teirra samband við hann var inniligari, enn tá hann sjálvur var hjá teimum. Kristus búði í teimum, og hansara kærleiksljós og megi lýsti ígjøgnum teir, so at tey, sum sóu teir, undraðust. *„Og teir komust við teir, at teir høvdu verið við Jesusi."* Áp. 4,13.

Alt tað, sum Kristus var fyri sínar fyrstu lærusveinar, vil hann eisini vera fyri børn síni nú á døgum. Í seinastu bøn síni, sum hann bað, tá fámentur hópur av lærusveinum var um hann, segði hann:*„Men eg biði ikki eina fyri hesum, men eisini fyri teimum, sum fyri orð teirra fara at trúgva á meg."* Jóh. 17,20.

Jesus bað fyri okkum, og hann bað um, at vit máttu vera sameind við hann, eins og hann og faðirin eru eitt. Vissuliga ein undurfull sameining! Frelsarin hevur sagt um seg sjálvan, at *„Sonurin kann als einki gera av sær sjálvum." „Faðirin, sum í mær er, hann ger gerningar sínar."* Jóh. 5,19; 14,10. Tá ið Kristus býr í okkara hjørtum, vil hann virka í okkum *„bæði at vilja og at virka, eftir sínum tokka."* Fil. 2,13. Vit fara tá at arbeiða, sum hann arbeiddi og sýna sama anda. Og tá vit soleiðis elska hann og verða í honum,

so skulu vit „ *í øllum lutum vaksa upp til hansara, sum er høvdið, Kristus.*“ Ef. 4,15.

[81] 

## 9. Starvið og lívið

Ljósið, lívið og øll sonn gleði í alheiminum kemur frá Gudi. Signingar streyma frá honum út til alt, sum skapað er, eins og sólarljós og sum vatnstreymar frá eini livandi keldu. Og har sum lív Guds er í hjørtunum á menniskjum, vil tað streyma út til onnur við kærleika og signing.

Tað var ein stór gleði fyri Frelsaran at lyfta upp og frelsa fallin menniskju. Hann helt ikki sítt egna lív vera ov dýrabart, men toldi krossin uttan at hugsa um vanvirðingina. Einglarnir arbeiða eisini alla tíðina fyri onnur og fyri at gleða tey. Hetta er teirra gleði. Sjálvgóð hjørtu halda tað vera vanærandi arbeiði at hjálpa lágt settum og ólukkudýrum, sum standa aftanfyri øll onnur í samfelagnum. Men júst hesi arbeiða teir syndafríu einglarnir fyri. Kristi kærleiksandi er ósjálvsøkin. Hesin andi ræður í himlinum og skapar sjálvt
[82] grundarlagið fyri eydnuni har. Kristi lærusveinar vilja verða fyltir av hesum anda, og tað vil síggjast í teirra verki.

Kristi kærleiki í hjartanum er sum ein søtur angi, ið ikki kann fjalast. Øll, sum vit koma í samband við, vilja merkja hesa heilagu ávirkan. Kristi andi í hjartanum er sum ein kelda í oyðimørkini, sum rennur fyri at leska øll og fær tey, sum eru nær við at glatast, til at leingjast eftir at drekka av lívsins vatni.

Kærleikin til Jesus vil vísa seg í ynskinum um at arbeiða á sama hátt, sum hann gjørdi, fyri at signa mannaættina og lyfta hana upp. Hesin kærleiki vil vekja samkenslu, eymleika og kærleika í okkum ímóti øllum teimum skapningum, sum okkara himmalski faðir hevur umsorgan fyri.

Lív Frelsarans her á jørð var ikki merkt av leti og sjálvgóðsku. Álvarsliga og ótroyttiliga arbeiddi hann fyri at frelsa ta glataðu mannaættina. Frá krubbu til krossin spardi hann ikki seg sjálvan og royndi ikki at sleppa sær undan torførum uppgávum, møðsamum ferðum ella umsorgan og strævnum arbeiði. Hann segði: *„Eins og menniskjusonurin ikki er komin at verða tænaður, men at tæna og geva lív sítt sum loysigjald fyri mong.“* Matt. 20,28. Hetta var

hansara høvuðsendamál í lívinum. Alt annað hevði minni at týða. Tað var hansara matur og drekka at gera Guds vilja og fullføra hansara gerning. Hann kendi ikki til sjálvgóðsku og sjálvsøkin áhugamál.

Tey, sum eiga lut í Kristi náði, vilja á sama hátt vera til reiðar [83] at ofra hvat tað skal vera, fyri at onnur, sum hann eisini doyði fyri, kunnu fáa lut í tí himmalsku gávuni. Tey vilja gera alt, tey kunnu, fyri at teirra lív kann gera heimin betri. Hesin andi kemur altíð til sjóndar hjá tí, sum av sonnum er umvendur. So skjótt sum eitt menniskja kemur til Kristus, vil tað av hjarta ynskja at siga øðrum frá, hvønn vin tað hevur funnið í Jesusi. Tann frelsandi og heilaggerandi sannleikin kann ikki bert goymast í sinninum. Eru vit íklødd Kristi rættvísi og fylt við gleði í Heilaga Andanum, kunnu vit ikki tiga. Um vit hava smakkað og sæð, at Harrin er góður, hava vit nakað at siga øðrum. Vit vilja bjóða øðrum at koma til hansara, eins og Filip gjørdi, tá hann fann Frelsaran. Vit vilja royna at vísa teimum Kristi góða sinnalag, og at framtíðar heimurin er veruleiki. Okkara hægsta ynski verður at fylgja tí vegi, sum Jesus gekk. Og okkara djúpi longsul verður, at okkara medmenniskju skulu síggja *„Guðs lambið, sum ber synd heimsins.“* Jóh. 1, 29.

Og tá ið vit bera signingar til onnur, fáa vit eisini sjálv signingar aftur. Hetta var Guds endamál við at geva okkum eitt arbeiði at gera í síni frelsuætlan. Hann hevur givið menniskjum tann framíhjárætt at fáa lut í tí guddómligu náttúruni, og afturfyri mega tey bera signingar til síni med-menniskju. Hetta er tann hægsta æran og størsta gleðin, ið Gud kann geva menniskjum. Tey, ið soleiðis taka lut í hesi kærleikstænastu, koma sínum skapara nærmast.

Gud hevði kunnað latið teir himmalsku einglarnar um at boða [84] gleðiboðskapin og fullføra miskunnarverkið. Hann hevði kunnað brúkt aðrar mátar fyri at fullføra sína ætlan. Men í sínum æviga kærleika valdi hann at gera okkum til síni samstarvsfólk, saman við Kristusi og einglunum, so at vit kunnu fáa lut í signingini, gleðini og tí høga andaliga støðinum, sum henda ósjálvsøkna tænasta ber við sær.

Vit fáa tætt samband við Kristus, tá vit taka lut í hansara líðingum. Hvør ósjálvsøkin gerð, sum kemur øðrum til góðar, styrkir góðgerðarandan í hjarta gevarans, og knýtir hann fastari til heimsins endurloysara, sum *„fyri tykkara skuld gjørdist fátækur, tá ið hann*

*var ríkur, fyri at tit við fátækt hansara skuldu verða ríkir.*“ 2. Kor. 8,9. Tað er bert, tá ið vit soleiðis uppfylla Guds ætlan við skapan okkara, at lívið kann gerast ein signing fyri okkum sjálv.

Um tú vilt arbeiða eftir Kristi ætlan og vinna sálir til hansara, so vilt tú fáa eitt ynski um at læra meira um tað guddómliga.Tú vilt tá hungra og tysta eftir rættvísi.Tú vilt biðja inniliga til Gud um, at trúgv tín verður styrkt, so tú kanst fáa meira at drekka av frelsunnar keldu. Mótstøða og royndir, ið tú møtir, vilja eggja teg til bøn og at lesa í Skriftini.Tú vilt vaksa í náðini og fáa størri kunnleika um Kristus og ríkari lívsroyndir við Gudi.

Ósjálvsøkið arbeiði fyri onnur gevur lyndinum dýpd, fastleika og kristiligt yndi, umframt frið og eydnu. Tú tráar eftir hægri málum,
[85] og einki pláss verður fyri leti og sjálvgóðsku. Tey, sum soleiðis venja seg í kristnum dygdum, vilja vaksa og gerast sterk í Guds verki. Tey fáa eina greiða fatan av tí andaliga, eina støðugt vaksandi trúgv og økta bønarmegi. Andi Guds virkar á tey og kveikir eitt heilagt samljóð í sinnið. Tey, sum halga seg til ósjálvsøkið arbeiði fyri at hjálpa øðrum, arbeiða vissuliga fyri síni egnu frelsu.

Vit kunnu bert vaksa í náðini við at gera just tann gerning, ið Kristus hevur litið okkum upp í hendur. Vit skulu eftir besta førimuni veita hjálp og signing til teirra, sum tørva okkara hjálp. Styrkin kemur av at arbeiða. Og virksemið er neyðug treyt fyri lívið. Tey, sum royna at vera kristin við einans at taka ímóti signingunum, sum koma við náðini, og einki útinna fyri Kristus, royna at liva av at eta uttan at arbeiða. Men tað førir altíð til veikleikar og afturgongd, bæði í tí andaliga og tímiliga heiminum. Tann, ið ikki vil brúka sínar limir, missir skjótt alla megi til at brúka teir. Á sama hátt vil tann kristni, sum ikki brúkar ta styrki, sum Gud hevur givið honum, ikki bara halda uppat at vaksa upp til Kristus, men vil eisini missa ta kraft, sum hann longu hevur fingið.

Kristi samkoma er Guds útvalda amboð til menniskjans frelsu. Hon skal bera heiminum gleðiboðskapin. Henda skylda hvílir á øllum kristnum. Ein og hvør má brúka síni bestu evnir og hvørt høvi til at gera tað verk, sum Frelsarin hevur litið honum til. Kristi kærleiki, sum er opinberaður fyri okkum, setur okkum í skuld til øll, sum ikki kenna hann. Gud hevur givið okkum Ijósið, fyri at vit skulu bera tað víðari til onnur, og ikki bert hava tað fyri okkum sjálv.

[86] Um tey, sum fylgja Kristusi eftir, vóru meira vakin og skiltu sínar

skyldur rætt, høvdu fleiri túsund boðað gleðiboðskapin í heidnum londum, har nú bert ein trúboðari er. Øll tey, sum ikki sjálv kunnu taka lut í hesum verki, kunnu tó stuðla við ognum, áhuga og bønum sínum. Harafturat hevði tað eisini verið arbeitt við størri ágrýtni fyri fólkið í kristnu londunum.

Okkum tørvar ikki at fara til heiðin lond fyri at tæna Kristusi - ella frá næsta skyldfólki okkara, um tað er har, at skylda okkara liggur. Vit kunnu arbeiða fyri hann í okkara egna heimi, í samkomuni og ímillum tey, sum vit eru saman við í tí dagliga.

Størsta partin av ævi síni her á jørð arbeiddi Frelsarin tolin í einum timburverkstaði í Nasaret. Tænandi einglar fylgdu lívsins Harra, tá hann, ókendur og uttan at vera høgt í metum, gekk saman við bóndum og arbeiðsfólki. Hann var líka so trúfastur í sínum arbeiði sum handverkari, sum tá ið hann grøddi sjúk ella gekk á teimum ókyrru aldunum á Genesaretvatni. Vit kunnu ganga við Jesusi og virka fyri hann, eisini tá vit gera smáar skyldur.

Ápostulin sigur: *„Brøður, ein og hvør verði verandi hjá Guði í tí standi, sum hann varð kallaður í!“* 1. Kor. 7,24. Handilsmaðurin kann reka sín handil á ein slíkan hátt, at Meistari hansara verður hálovaður av hansara trúskapi. Gongur hann av sonnum í Kristi fótasporum, vil hann hava sína trúgv við í øllum, sum hann ger, og opinbera Kristi Anda fyri menniskjum. Handverkarin kann vera [87]
eitt íðið og trúfast umboð fyri hann, sum dagliga arbeiddi hart í sínum vanliga yrki milium heyggjarnar í Galileu. Ein og hvør, sum nevnir Kristi navn, eigur at arbeiða soleiðis, at onnur kunnu síggja góðu verk hansara og av hesum verða leidd til at æra skapara og endurloysara sín.

Mong hava ikki brúkt síni evnir í Kristi tænastu, tí tey halda, at onnur hava betri evnir og fortreytir til tað. Nógv hava hildið, at bert tey, sum hava framúr góðar gávur, eiga at halga evnini í tænastu fyri Gud. Mong hava ta fatan, at góð evnir bara verða givin til ein útvaldan bólk, og at øll onnur av teirri grund ikki eru kallað til at taka lut í arbeiðinum ella at fáa lønina. Hetta er ikki tað, sum líknilsið um talentirnar lærir okkum. Tá húsbóndin kallaði á tænarar sínar, so gav hann teimum hvør sín gerning at gera.

Vit kunnu gera lívsins smáu skyldur í einum kærleiksfullum anda *„sum var tað fyri Harranum.“* Kol. 3,23. Um Guds kærleiki er í hjartanum, vil hann koma til sjóndar í lívinum. Andi Krists vil vera

rundan um okkum, og okkara ávirkan vil verða til signingar fyri onnur og lyfta tey upp.

Tú eigur ikki at bíða eftir einum serligum høvi ella vænta at fáa óvanlig evnir, áðrenn tú byrjar at arbeiða fyri Gud. Tær nýtist ikki at stúra fyri, hvat heimurin hugsar um teg. Um títt dagliga lív er ein vitnisburður um reinu trúgv tína, og onnur eru sannførd um, at tú vilt teimum bara alt gott, so hevur títt stríð ikki verið nyttuleyst.

[88] Tey mest lítillátaðu og fátækastu millum Jesu lærusveinar kunnu verða til signingar fyri onnur. Tey hugsa kanska ikki sjálv, at tey gera nakað serligt. Men teirra ótilvitaða ávirkan kann verða sum bylgjur av signingum, ið gerast breiðari og djúpari sum tíðin líður. Ávøkstin av hesi ávirkan koma tey kanska ikki at kenna fyrr enn á stóra roknskapardegnum. Tey vita seg ikki gera nakað stórvegis. Tað er ikki ætlanin, at tey skulu stúra fyri, um úrslitið verður nóg gott. Teimum nýtist bert í stillum trúskapi at gera tað verk, sum Gud í síni forsjón gevur teimum. So vil teirra lív verða til nyttu. Tey broytast meira og meira eftir Kristi mynd.Tey samstarva við Gud í hesum lívinum, og soleiðis verða tey fyrireikað til ein størri gerning og til fullkomna gleði í lívinum, sum er í vænti.

# 10. Kunnleiki um Gud [89]

Gud roynir á mangan hátt at opinbera seg fyri okkum og leiða okkum til sín. Náttúran talar støðugt til okkara sansir. Tann, ið letur hjarta sítt upp, verður hugtikin av Guds kærleika og stórleikanum, sum hansara verk vitna um. Tað oyrað, ið lurtar, kann hoyra og fata Guds talu ígjøgnum náttúruna. Tann grøni bøurin, tey høgu trøini, blómurnar og blómuknopparnir, skýggini, regnskúrarnir, tutlandi áarløkurin og vakra himmalhválvið tala til okkara og bjóða okkum at læra hann at kenna, sum skapaði alt.

Frelsarin knýtti ofta sína frálæru til tað, sum var at finna í náttúruni. Hann brúkti trøini, fuglarnar, blómurnar, heyggjarnar, vøtnini, havið, himmalhválvið og tilburðir úr gerandisdegnum í síni undirvísing um sannleikan. Soleiðis kundu menniskjuni minnast [90]
tað, sum hann hevði sagt, eisini í teirra dagliga strevi og stríði.

Gud ynskir, at hansara børn virðismeta skapanarverkið og gleðast um vakurleikan, sum hann hevur prýtt okkara jarðiska heim við. Hann elskar tað vakra, og fram um alt tann innara vakurleikan. Gud ynskir, at vit mennast í reinleika og góðsku og prýðast við tí stilla yndi, sum vit síggja hjá blómunum á markini.

Um vit bara vilja lurta, so vil skapanarverk Guds geva okkum dýrabaran lærdóm um lýdni og álit. Frá stjørnunum, sum øld eftir øld fylgja rásunum, sum eru ávístar teimum, og niður til tað minsta atomið, so aktar øll náttúran vilja skaparans. Gud hevur umsorgan fyri øllum, sum hann hevur skapað. Og hann, sum heldur uppi teimum óteljandi verøldunum í endaleysu rúmdini, hevur samstundis umsorgan fyri tí lítla smáfuglinum, ið óttaleysur syngur sín lítillátaða sang. Okkara himmalski faðir vakir yvir øllum, bæði tá ið menniskjuni fara til sítt dagliga arbeiði ella boyggja knø í bøn, leggjast á kvøldi ella fara upp úr songini á morgni, tá ríki maðurin ger seg til reiðar til veitslu í høll síni ella tann fátæki savnar børn síni um sítt fátæksliga borð. Eingi tár renna, uttan at Gud sær tað. Eingin brosar, uttan at hann ansar eftir tí.

Um vit trúðu hesum av heilum huga, hvarv øll óneyðug stúran.
[91] Okkara lív hevði tá ikki verið so fult av vónbrotum sum nú, tí vit høvdu lagt alt, stórt sum smátt, í Guds hond. Hann møðist ikki av trupulleikum, hvussu stórir og tungir teir enn eru. Tá høvdu vit glett okkum í einum andaligum friði, sum mong ikki kenna til.

Tá ið tú soleiðis gleðist um alt tað vakra á jørðini, so hugsa um hin komandi heimin, har eingin synd, neyð ella deyði er til longur - ei heldur skuggi av banning. Ger tær í huganum mynd av heiminum hjá teimum frelstu og minst til, at tað verður enn betri enn títt ljósasta hugflog kann geva tær ábendingar um. í Guds margfaldaðu gávum, sum hann hevur givið okkum í náttúruni, síggja vit bert eitt sindur av hansara dýrd. Skrivað stendur:*„Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað sum Guð hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann“*. 1. Kor. 2,9.

Skaldið og náttúrufrøðingurin hava nógv at siga um náttúruna, men tað er tann kristni, ið gleðir seg mest um vakurleikan á jørðini. Hann sær handalagið og stóra kærleikan hjá faðir sínum í hvørjari blómu, runni og træi. Eingin kann til fulnar virðismeta dalar, fjøll, áir og vøtn, uttan tann, sum sær hetta sum eitt tekin um Guds kærleika til menniskjuni.

Gud talar til okkara við síni forsjón og gjøgnum Andan, sum ávirkar hjartað. Í okkara viðurskiftum, umhvørvi og í teimum broytingum, sum dagliga fara fram rundan um okkum, kunnu vit fáa dýrabaran lærdóm, um vit bert taka ímóti honum við opnum hjarta.
[92] Sálmaskaldið sigur: *„Av Harrans miskunn jørðin er full.“ „Hann, ið vísur er, leggi hetta í geyma og gevi gætur eftir náðigerðum Harrans!“* Sálm. 33,5; 107,43.

Gud talar til okkara ígjøgnum sítt orð. Her síggja vit eina enn týðuligari opinbering av hansara lyndi, hansara stjórn viðvíkjandi menniskjunum og stóra arbeiði fyri at endurloysa okkum. Her verður sagt frá patriarkunum, profetunum og øðrum heilagum monnum í gomlum døgum. Hesi vóru menniskju *„undir somu korum sum vit.“* Ják. 5,17. Vit síggja, hvussu hesi møttu somu trupulleikum, sum vit møta, hvussu tey fullu í somu freistingar sum vit, fingu mótið av nýggjum, og við Guds náði vunnu sigur. Tá ið vit síggja hetta, lívast vit upp í okkara strevan eftir rættvísi. Vit lesa um dýrabaru løturnar í teirra lívi, um ljósið, kærleikan og signingarnar, ið tey gleddust um, og um tey verk, sum tey framdu av Guds náði. Tá tendrast sami

brandur í okkum, sum gjørdi tey eldhugað. Heilagi Andin ávirkar hjartað og gevur okkum eitt ynski um at gerast teimum lík í lyndi - at ganga við Gudi eins og tey.

Jesus segði soleiðis um skriftirnar í Gamla Testamenti (og hvussu mikið meira kann tað ikki sigast um tað Nýggja): *„Og tað eru tær, sum vitna um meg.“* Jóh. 5,39. Tær vitna um endurloysaran, hann, sum øll okkara vón um ævigt lív hvílir á. Ja, øll Bíblian vitnar um Kristus. Hetta sæst líka frá fyrstu frásøgnini um skapanina, tí uttan hann *„var einki til av tí, sum til er vorðið“* til síðstu fyrijáttanina: *„Sí, eg komi skjótt.“* Jóh. 1,3; Op. 22,12. Her lesa vit um hansara [93]
verk og lýða á rødd hansara. Ynskir tú at læra Frelsaran at kenna, so rannsaka ta Heilagu Skriftina.

Fyll hjarta títt við Guds orði. Hetta er tað livandi vatnið, ið vil sløkkja tín brennandi tosta. Hetta er lívsins breyð. Jesus sigur: *„Eta tit ikki hold menniskjusonarins og drekka blóð hansara, tá hava tit ikki lív í tykkum.“* Og hann greinar týdningin av hesum, tá ið hann sigur: *„Orðini, sum eg havi talað til tykkara, eru andi og eru lív.“* Jóh. 6,53.63. Likam okkara verður bygt upp av tí, vit eta og drekka. Og soleiðis sum tað er við tí jarðiska, er tað eisini við tí andaliga. Tað er tað, sum vit hugsa um, ið gevur okkara andaligu náttúru hennara sermerki og styrki.

Endurloysingin er eitt evni, sum einglarnir ynskja at fáa innlit

i. Hon verður evnið, sum frelsti skarin fer at granska og lovsyngja um ígjøgnum tann óendaliga ævinleikan. Er hetta ikki vert at hugsa gjølla um nú? Jesu stóra miskunnsemi, kærleiki og tað ofrið, ið gjørt varð fyri okkum, krevur ta álvarsamastu og djúpastu umhugsan. Vit hava brúk fyri at dvølja við lyndiseyðkennini hjá okkara endurloysara og talsmanni. Vit eiga at hugsa nógv um hansara gerning, sum kom fyri at frelsa fólk sítt frá syndum teirra. Tá ið vit soleiðis hugsa um tað, sum hoyrir himlinum til, vilja okkara trúgv og kærleiki støðugt styrkjast. Bønir okkara toknast eisini Gudi betur, tí tær vilja vísa støðugt vaksandi trúgv og kærleika. Tær verða meira skynsamar og inniligar. Vit vilja fáa eitt meira varandi álit á Jesusi [94]
og dagliga fáa at kenna hansara mátt til at frelsa til fulnar øll tey, sum koma til Gud við honum sum millummanni.

Tá ið vit síggja Frelsarans fullkomileika, vilja vit tráa eftir at umbroytast, endurnýggjast og gerast rein, eins og hann er reinur. Vit vilja hungra og tysta eftir at verða honum lík, sum vit tilbiðja. Jú

meira vit hugsa um Kristus, tess meira tala vit um hann við onnur og opinbera hann soleiðis fyri heiminum.

Bíblian varð ikki bert skrivað fyri tey lærdu. Hon er tvørturímóti ætlað heilt vanligum menniskjum. Teir stóru sannleikarnir, sum hava týdning fyri frelsuna, eru klárir sum sólin. Eingin kann glatast ella villast av vegnum uttan tey, sum ganga eftir sínum egna viti í staðin fyri Guds týðuliga opinberaða vilja.

Vit eiga ikki bara at góðkenna vitnisburðin frá øðrum menniskjum um, hvat ið Skriftin lærir, men sjálv granska Guds orð. Lata vit onnur hugsa fyri okkum, viknar okkara egna megi og førleikarnir minka. Um tey stórbaru evnini, sum sinnið hevur, ikki verða brúkt nóg mikið til at granska mál, sum eru verd at kýta seg við, kunnu hesi evnir gerast so kryplað, at tey ikki longur eru før fyri at fata tann djúpa týdningin í Guds orði. Evnini at hugsa styrkjast av at granska í Bíbliuni, og við at samanbera ymisk andalig mál og skriftstað við skriftstað.

[95] Einki er betri egnað til at styrkja vitið enn at granska Bíbliuna. Eingin onnur bók hevur slíka megi til at hevja tankarnar og at styrkja okkara hugsunarevnir sum teir stóru og reinu sannleikarnir í Bíbliuni. Um Guds orð varð granskað, sum tað átti, høvdu fólk fingið eina andaliga menning, eitt stórbart lyndi og ein fastleika, sum sjáldan sæst á okkara døgum.

Men lítið gagn er í bert at lesa Skriftina leysliga. Ein kann lesa hana alla uttan at síggja vakurleikan ella at fata hennara djúpa og loyndarfulla týdning. Tað er betri at umhugsa eitt skriftorð í senn, inntil tú skilir týdningin og sambandið við frelsuofrið, enn at lesa nógvar kapitlar uttan mál og mið, og tí uttan at fáa nakran veruligan lærdóm. Hav altíð Bíbliuna hjá tær, les í henni, tá ið tú hevur ein møguleika, og royn at festa teg við skriftstøðini og seta orðini í minnið. Sjálvt tá ið tú gongur á gøtuni, kanst tú lesa eitt skriftstað, hugsa um tað og soleiðis festa tað í minnið.

Vit kunnu ikki ogna okkum vísdóm uttan hugagóða og álvarsama gransking, har vit biðja Guds Anda vegleiða okkum. Vissuliga eru summir partar av Skriftini so týðuligir, at teir ikki kunnu misskiljast. Men aðrir eru, har merkingin ikki er so týðulig, at alt kann skiljast við fyrsta eygnabrá. Skriftorð má sammetast við skriftorð. Ein noyðist at granska gjølla og døma um tað í bønaranda. Ein slík granskan verður ríkiliga afturlønt. Fólk í námsvinnuni leita eftir

lindum av reinum málmi, ið eru fjaldar undir jarðarskorpuni. Eins og hesi leita eftir fjaldum dýrgripum, soleiðis vil tann, sum áhaldandi rannsakar Guds orð, leita eftir og finna sannleikar, sum eru av største virði. Men hesir eru fjaldir fyri teimum, sum bert leita í líkasælu. Tá ið tey gudgivnu orðini verða umhugsað í hjartanum, blíva tey sum streymar, ið renna frá lívsins keldu. [96]

Bíblian eigur ikki at verða lisin uttan bøn. Áðrenn vit lata Bíbliuna upp, eiga vit at biðja um vegleiðing frá Heilaga Andanum, og hon verður tá givin okkum. Tá Nathanael kom til Jesus, segði Frelsarin: *„Sí, har er av sonnum Ísraelitur, sum ikki svik eru í! Nathanael sigur við hann: „Hvaðan kennir tú meg?“ Jesus svaraði og segði við hann: „Áðrenn Filippus rópaði teg, sá eg teg, har sum tú vart undir fikutræinum.“* Jóh. 1,48-49. Jesus sær okkum eisini, tá ið vit biðja í loyndum, um vit leita til hansara fyri at fáa ljós og finna sannleikan. Einglar frá ríki ljósins vilja vera hjá teimum, sum við eyðmjúkum hjarta søkja guddómliga vegleiðing.

Heilagi Andin hevjar Frelsaran upp og lovprísar honum. Tað er lutur Andans at kunna um Kristus, hansara rættvísi, reinleika og frelsuna í honum. Jesus sigur: *„Hann skal taka av mínum og kunngera tykkum.“* Jóh. 16,14. Sannleikans Andi er tann einasti rætti lærarin í guddómligum sannleika. Hvussu høgt má Gud so ikki elska mannaættina, tá hann kundi geva son sín í deyðan fyri hana og hevur sent Heilaga Andan til at vera lærari hjá menniskjunum, og at vera teimum ein støðugur vegleiðari!

[97]

# 11. Signing bønarinnar

Gud talar til okkara gjøgnum náttúruna, í sínum opinberaða orði, við síni forsjón og ávirkan av Anda sínum. Men hetta er ikki nóg mikið. Okkum tørvar eisini at lata hjørtuni upp fyri honum. Fyri at fáa lív og kraft frá Andanum mega vit hava eitt livandi samband við okkara himmalska faðir. Vit kunnu kenna okkum drigin at honum og hugleiða um hansara gerðir, náði og signingar. Men hetta er í roynd og veru ikki at samtala við hann. Fyri at samtala við Gud mega vit hava okkurt at siga honum um okkara egna lív.

Bøn er at opna hjartað fyri Gudi sum fyri einum vini. Tað er ikki neyðugt fyri at siga Gudi frá, hvat og hvørji vit eru, men fyri at vit kunnu taka ímóti honum. Bønin flytur ikki Gud niður til okkara,
[98] men hon lyftir okkum upp til hansara. Tá Jesus var her á jørðini, lærdi hann lærusveinarnar at biðja. Hann lærdi teir at leggja sín dagliga tørv fram fyri Gud hvønn dag og kasta allar sorgir á hann. Hann vissaði teir um, at hann hoyrdi teirra bønir, og ta vissu kunnu vit eisini eiga.

Sjálvur bað Jesus ofta, tá hann var her á fold. Frelsari okkara javnsetti seg sjálvan við okkum í okkara neyð og veikleika. Hann leitaði í bøn fyri at fáa styrki av nýggjum frá faðir sínum. Soleiðis fyrireikaði hann seg til at gera sínar skyldur og møta teimum royndum, ið stóðu fyri framman. Hann er okkara fyrimynd í øllum viðurskiftum. Hann er ein bróðir í okkara veikleikum, *„ein, sum er freistaður á allan hátt líka við okkum."* Hebr. 4,15. Av tí at hann var uttan synd, beyð tað ónda honum inniliga ímóti. Hann fekk nógv ímóti sær og mátti tola svára sálarkvøl í hesum synduga heimi. Jesus tók á seg mannanáttúru, og tí var bøn neyðug og til signing fyri hann. Í samtalu við faðir sín fann hann troyst og gleði. Tá ið Frelsarin, Guds sonur, hevði tørv fyri at biðja, hvussu mikið meira áttu tá ikki deyðilig menniskju, syndug og veik, at kent tørvin fyri inniligari, støðugari bøn?

Faðir okkara á himni er altíð til reiðar til fult og heilt at geva okkum sína signing. Tað er okkara framíhjárættur at kunna drekka

ríkiliga úr hansara óendaligu kærleikskeldu. Er tað so ikki løgið, at vit ikki biðja meira, enn vit gera? Gud er bæði til reiðar og fúsur at lurta eftir hvørjari einfaldari bøn frá hansara mest hjálparleysu børnum. Og tó eru vit alt ov trek til at siga honum okkara tørv. Hvat munnu einglar himmalsins hugsa um okkum neyðars, hálparleysu [99] menniskju, sum koma út fyri nógvum freistingum og tó biðja so lítið og hava so lítla trúgv? Guds æviga kærleikshjarta tykir synd í okkum og er til reiðar at geva meira, enn vit eru før fyri at biðja ella hugsa um. Einglarnir boyggja seg við gleði fyri Gudi, og teir frøa seg yvir at vera í nærveru hansara. Samvera við Gud er teirra størsta gleði. Men hóast jarðarinnar børn hava so stóran tørv á tí hjálp, sum bert Gud kann geva, tykjast tey vera nøgd við at liva uttan Andans ljós og uttan samveru við Gud.

Tey, sum lata vera við at biðja, koma sær sjálvum í vanda. Satans myrkur - og fíggindans loyndarfullu freistingar - tøla tey til synd. Og alt hetta kemur av, at tey ikki fáa tær signingar, sum standa teimum í boði ígjøgnum bøn. Hví skulu Guds synir og døtur vera so trek at biðja, tá ið bønin er lykil trúarinnar, sum opnar himmalsins slúsur. Har eru tær ótømandi hjálparkeldurnar hjá hinum almáttuga. Um vit ikki eru árvakin og áhaldandi í bønini, eru vit í vanda fyri at gerast líkasæl og at víkja av tí rætta vegnum. Mótstøðumaðurin roynir áhaldandi at forða okkum vegin til náðistólin, so vit ikki við trúgv og bøn skulu fáa kraft til at standa ímóti freistingum.

Ávísar fyritreytir mugu vera til staðar, áðrenn vit kunnu vænta, at Gud vil hoyra og svara okkara bønum. Fyri tað fyrsta mugu vit kenna tørv á hansara hjálp. Hann hevur lovað: *„Eg man hella út vatn yvir tað tystandi land og áarstreymar yvir turrlendið.“* Jes. 44,3. Tey, ið hungra og tysta eftir rættvísi og leingjast eftir Gudi, kunnu [100] vera fullvís í, at teirra tørvur verður mettaður. Hjartað má vera opið fyri ávirkan Andans, um ein skal kunna taka ímóti Guds signing.

Okkara stóri tørvur er í sjálvum sær ein sterk grundgeving fyri at hjálpa okkum. Men vit mega søkja Harran, og biðja hann um tað, sum okkum tørvar. Hann sigur:*„Biðið, so skal tykkum verða givið.“ Og aftur: „Hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll, hví skuldi hann ikki eisini geva okkum alt við honum?“* Matt. 7,7; Róm. 8,32.

Halda vit fast við óndar tankar og tvíhalda um tilvitaða synd, so man Harrin ikki lurta eftir okkara bønum. Men hann hoyrir altíð

bønirnar frá teimum iðrandi og eyðmjúku. Tá ið alt, sum vit vita er skeivt, er rættað, kunnu vit trúgva, at Gud svarar okkara bønum. Vit hava ikki uppiborið Guds náði við egnum verkum. Tað er bert Jesusi at takka, at vit kunnu verða frelst. Hansara blóð eina kann reinsa okkum. Men tað stendur til okkara at gera eftir treytunum fyri, at hann kann taka ímóti okkum.

Trúgv er ein annar liður í virksamari bøn: *„Tí at tann, sum kemur fram fyri Guð, eigur at trúgva, at hann er til, og at hann lønar teimum, sum leita til hansara.“ Jesus segði við lærusveinar sínar: „Alt tað, sum tit biðja um og tráa eftir, trúgvið, at tit hava fingið tað, tá skal tað verða tykkum fyri.“* Hebr. 11,6; Mark. 11,24. Taka vit hann upp á orðið?

[101] Fyrijáttanin er umfatandi og markleys, og trúfastur er hann, sum hevur givið hana. Um vit ikki fáa júst tað, sum vit biðja um í tí løtu, vit biðja, skulu vit kortini trúgva, at Harrin hoyrir okkum og vil svara okkara bønum. Vit eru so óskynsom og stuttskygd, at vit við hvørt biðja um nakað, sum ikki hevði verið til signing fyri okkum. Og í sínum kærleika svarar okkara himmalski faðir bønunum soleiðis, at hann gevur okkum tað, sum verður okkum mest at gagni. Hann gevur okkum tað, sum vit sjálv høvdu ynskt, um eygu okkara vórðu upplýst av Gudi, so at vit kundu sæð alt, sum tað í veruleikanum er. Tá ið tað sær út, sum at okkara bønir ikki verða svaraðar, skulu vit halda fast við fyrijáttanina. Tí tað er vist, at tann tíð kemur, at vit verða bønhoyrd og fáa ta signing, sum okkum tørvar mest. Men at krevja, at bøn altíð skal verða svarað júst soleiðis, sum vit ynskja í tí løtuni, er ov mikið kravt. Gud er ov vísur til at gera mistøk og ov góður til at halda nakað aftur frá teimum, sum eru trúføst. Óttast tí ikki fyri at líta á hann, sjálvt um tú í løtuni ikki sært nakað svar upp á tínar bønir. Lit á hansara álítandi fyrijáttan:*„Biðið, so skal tykkum verða givið.“*

Um vit lurta eftir okkara iva og ótta, ella um vit royna at útgreina alt, sum vit ikki skilja, áðrenn vit trúgva, so munnu vandamálini bert økjast og gerast størri og størri. Men Gud, hvørs kunnleiki er markleysur, bæði vil og kann lurta eftir okkara rópum. Hann vil lata Ijósið skína inn í okkara hjørtu, um vit kenna okkara tørv og hjálparloysi og koma til hansara í eyðmjúkari, vóngóðari trúgv. Um
[102] vit biðja til hansara av heilum huga, so koma vit í samband við hin

æviga Gud, sum veit alt og stýrir øllum lutum við sínum vilja og orði. Vit hava kanska ikki júst tá eitt serstakt prógv fyri, at Frelsarans andlit er vent ímóti okkum í kærleika og miskunn, men soleiðis er tað kortini. Vit merkja kanska ikki, at hann nertir við okkum likamliga, men hansara hond hvílir á okkum í kaerleika og eymari samkenslu.

Tá ið vit koma fram fyri Gud og biðja um náði og signing, mega vit hava ein kærleiksfullan og fyrigevandi anda í okkara hjørtum. Hvussu kunnu vit biðja: *„Fyrigev okkum skuldir okkara, so sum vit fyrigeva skuldarum okkara,"* og tó hava eitt ófyrigevandi sinni? Matt. 6,12. Um vit vænta, at okkara egnu bønir skulu verða hoyrdar, mega vit fyrigeva øðrum á sama hátt og í sama mun, sum vit vóna at fáa fyrigeving.

At vera *„áhaldandi í bønini"* er eisini ein fyritreyt fyri bønhoyring. Vit mugu altíð biðja, um vit skulu vaksa í trúgv og kunnleika. „Verið áhaldandi í bønini, við tað at tit eru árvaknir í henni við takkargerð." Pætur áminnir tey trúgvandi:*„Verið tí vaknir og ódruknir til bønir."* Róm. 12,12; Kol. 4,2; 1. Pæt. 4,7. Paulus sigur: *„Latið í øllum lutum tráan tykkara koma fram fyri Guð í ákallan og bøn við tøkk."* Og Judas: *„Tit elskaðu... biðið í heilagum anda, og haldið tykkum sjálv í Guðs kaerleika"* Fil. 4,6; Judas 20-21. Áhaldandi bøn merkir støðugt samband við Gud. Tá streymar lív frá Gudi inn í okkara lív og ger, at reinleiki og heilagleiki streyma aftur til Gud úr lívi okkara.

Tað er neyðugt at vera áhaldandi í bønini, lat einki forða tær í tí. [103]
Royn á allan hátt at varðveita sambandið millum Jesus og tína egnu sál. Nýt hvørt høvi til at samlast við øðrum til bønarhald. Tey, sum av sonnum ynskja at hava samband við Gud, vilja koma til bønarmøtir og trúføst gera sínar skyldur. Tey tráa eftir Guds signingum og søkja tey støð, har himmalsins Ijósstrálur kunnu skína á tey.

Vit mega biðja saman við familjuni, og vit mega fram um alt ikki gloyma bønina í loynikamarinum, tí tað er hon, ið heldur okkum uppi. Vit kunnu ikki vaksa andaliga, um bønin verður forsømd. Almenn bøn ella familjubøn eina er ikki nóg mikið. Vit mugu inn í einrúmið og opna okkara hjørtu fyri Guds rannsakandi eyga. Bøn í loynikamarinum eigur bert at verða hoyrd av Gudi, ið gevur bønum gætur. Einki forvitið oyra eigur at fáa kunnleika til hesar áheitanir. Bøn í einrúmi ger, at einki árin úr umhvørvinum ella annað órógvar. Róliga og inniliga søkir sinnið Gud. Eitt varandi, himmalskt árin

vil tá koma frá honum, sum sær í loyndum, og hvørs oyra er opið fyri teimum bønum, sum koma frá hjartanum. Við stillari, einfaldari trúgv hevur menniskjað samband við Gud og samlar sær strálur frá tí guddómliga Ijósinum til at styrkja og styðja seg í bardaganum móti Satan. Gud er vár sterka borg.

Bið í tínum loynikamari, og tá ið tú ert í dagliga starvinum. Hevja hjartað ofta til Guds. Soleiðis gekk Enok við Gudi. Hesar stillu bønir stíga upp eins og dýrabart roykilsi fyri hásæti náðinnar. Satan fær ikki sigrað á tí menniskja, sum í hjartanum lítur á Gud.

[104] Tað finst einki stað ella nøkur løta, hvar tað er óhóskandi at senda eina bøn upp til Guds. Einki kann forða okkum í at hevja hjartað í inniligari bøn. Í mannamúgvuni, á gøtuni og mitt í dagliga yrkinum kunnu vit eisini biðja um guddómliga vegleiðing, eins og Nehemias, tá ið hann legði eina umbøn fram fyri Artaxerxes kongi. Hvar vit enn eru stødd, kunnu vit finna eitt loynikamar til at samtala við Gud. Okkum tørvar støðugt at halda hjartadyrnar opnar - og at bjóða Jesusi inn at búgva í okkara hjarta sum himmalskur gestur.

Sjálvt um vit eru stødd í dálkaðum og skaðiligum umhvørvi, so noyðast vit ikki at anda inn hesa eitraðu luftina. Vit kunnu liva í himmalsins reinu luft við at lata allar dyr aftur fyri ringum hugmyndum og vanheilagum tonkum, og við at leita til Guds í inniligari bøn. Tey, sum hava hjørtu síni opin fyri stuðli og signing frá honum, vilja ganga í meira heilagum andaligum umhvørvi enn í tí jarðiska. Hesi vilja hava støðugt samband við himmalin.

Okkum tørvar at síggja Jesus týðuligari fyri okkum, og at skilja betur, hvussu stórt virði teir ævigu veruleikarnir hava. Vakurleikin í heilagleika eigur at fylla hjørtuni hjá Guds børnum. Fyri at so má verða, mega vit biðja Gud um at opinbera teir himmalsku lutirnar fyri okkum.

Lat sinnið upp og vend tær ímóti tí høga, so at Gud fær latið teg anda av tí himmalsku luftini. Tað er gjørligt hjá okkum at halda
[105] okkum so naer Gudi, at tá royndir koma óvæntað á okkum, vilja okkara tankar venda saer til hansara líka so natúrligt, sum blóman vendir saer ímóti sólini.

Legg tín tørv, tína gleði og sorg, tína stúran og ótta fram fyri Gud. Tú kanst hvørki ómaka ella troytta hann. Hann, sum telur hárini á høvdi tínum, er ikki líkasælur um tørvin hjá sínum børnum. *„Harrin er sára miskunnsamur og mildur.“* Ják. 5,11. Okkara sorgir,

ja, bert at vit nevna tær, rørir hansara kærleiksfulla hjarta. Far til hansara við øllum, sum tyngir títt sinni. Einki er ov tungt at bera hjá honum, sum heldur jørðini uppi og ræður yvir øllum málum í alheiminum. Einki, sum á nakran hátt viðkemur friði okkara, er ov smátt hjá honum at legga merki til. Eingin partur í okkara lívssøgu er so myrkur, at Gud ikki er mentur at bera hetta. Eingin trupulleiki er honum ov tungur at loysa. Eingin óeydna rakar hin minsta av hansara børnum, eingin ótti kann plága sálina, eingin gleði uppliva hana, eingin sonn bøn koma frá varrunum, uttan at okkara himmalski faðir leggur tað til merkis og beinanvegin hevur áhuga fyri tí. *„Hann lekir tey, ið hava eitt sundurbrotið hjarta, og bindur um teirra sár.“* Sálm. 147,3.Viðurskiftið milium Gud og hvørt einstakt menniskja er so sermerkt og fullkomið, sum um Gud ikki hevði nakran annan at vakja yvir - sum um einki annað menniskja var, ið Gud gav sín elskaða son fyri.

Jesus segði: *„Tann dagin skulu tit biðja í navni mínum, og eg sigi tykkum ikki, at eg skal biðja faðirin fyri tykkum; tí at faðirin sjálvur elskar tykkum.“ „Eg havi útvalt tykkum ... til tess at faðirin skal geva tykkum, hvat tit so biðja hann um í navni mínum.“* Jóh. [106]
16,26-27; 15,16. Men at biðja í Jesu navni merkir meira enn bert at nevna hetta navn, tá ið vit byrja og enda eina bøn. Tað merkir at biðja við Jesu anda og sinnalagi, og at vit trúgva á fyrijáttanir hansara og geva okkum yvirtil hansara náði og gera hansara gerningar.

Tað er ikki Guds ætlan, at nakar av okkum skal verða einabúgvi ella munkur/nunna og búgva fyri okkum sjálv fyri at kunna tæna Gudi. Lívið má vera sum lív Kristusar, við bøn í loynikamarinum og við at starva ímillum menniskju. Tann, ið ikki ger annað enn at biðja, heldur annaðhvørt skjótt uppat við at biðja ella biður bert av vana. Bønin missir sítt innihald fyri tí menniskja, ið sleppur sær undan at vera saman við medmenniskjum og roynir at sleppa sær undan sínum kristiligu skyldum og byrðum.Tey, sum halda uppat at arbeiða við áhuga fyri Meistaran, sum arbeiddi so dúgliga fyri tey, hava lítið at biðja um og einki, ið vil skunda undir at hava andagt. Bønirnar verða sjálvgóðar og mest um tey sjálv. Hesi kunnu ikki biðja fyri tørvinum hjá øðrum menniskjum ella biðja um, at Guds ríki má fáa framgongd - og um kraft at útinna verkið.

Vit missa nógv, tá ið vit ikki koma saman fyri at styrkja og stuðla hvør øðrum í Harrans tænastu. Hansara sannleiksorð verða

ikki so livandi og týdningarmikil fyri okkum. Hjørtu okkara verða ikki upplýst og lívgað við teirra heilaggerandi ávirkan, og okkara andaliga lív viknar. Vit missa nógv í okkara samskifti sum kristin, tá
[107] ið samkenslan fyri hvør øðrum vantar. Tann, sum goymir seg í sær sjálvum, útinnir ikki til fulnar tað starv, sum Gud ætlaði honum ella henni. Tá vit menna gleðina við at vera saman við øðrum, fáa vit samstundis meira áhuga og samkenslu við okkara medmenniskjum. Hetta vil menna og styrkja okkum í Harrans tænastu.

Um kristin gjørdu meira av at koma saman og tosa um Guds kærleika og ta dýrabaru endurloysnina, so høvdu teirra hjørtu notið gott av hesum, og tey kundu styrkt hvør annan. Vit kunnu dagliga læra meira um okkara himmalska faðir og uppliva hansara náði. Tá vilja vit fegin tala um hansara kærleika, og hetta lívar upp og ger okkum heit um hjartað. Um vit hugsaðu og tosaðu meira um Jesus og minni um okkum sjálv, høvdu vit í størri mun merkt hansara nærveru.

Um vit bert hugsaðu um Gud eins ofta, sum vit hava prógv fyri hansara umsorgan fyri okkum, so høvdu vit altíð hugsað um hann, glett okkum til at tosa um hann og prisa honum. Vit tosa um jarðiskar lutir, tí vit hava áhuga fyri teimum. Vit tosa um okkara vinir, tí at vit elska teir, og teir taka lut í okkara gleði og sorgum. Men vit hava óendaliga størri orsøk til at elska Gud, enn vit hava at elska okkara vinir her á jørðini. Og tað átti at verið sjálvsagt at latið Gud vera fremst í øllum okkara tonkum, at tala um hansara góðsku og siga frá hansara mátti. Ætlanin við teimum dýrabaru gávum, sum hann
[108] hevur givið okkum, var ikki, at okkara tankar og kærleiki skuldu snúgva seg um tær í tann mun, at vit ikki kundu hava nakað at geva Gudi aftur. Tær eiga altíð at minna okkum um hann og knýta okkum til okkara himmalska vælgerðarmann við bondum av kærleika og takksemi. Vit eru ov jarðarbundin. Hevjið heldur upp eyguni og lítið inn um opnu dyrnar í halgidóminum á hæddini, har sum Ijómin av Guds dýrd skínur á ásjón Kristusar. Hann *„kann fullkomiliga frelsa tey, sum við honum koma til Guðs."* Hebr. 7,25.

Okkum tørvar at lova og prísa Gudi meira *„fyri miskunn hans og undurverk hans móti menniskjunnar børnum."* Sálm. 107,8. Okkara bønarhald eigur ikki bert at snúgva seg um at biðja og taka ímóti. Lat okkum ikki altíð hugsa um okkara tørv, men eisini minnast til tær signingar, ið vit taka ímóti. Vit biðja ikki ov nógv, men vit eru ov

sparin við takkarorðum. Vit eru altíð undir Guds náði og umsorgan, og tó gera vit so lítið burtur úr at visa okkara takksemi og prisa honum fyri tað, sum hann hevur gjørt fyri okkum.

Tá ið ísraelsfólk í gomlum døgum samlaðust til gudstænastu, segði Harrin: *„Har skulu tit halda offurmáltíð frammi fyri ásjón Harrans, Guðs tykkara, og saman við húskjum tykk-ara fegnast yvir alt, sum tit hava vunnið við virki tykkara, og sum Harrin, Guð tín, hevur vælsignað teg við.“* 5. Mós. 12,7. Tað, sum vit gera Gudi til heiðurs, áttu vit at gjørt við gleði, lovsongi og við takkargerðum, og als ikki við nakrari sorg og sút.

Gud okkara er ein mildur og miskunnsamur faðir. At tæna honum [109]
eigur ikki at roknast sum ein døpur og tung byrða. At tilbiðja Harran og taka lut í hansara arbeiði eigur at verða gjørt av góðum huga. Gud ynskir ikki, at hansara børn, sum hann hevur givið so stóra frelsu, skulu fara fram, sum um hann var ein strangur og kravmikil umsjónarmaður. Hann er teirra besti vinur, og tá ið tey tilbiðja hann, vil hann vera við teimum fyri at signa og troysta tey. Hann vil fylla teirra hjørtu við gleði og kærleika. Harrin ynskir, at hansara børn skulu arbeiða av góðum huga í tænastu hansara og gleðast um hetta, meira enn at kenna tað sum eina byrðu. Hann ynskir, at tey sum koma fyri at tilbiðja hann, skulu fáa við sær dýrabarar tankar um hansara umsorgan og kærleika. Soleiðis kunnu tey hvønn dag finna ugga í hesum og gerast hugagóð í øllum, sum tey takast við. Tey fáa náði frá honum, so tey kunnu bera seg rætt at í øllum lutum.

Vit mega samlast um krossin. Kristus og hann krossfestur eigur at vera tað evni, sum okkara hugleiðingar og samrøður snúgva seg um. Hetta er okkara størsta gleði. Vit eiga at goyma hvørja einastu signing, sum vit fáa frá Gudi, í huganum. Og tá ið vit hugsa um hansara stóra kærleika, eiga vit at vera fús til at leggja alt í tær hendur, sum vórðu negldar á krossin okkara vegna.

Vit kunnu lyftast upp móti himni á lovprísunnar veingjum. Í Himlinum verður Gud tilbiðin við sangi og tónleiki, og tá ið vit av
hjarta visa honum takksemi, sameina vit okkum við teir himmalsku [110]
herskararnar í teirra gudsdýrkan. *„Tann, ið takklæti ofrar, veitir mær æru,“* sigur Harrin. Latum okkum koma fram fyri okkara skapara við hávirðing og gleði. Har skal hoyrast *„takkargerð og lovsongur.“* Sálm. 50,23; Jes. 51,3.

[111]

## 12. Ivasemi

Serliga milium tey, sum nýliga eru komin til trúgv á Kristus, eru tað mong, ið ivast um ymist og hava ampa av tí. Í Bibliuni er mangt, sum tey ikki kunnu greina ella skilja, og Satan roynir at fáa tey at ivast í trúgv teirra á Skriftina sum eina opinbering frá Gudi. Tey spyrja: „Hvussu kann eg kenna rætta vegin? Um Bíblian veruliga er Guds orð, hvussu kann eg tá sleppa frá hesum iva og tí, sum er ógreitt?“

Gud krevur ongantíð, at vit skulu trúgva, uttan at geva okkum nóg góð prógv, sum vit kunnu byggja trúnna á. Hansara tilvera, lyndiseyðkenni og sannleikin í hansara orði eru staðfest við vitnisburðum, sum tala til okkara vit; og tað er ein ørgrynna av slíkum vitnisburðum. Men Gud hevur ongantíð tikið burtur møguleikan fyri
[112] iva. Okkara trúgv má hvíla á vitnisburðum, ikki á nøkrum sum sæst. Tey, ið vilja ivast, hava høvi til tess, meðan tey, sum av álvara ynskja at kenna sannleikan, vilja finna nóg nógvar vitnisburðir til at byggja trúgv sína á.

Tað er ógjørligt fyri deyðilig menniskju til fulnar at fata lyndið og gerðirnar hjá hinum æviga Gudi. Hjá tí gløggasta manni og hinum mest hámentaða verður henda heilaga vera altíð sveipað í loyndardóm. *„Hevur tú funnið til botns í Guði ella ert komin til ytstu mark hins alvalda? Hægri er hann enn himinin - hvat kanst tú? Djúpari enn helheimurin - hvat veitst tú?* “ Job 11,7-8.

Ápostulin Paulus sigur: *„O, slíkt dýpi av ríkdómi og vísdómi og kunnskapi hjá Guði! Hvør órannsakandi eru dómar hans-ara og ósporandi vegir hansara!“* Men hóast *„í skýggjum og myrkri hann huldur er,“* so eru *„rættur og rættvísi... hans hásætisstuðlar.“* Róm. 11,33; Sálm. 97,2. Vit kunnu skilja nóg mikið av forsjón hansara viðvíkjandi okkum og orsøkunum til alt, ið hann ger, so at vit siggja óendaligan kærleika, náði og mátt. Vit kunnu skilja so mikið av hansara ætlanum, sum vit hava gagn av at skilja. Og tað, sum er meira enn hetta, mega vit lita honum upp í hendi, sum er almáttugur, og hvørs hjarta er ovurríkt av kærleika.

Eins og hjá guddómliga høvundanum, so eru eisini nakrir loyndardómar at finna í Guds orði, sum deyðilig menniskju aldri kunnu fata til fulnar. At syndin kom í heimin, at Kristus gjørdist menniskja í holdi, uppreisnin, endurføðingin og mong onnur evni í Bíbliuni [113] eru loyndardómar, sum eru ov djúpir fyri mannavitið at útgreina ella at skilja til fulnar. Men vit hava onga orsøktil at ivast um Guds orð, hóast vit ikki kunnu fata allar loyndardómar í hansara forsjón. Í náttúruni eru vit altíð umgird av loyndarmálum, sum vit ikki eru før fyri at avdúka. Hin einfaldasta vera kann vekja spurningar, sum tann klókasti heimspekingurin ikki er førur fyri at finna svarini til. Allastaðni finnast undur, sum ganga fram um okkara vit. Áttu vit tá at undrast yvir, at tað eisini í andaliga heiminum eru loyndarmál, sum vit ikki kunnu skilja til fulnar? Orsøkin til trupulleikan er snøgt sagt tann, at mannavitið er avmarkað. Gud hevur í Skriftini givið okkum nógvar vitnisburðir um, at hansara orð hevur guddómligan uppruna. Og vit eiga tí ikki at ivast um orð hans-ara, hóast vit ikki skilja øll loyndarmál í hansara forsjón.

Pætur ápostul sigur, at í Skriftini er *„sumt torskilið, sum ókønir og støðuleysir brongla... sær sjálvum til undirgangs.“* 2. Pæt. 3,16. Tað, sum er torskilt í Skriftini, hava vantrúgvandi menniskju hildið vera prógv, sum eru ímóti Bibliuni. Men tað er so langt í frá tí.Tað eru tvørturímóti kraftmiklir vitnisburðir um hennara guddómliga uppruna. Um hon ikki hevði nakrar aðrar frásagnir um Gud enn slíkar, sum vit laettliga kunnu fata, og um hansara stórleiki og hátign kundu fatast av deyðiligum menniskjum, so innihelt Bíblian ikki ósvitaligar vitnisburðir um sín guddómliga uppruna. Júst tað stórsligna og tað loyndarfulla við teimum evnum, ið hon umtalar, átti at kunnað vakt trúgv á Skriftina sum Guds orð.

Bíblian opinberar sannleikan á so einfaldan hátt og lagar hann [114] so fullkomið eftir tí tørvi og longsli, sum mannahjartað hevur, at tað hevur vakt undran og hevur hugtikið tey mest lærdu menniskju. Samstundis verða tey lítisvirdu og ólærdu eisini før fyri at finna frelsuvegin. Og tó fevna hesir einfalt frambornu sannleikar um evnir, ið røkka so vítt og eru so hátt hevjaðir upp um mannavitið, at vit einans kunnu taka ímóti teimum, av tí at Gud hevur opinberað teir.

Frelsan er løgd soleiðis til rættis fyri okkum, at ein og hvør kann siggja tey stig, hann má taka fyri at venda um til Gud og trúgva á Harra okkara, Jesus Kristus, og verða frelstur á tann hátt, sum

Gud hevur víst okkum á. Men aftanfyri hesar sannleikar, sum so laett kunnu skiljast, eru loyndarmál, ið eins og klæði liggja útyvir dýrd Guds. Mannavitið er ikki ført fyri at skilja hesar loynidómar, men teir fylla tó hvørt menniskja við trúgv og hávirðing, sum av sonnum leitar eftir sannleikanum. Jú meira tú granskar í Bibliuni, tess meira sannførdur verður tú um, at hon er orðið hjá tí livandi Gudi. Menniskjans skil og vit má boyggja seg fyri hátignini í hesi guddómligu opinbering.

At viðurkenna at vit ikki til fulnar kunnu skilja teir stóru sannleikarnar í Bíbliuni, er bert at góðtaka, at tað avmarkaða mannavitið ikki megnar at skilja tað óavmarkaða og guddómliga - at menniskjað við sínum avmarkaða kunnleika ikki kann fata allar ætlanirnar hjá Gudi, hinum alvalda.

[115] Gudloysingar og tey ivingarsomu havna Guds orð av tí, at tey ikki skilja allar loynidómar tess. Og ikki øll, sum siga seg trúgva Bibliuni, eru uttanfyri vanda hesum viðvíkjandi. Ápostulin sigur: *„Gevið gætur eftir, brøður, at tað ikki í nøkrum tykkara skal vera eitt vánt vantrúarhjarta, so at hann fellur frá livandi Guði.“* Hebr. 3,12.Tað er rætt at granska læru Bíbliunnar til lítar, og eisini at kanna *„dýpdir Guðs“*, 1. Kor. 2,10, so vítt sum tær eru opinberaðar í Skriftini. Tí at *„hinir fjaldu lutirnir eru Harrans, Guðs várs, men tað opinberaða er fyri okkum og børn okkara ævinliga.“* 5. Mós. 29,29. Men tað er Satans verk at avlaga tey evnir, sum menniskjað hevur til at granska. Ein ávísur stoltleiki kann koma fram, tá fólk granska sannleikarnar í Bibliuni, men ikki skilja alt. Summi verða ótolin og í døpurhuga, um tey ikki kunnu greiða frá øllum í Skriftini á fullnøktandi hátt. Tey halda tað vera eyðmýkjandi at mega viðganga, at tey ikki skilja tey orð, sum eru innblást av Guds Anda. Tey hava ikki tol at bíða, til Gud sær, at tíðin er komin at opinbera teimum sannleikan. Tey halda, at mannavísdómur í sjálvum sær er nóg mikið til at fata Skriftina. Hetta kemur at miseydnast hjá teimum, og tey seta í roynd og veru myndugleikan hjá Skriftini til viks.

Tað er rætt, at mangar hugsanir og lærur, sum vanliga verða hildnar at stava frá Bibliuni, ongan stuðul hava í Heilagu Skriftini, og í veruleikanum eru ímóti Guds orði. Tílík mál hava skapað iva og ørkymlan fyri mong. Men orð Guds hevur onga skuld í hesum. Trupulleikin kemur, tí menniskju avskepla og reingja tað.

[116] Um tað var møguligt fyri skapaðar verur at skilja alt um Gud og

verk hansara, so høvdu eingir sannleikar verið afturat at finna hjá teimum, tá tey komu til hetta støði. Eingin framgongd í kunnleika ella víðari menning hevði verið av anda og hjarta. Gud hevði ikki longur verið tann hægsti, og menniskjað var komið til ytsta markið í kunnleika og menning, og kundi tí ikki fingið nakra framgongd afturat. Latum okkum takka Gudi fyri, at hetta ikki er soleiðis. Gud er óendaligur. Í honum eru „allir dýrgripir vísdómsins og kunnleikans" fjaldir. Kol. 2,3. Menniskjuni kunnu rannsaka og læra til ævigar tíðir, uttan nakrantíð at koma á botn í hansara vísdómi, góðsku og mátti.

Tað er Guds ætlan, at fólk hansara skal fáa meira og meira av sannleikanum at síggja, eisini í hesum lívinum. Hesin kunnleiki kann bert fáast á ein hátt. Vit kunnu einans fáa tað rætta innlitið í Guds orð, um andin, sum gav orðið, varpar Ijós á tað. Eingin veit, *„hvat, ið býr í Guði, uttan Guðs andi," „tí at andin rannsakar alt, eisini dýpdir Guds". Frelsarin lovaði lærusveinunum, at „tá ið hann kemur, sannleikans andi, tá skal hann vegleiða tykkum til allan sannleikan, ... tí at hann skal taka av mínum og kunngera tykkum."* 1. Kor. 2,11.10; Jóh. 16,13-14.

Gud vil, at menniskjuni skulu brúka sítt vit á besta hátt, og at granska Bíbliuna styrkir og góðskar sinnið meira enn nøkur onnur lestrargrein. Mannavitið er tó avmarkað av menniskjaligum veikleika og ófullkomileika, og tí mugu vit vara okkum fyri at seta tað ov høgt. Um vit ikki ynskja, at Skriftin skal vera kám fyri okkum, so vit [117]
ikki skilja teir týðiligastu sannleikarnar í henni, mega vit eiga ta einføldu trúnna eins og hjá lítlum barni. Vit mega hava vilja til at læra og biðja um hjálp frá Heilaga Andanum. Kenslan av Guds vísdómi og mátti, og okkara manglandi evnir til at fata hansara stórleikar, eigur at fylla okkum við eyðmjúkleika. Vit áttu at latið upp fyri hansara orði við djúpari virðing, sum um vit fóru til fundar við hann andlit til andlits. Tá ið vit lesa í Bíbliuni, má okkara vit viðurkenna henda hægra myndugleikan. Bæði hjarta og vit má boyggja seg fyri hinum mikla »EG ERI".

Gud vil gera mangt, sum sær út til at vera kámt og torført at fata, einfalt og greitt fyri tey, sum royna at skilja tað. Uttan vegleiðing frá Heilaga Andanum eru vit tó støðugt í vanda fyri at týða Skriftirnar skeivt og at reingja tær. Mong lesa í Bíbliuni uttan at fáa nakra nyttu av henni, og í nógvum førum kann ein slíkur lestur vera skaðiligur.

Tá ið latið verður upp fyri Guds orði uttan virðing og bøn, og hjartað og tankarnir ikki festa seg við Gud ella samsvara við vilja hansara, so fyllist sinnið av iva, og vantrúgvin kann styrkjast av sjálvum bíbliulestrinum. Fíggindin fær harradømið yvir tonkunum og smoyggir tulkingar inn, sum ikki eru rættar. Tá ið menniskju ikki í orðum og gerðum royna at vera í samljóð við Gud, eru tey í vanda fyri at villast í teirra uppfatan av Skriftini, so lærd sum tey enn kunnu vera. Og tað er tí vandamikið einans at líta á teirra frágreiðingar. Tey, sum lesa Skriftina fyri at finna mótsagnir, hava ikki nakran
[118] andaligan kunnleika. Við eini slíkari tilgongd er tað ikki so løgið, at tey síggja nógvar grundir til ivasemi og vantrúgv í ymsum lutum, sum í veruleikanum eru bæði greiðir og týðuligir.

Hvussu nógv enn verður roynt at fjala tað, so er veruliga orsøkin til iva og vantrúgv sum oftast kærleiki til synd. Lærur og forboð í Guds orði verða ikki told av tí stolta, syndafulla hjartanum. Og tey, sum ikki eru fús til at lýða krøvini í Guðs orði, vilja vera ivingarsom um trúvirði tess. Fyri at finna sannleikan mega vit hava eina einfalda tráan eftir at kenna hann og vera fús til av hjarta at vera honum lýðin. Og øll tey, sum lesa Bíbliuna við hesum í huga, munnu finna mangar vitnisburðir um, at hon er Guds orð. Og har kunnu tey ogna sær kunnleika um sannleikar, sum vilja gera tey vís til frelsu.

Kristus hevur sagt: *„Vil nakar gera vilja hansara, skal hann koma til royndar um læruna, annaðhvørt hon er frá Guði, ella um eg tali av mær sjálvum.“* Jóh. 7,17. Í staðin fyri at koma við atfinningum og finna skeivleikar í tí, sum tú kortini ikki skilir, eigur tú at geva tí ljósi ans, sum longu skínur á leið tína. Tú vilt tá fáa meira ljós. Útinn av Kristi náði tær skyldur, ið tú hevur fingið greiðu á, so vilt tú seinni kunna fata og gera tær skyldur, sum tú nú ert í iva um.

Eitt prógv er, sum er opinberað fyrir øllum - tí lærdasta eins væl og fyri teimum ólærdu. Tað eru tær royndir, fólk hava. Gud bjóðar
[119] okkum sjálvum at royna veruleikan í hansara orði og sannleikan í hansara lyftum. Hann bjóðar okkum at smakka og síggja, *„at góður er Harrin.“* Sálm. 34,9. Í staðin fyri at líta á orðini hjá øðrum, eiga vit at smakka sjálv. Hann sigur: *„Biðið, og tit skulu fáa.“* Jóh. 16,24. Fyrijáttanir hansara verða uppfyltar. Tær hava aldri svitast, og tær kunnu aldri svitast. Tá ið vit koma til Jesus og fegnast í hansara

stóra kærleika, so vilja ivamál og tað myrkur, ið hongur yvir okk-um, hvørva fyri ljósinum í nærveru hansara.

Ápostulin Paulus sigur, at Gud *„bjargaði okkum út úr valdi myrkursins, og flutti okkum inn í ríki elskaða sonar síns.“* Kol. 1,13. Ein og hvør, sum er fluttur yvir frá deyða til lív, kann vitna *„at Guð er sannorðaður.“* Jóh. 3,33. Og hann kann vitna: „Mær tørvaði hjálp, og Jesus veitti mær hana. Hann gav mær tað, mær tørvaði, og mettaði sálarhungur mín. Nú er Bíblian Jesu Kristi opinbering fyri mær. Spyrt tú meg, hví eg trúgvi á Jesus? So svari eg: Tí at hann er mín guddómligi frelsari. Spyrt tú, hví eg trúgvi á Bíbliuna? So svari eg: Tí eg havi sæð, at hon er tala Guds til mín.“ Vit kunnu bera vitnisburðin innan í okkum sjálvum um, at Bíblian er sonn, og at Kristus er sonur Guds. Vit vita, at vit ikki fylgja snilt upphugsaðum ævintýrum.

Pætur minnir brøður sínar á at vaksa *„í náði og kunnskapi várs harra og frelsara.“* 2. Pæt. 3,18. Tá ið Guds fólk veksur í náðini, vilja tey støðugt skilja hansara orð betur. Tey síggja nýtt ljós og nýggjan vakurleika í teimum heilagu sannleikunum. Soleiðis hevur tað verið í søgu kirkjunnar gjøgnum allar tíðir, og soleiðis fer tað [120]
at halda áfram heilt til endans. *„Leið teirra rættvísu er eins og morgunglæman, ið ljósnar og ljósnar, til tað er alljósur dagur.“* Orðt. 4,18.

Við trúgv kunnu vit líta frameftir til hin komandi heimin og ogna okkum Guds lyftir um at vaksa í kunnskapi. Vit vaksa við tað, at evnir menniskjans sameinast við tað guddómliga, og hvør førleiki, sum sinnið hevur, kemur beinleiðis í samband við keldu ljósins. Vit kunnu gleða okkum um, at alt sum hevur verið kámt fyri okkum í forsjón Guds, tá vil gerast klárt. Tað, sum er torført at fata nú, verður tá útgreinað. Og har, sum okkara avmarkaða vit bert kundi síggja fløkjur og miseydnaðar ætlanir, fara vit at síggja hitt fagrasta og mest fullkomna samljóð. *„Tí at nú síggja vit í spegili, í gátu; men tá skulu vit síggja andlit til andlits; nú kenni eg í pørtum, men tá skal eg kenna til fulnar, eins og eg eri sjálvur til fulnar kendur.“* 1. Kor. 13,12.

[121] 

# 13. Gleði í Harranum

Guds børn eru kallað at vera Kristi sendiboð og til at vitna um Harrans góðsku og náði. Eins og Jesus hevur opinberað faðirin og hansara sanna lyndi fyri okkum, so skulu vit eisini opinbera Kristus fyri einum heimi, ið ikki kennir hansara eyma, miskunnsama kærleika. Jesus segði: *„Eins og tú hevur sent meg í heimin, soleiðis havi eg eisini sent teir í heimin.“ „Eg í teimum og tú í mær... til tess at heimurin má sanna, at tú hevur sent meg.“* Jóh. 17,18.23.

Paulus sigur soleiðis við tey, sum fylgja Jesusi: *„Tit eru bræv Krists,“ „kent og lisið av øllum menniskjum.“* 2. Kor. 3,3.2. Hvørt barn hjá Jesusi er eitt bræv, sum hann sendir út í heimin. Ert tú Guds barn, ert tú eisini hansara bræv til ta familju, tann bý og ta gøtu, har tú býrt. Jesus, sum býr í tær, tráar eftir at tala til teirra hjørtu, ið
[122] ikki kenna hann. Kanska lesa tey ikki í Bíbliuni ella hoyra ta rødd, sum talar til teirra gjøgnum hana. Tey síggja ikki Guds kærleika í gerðum hansara. Men um tú ert ein sannur tænari hjá Jesusi, kunnu tey kanska ígjøgnum teg verða leidd til at skilja hansara kærleika og læra at elska og tæna honum.

Tey kristnu eru sett til at vera ljósberarar á vegnum til himmalin. Tey skulu lata tað ljós, sum skínur á tey frá Kristusi, kasta sítt endurskin út yvir heimin. Lív og lyndi teirra má vera so, at onnur gjøgnum tey fáa eina rætta fatan av Kristusi og hansara tænastu.

Og eru vit Kristi sonnu lærusveinar, tá vilja vit gera tænastuna so gleðiliga og dragandi, sum hon í veruleikanum er. Kristin, sum ganga syrgin og døpur í huga, knarra og klaga, geva eina falska mynd av Gudi og av einum kristnum lívi. Tey geva øðrum ta fatan, at Gudi ikki dámar, at børn hans-ara skulu vera glað og lukkulig, og tí bera tey ein falskan vitnisburð um okkara himmalska faðir.

Satan frøir seg, tá hann fær Guds børn til at vísa vantrúgv og verða mótfallin. Hann gleðir seg yvir at síggja, at vit hava misálit á Gudi og ivast um hansara vilja og kraft til at frelsa okkum. Hann ynskir, at vit skulu trúgva, at Harrin skaðar okkum við síni forsjón og ikki er náðiríkur og miskunnsamur. Satan reingir sannleikan

og fyllir tankarnar við skeivum hugmyndum um Gud. Og heldur enn at dvølja við sannleikan um okkara himmalska faðir, so festa vit alt ov ofta tankarnar við følsku frágreiðing Satans og vanæra Gud við misáliti og klagum. Satan roynir altíð at gera tað kristiliga [123]
lívið so dapurt sum gjørligt. Hann vil fegin, at tað skal síggja út til at vera bæði strævið og torført. Men tá hin kristni í lívi sínum setur kristindómin í slíkt ljós, styðjar hann lygnum Satans við sínum fyridømi og vantrúgv.

Á lívsleiðini lata alt ov mong hug sín dvølja við mistøk, miseydnaðar royndir og vónbrot, og hesi fyllast tí við sorg og mótloysi. Meðan eg var í Evropa, fekk eg (E.G.W) eitt bræv frá eini trúarsystur, sum hevði gjørt hetta og var sera stúrin. Hon bað meg um nøkur troystandi orð. Náttina eftir at eg hevði lisið brævið frá henni, droymdi eg, at eg gekk í einum urtagarði. Ein, sum helst átti urtagarðin, fylgdist við mær. Eg hentaði blómur og gleddi meg um angan av teimum. Tá gjørdi hendan systirin, sum hevði gingið undir liðini á mær, meg varuga við nakrar ljótar tornir, sum stóðu í vegin fyri henni. Har stóð hon so kedd og sorgarbundin. Hon fór ikki eftir tí vegi, har leiðvísarin gekk, men fór ímillum tornirnar og tistlarnar. „Eg meini tað“, suffaði hon, „er tað ikki syrgiligt, at hesin vakri urtagarður er spiltur av tornum?“ Tá segði leiðvísari okkara: „Lat tornirnar vera, tær bert sára teg. Henta tú heldur rósurnar, liljurnar og nelikarnar.“

Hava ikki bjartar stundir verið í tínum lívi? Hevur tú ikki havt ljósar løtur, tá ið hjartað sló av gleði um verk Andans í tær? Sært tú ikki okkurt upplívgandi í tínum lívsroyndum, tá ið tú hyggur aftur um bak? Eru Guds lyftir ikki eins og tær væl angandi blómurnar, sum vaksa allastaðni fram við vegi tínum? Vilt tú ikki lata teirra [124]
vakurleika og anga fylla títt hjartað við gleði?

Tornirnar og tistlarnir vilja bert sára teg og gera teg tungan í huga. Um tú bert hentar hesar og vísir øðrum á tær, vanvirðir tú tá ikki Guds góðsku og forðar øðrum í at ganga Guds leiðir?

Tað er ikki skynsamt at fylla sinnið við keðiligum minnum úr farnari tíð - um gamlar syndir og vónbrot - og tosa um og harmast um hetta, til vit eru niðurundirkomin av mótloysi. Ein mótleys sál blindast og verður døpur í huga. Hon forðar fyri, at ljós frá Gudi kann koma inn til hana sjálva, og kastar eisini skuggar á vegin hjá øðrum.

Takka Gudi fyri tær bjørtu myndirnar, sum hann hevur víst okkum. Latið okkum samla saman lyftini um hansara kærleika, so vit altíð kunnu skoða tey. Guds sonur fór frá hásæti Guds og klæddi sín guddómleika í mynd menniskjans, fyri at hann kundi bjarga menniskjunum undan valdi Satans. Hansara sigur opnaði himmalin fyri okkum og opinberaði Guds dýrd. Hin falna mannaættin varð hevjað upp úr tí týningardýpi, sum syndin hevði kastað hana í, og hon kom aftur í samband við hin æviga livandi Gud. Menniskju verða kløðd í Kristi rættvísi og hevjað til hásæti hansara, tá ið tey hava hildið út í royndum í trúnni á okkara endurloysara. Hesar eru tær myndir, sum Gud ynskir, at vit skulu dvølja við.

[125] Tá ið tað sær út, sum um vit ivast um Guds kærleika og vísa misálit á lyftini, tá vanæra vit hann, og Heilagi Andin gerst sorgarbundin. Hvussu hevði ein mamma verið til passar, um børn hennara alla tíðina knarraðu um hana, sum um hon ikki vildi teimum tað besta, hóast alt hennara strev bert var fyri at fremja teirra vælferð og gera teimum lívið hugnaligt? Hugsa sær, um tey ivaðust um hennara kærleika. Tað hevði knúst hennara hjarta. Hvør sorg hevði tað ikki eisini verið hjá einum pápa at verið soleiðis viðfarin av børnum sínum? Og hvat man okkara himmalski faðir hugsa um okkum, tá ið vit ivast um kærleika hansara, sum gjørdi, at hann gav sín einborna son, fyri at vit kunnu liva. Ápostulin skrivar: *„Hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll, hví skuldi hann ikki eisini geva okkum alt við honum?“* Róm. 8,32. Men hvussu mong eru tað tó, sum við gerðum sínum, um ikki í orðum, siga: „Harrin sigur hetta ikki við meg. Kanska elskar hann onnur, men hann elskar ikki meg.“

Við øllum hesum skaðar tú teg sjálvan, tí fyri hvørt ivandi orð tú sigur, gevur tú Satan møguleika at freista teg. Tað vil økja um lyndið til at ivast, og tænandi einglarnir mugu við sorg halda seg burtur. Nevn ikki eitt orð um iva og myrkur, tá ið Satan freistar teg. Um tú letur tað, sum hann kemur við, sleppa framat í tínum hjarta, tá fyllist títt sinni við misáliti og iva. Letur tú kenslur tínar koma fram í orðum, so vil hvør ivi, tú letur koma fram, ikki bert ávirka teg sjálvan, men verður sum eitt sáðkorn, ið spírar og ber frukt í
[126] lívinum hjá øðrum. Tað kann verða ógjørligt at mótvirka ávirkanini av orðum tínum. Kanska tú sjálvur kanst bjarga tær úr freisting og Satans snaru. Men onnur kunnu kanska ikki ríva seg leysan úr teirri

vantrúgv, sum tú hevur nevnt. Tað er tí sera týdningarmikið, at vit bert tala um slíkt, sum gevur andaliga styrki og lív.

Einglarnir lurta eftir tí vitnisburði, sum tú gevur heiminum um tín himmalska Meistara. Tala um hann, sum livir fyri at ganga í forbøn fyri tær hjá faðir sínum. Tá ið tú tekur í hondina á einum vini, lat tá lovorð til Gud bæði vera tær á munni og í tínum hjarta. Hetta vil minna hann á Jesus.

Øll fáa royndir, sorgir, sum eru tungar at bera og freistingar, ið eru ringar at standa ímóti. Sig ikki øðrum frá tínum tvørleikum, men ber alt til Gud í bøn. Ger tað til ein fastan vana, at tú aldrin sáar iva og mótloysi. Við vónarríkum orðum og stuðuli kanst tú gera nógv fyri at styrkja onnur í teirra stríði.

Nógv kunnu vera so trongd upp í ein krók av freistingum, at tey eru um at geva eftir í stríðnum ímóti holdinum og tí ónda. Tak ikki mótið fra nøkrum, sum stríðist á henda hátt. Set mót í viðkomandi, og gev honum ella henni vón, trúgv og stuðul fram á leiðini. Soleiðis kann ljós Kristusar skína ígjøgnum teg. *„Eingin av okkum livir sær sjálvum.“* Róm. 14,7. Uttan at vita tað kann okkara ávirkan annaðhvørt geva øðrum dirvi og styrki, ella tey kunnu gerast mótleys og halda seg frá Kristusi og sannleikanum.

Mong hava eina skeiva fatan av Jesu lívi og hansara lyndi. Tey [127]
meina, at hann var svinnur, strangur og dapur í huga, og at hansara lyndi var uttan gleði og hita. Í mongum førum fær tað kristna lívið dám av hesum dapurskygni.

Tað verður ofta sagt, at Jesus græt, men at eingin sá hann smíla. Satt er tað, at Frelsarin hevði sorg og var kunnugur við pínu av tí, at hann lat upp sítt hjarta fyri allari menniskjansligari armóð. Men hóast hann livdi eitt sjálvsavnoktandi lív, sum pína og sorg skuggaði fyri, so var hann ikki dapur í huga. Andlit hansara hevði ikki dám av sorg og gremjan, men vitnaði altíð um friðsælu og ró. Hjarta hansara var sum eitt lívsins kelduvað, og hvar hann so gekk, bar hann hvílu og frið, frøi og gleði við sær.

Frelsari okkara var sera álvarsamur, men hann var aldri dapurskygdur ella tvørur. Lív teirra, sum taka sær hann til fyrimynd, vil verða merkt av álvarsemi og vilja til at gera væl. Tey vilja hava eina sterka ábyrgdarkenslu. Øll líkasæla má víkja. Tey halda ikki larmandi gang og koma ikki við grovum skemti. Jesu trúgv gevur frið sum áin. (Jes. 48,18) Henda trúgv sløkkir ikki gleðinnar ljós

og setir ikki forboð fyri at vera í góðum lag. Hon myrkir ikki fyri einum glaðum og smílandi andliti. Kristus kom ikki til jarðar at lata sær tæna, men heldur fyri at tæna. Og tá ið hansara kærleiki ræður í hjartanum, so fylgja vit hansara fyridømi.

Um vit javnan ganga og hugsa um óvinarligar og órættvísar
[128] gerðir hjá øðrum, tá verður tað ógjørligt hjá okkum at elska tey, soleiðis sum Kristus elskaði okkum. Men lata vit okkara tankar dvølja við Kristi undurfulla kærleika og samkenslu við okkum, so vilja vit vísa sama sinnalag ímóti øðrum. Vit eiga at elska og virða hvør annan hóast tey brek og ófullkomileikar, sum vit ikki komast undan at síggja. Vit eiga at leggja dent á spaklyndi og lítillæti, vera tolin og bera yvir við mistøkum hjá øðrum. Slíkt ruddar burtur alla smáliga sjálvgóðsku og ger okkum bæði stórsinnað og hjartagóð.

Sálmaskaldið sigur: *„Lít tú á Harran og ger tað góða, búgv tú í landinum og stunda á trúskap."* Sálm. 37,3. Hvør dagur hevur sína byrðu, trupulleikar og royndir. Og hvussu skjót eru vit ikki til at tosa um okkara trupulleikar og royndir, tá vit hittast. So nógvir ímyndaðir trupulleikar treingja seg inn í hugaheimin, og vit eru so óttafull og tala so nógv um sorgir og stúran, at ein kundi hildið, at vit ikki eiga ein miskunnsaman Frelsara, sum vil lurta eftir øllum okkara bønum og altíð vera okkum ein trygg hjálp í neyðini.

Summi eru altíð óttafull og plágast av ímyndaðum trupulleikum. Hvønn dag eru tey umgird av teknum um Guds kærleika. Hvønn dag njóta tey gott av gávum í yvirflóð frá forsjón hansara, men hesum signingum geva tey ikki gætur. Tey hugsa altíð um okkurt óhugnaligt, sum tey bera ótta fyri fer at henda teimum. Ella tað kann vera ein ella annar veruligur trupulleiki, hvussu lítil hann enn er, sum kortini letur eygu teirra aftur fyri tí nógva, sum átti at vakt
[129] takksemi. Teir trupulleikar, ið tey møta, ger tey órólig og gremjandi. Og hetta skilur tey tí frá Gudi, ístaðin fyri at leiða tey til hansara, ta einastu kelduna, har hjálpin er at finna.

Gera vit rætt í at vísa slíka vantrúgv? Hví skulu vit vera so ótakksom og vísa so lítið álit? Jesus er okkara vinur. Allur himmalin hevur áhuga í okkara vælferð. Vit eiga ikki at loyva trupulleikum og sorgum í gerandisdegnum at plága sinnið og gera okkum tunglynt og døpur á at líta. Um vit gera tað, verður tað altíð okkurt, ið plágar og tyngir. Vit eiga ikki at vera stúrin, tí hetta ger okkum bert døpur í huga og veik. Og tað hjálpir ongum at standa ímóti royndum.

Kanska hevur tú trupulleikar í tínum arbeiði. Kanska sær tað myrkari og myrkari út, og kanska endar tað við einum tapi. Men miss ikki mótið. Kasta alla tína sorg á Harran, ver róligur og hav gott treysti. Bið Gud um at geva tær vísdóm til at stýra tínum viðurskiftum við skili, so at tú kanst sleppa undan tapi og ólukku. Ger alt tað, tú kanst, fyri at fáa eitt gott úrslit. Jesus hevur lovað hjálp sína, men ikki uttan, at vit eisini gera okkara part. Tá ið tú í áliti til hansara, sum er okkara hjálpari, hevur gjørt tað, sum tú kanst, so tak við treysti ímóti úrslitinum.

Tað er ikki Guds vilji, at fólk hansara skulu falla í fátt av stúran. Harri okkara villleiðir okkum ikki. Hann sigur ikki við okkum: „Óttast ikki, eingin vandi er á ferð.“ Hann veit, at royndir og vandar eru, og hann fjalir tað heldur ikki fyri okk-um. Hann sigur ikki, at hann vil taka børn síni út úr einum syndugum og spiltum heimi, fyrrenn tíðin er búgvin. Men hann vísir teimum á ein tryggan griðstað, [130]
sum ongantíð svíkur. Hann bað soleiðis fyri lærusveinum sínum: *„lkki biði eg, at tú skalt taka teir burtur úr heiminum, men at tú skalt varðveita teir frá tí illa.“ „Í heiminum,“ sigur hann „hava tit trongd; men havið gott treyst, tí eg havi vunnið sigur av heiminum.“* Jóh. 17,15 og 16,33.

Í fjallarøðuni gav Kristus lærusveinunum dýrabaran lærdóm um, hvussu neyðugt tað er at líta á Gud. Ætlanin við hesi frálæru var at troysta og ugga Guds børn gjøgnum allar tíðir. Og tey, sum liva á síðstu døgum, kunnu finna miklan lærdóm og ugga í hesum.

Frelsarin vísti lærusveinunum á fuglar himmalsins, sum sungu teirra lovsong uttan at stúra fyri nøkrum, tí at *„teir sáa ikki, ei heldur teir heysta.“* Og tó gevur faðirin á himli teimum tað, sum teimum tørvar. Frelsarin spyr: *„Eru tit ikki mikið meir verdir enn teir?“* Matt. 6,26. Hin stóri skaparin, sum bæði hugsar um menniskju og dýr, letur upp hond sína og mettar allar skapningar sínar. Fuglarnir í luftini eru ikki so lítið verdir, at hann gloymir teir. Hann letur ikki føðina detta inn í nevini á teimum; men hann sær til, at teir fáa tað, sum teimum tørvar. Teir mega sjálvir henta kornið, ið hann hevur tilbúgvið teimum. Teir mega sjálvir samla tilfarið saman til síni smáu reiður. Fuglarnir mega finna føði til ungar sínar og mata teir. Teir fara syngjandi til verka, tí *„himmalski faðir tykkara føðir teir.“* Og *„eru tit ikki mikið meir verdir enn teir?“* Eru tit, sum tilbiðja Gud við skilinum og í andanum, ikki meira verd enn fuglarnir? Hann

[131] gav okkum lívið, skapaði okkum í síni egnu mynd og varðveitir lív okk-ara. Man hann ikki geva okkum tað, ið okkum tørvar, um vit bert líta á hann?

Kristus vísti lærusveinunum á tær mongu ymisku blómurnar á bønum, ið lýstu av einføldum vakurleika, sum himmalski faðirin hevur givið teimum. Hann klæddi tær soleiðis fyri at vísa sín kærleika til menniskjuni. Hann segði: *„Gevið tykkum far um liljurnar á markini, hvussu tær vaksa.“* Matt. 6,28. Vakurleikin, sum hesar blómur í náttúruni hava, fer langt fram um dýrd Sálomons. Tað prýðiligasta plaggið, sum menniskjans kynstur kann skapa, kann als ikki samanlíknast við tað náttúrliga yndi og tann Ijómandi vakurleika, sum blómurnar á bønum eru ílatnar, og sum Gud hevur skapað. Jesus spyr: *„Men tá ið nú Guð soleiðis klæðir grasið, sum í dag stendur á markini, men í morgin verður blakað í ovnin, man hann tá ikki mikið meir klæða tykkum, tit fátrúnu?“* Matt. 6,30.

Tá nú Gud, hin himmalski listamaðurin, gevur teimum einfaldu blómunum, sum følna eftir einum degi, teirra prýðiligu og ymisku litir, hvussu mikið meira umsorgan hevur hann tá ikki fyri teimum, sum eru skapað í hansara egnu mynd. Hesin lærdómur frá Kristusi er ein rætting av framferðini hjá tí vantrúna hjarta, sum er óttafult, óróligt og í iva.

Harrin ynskir, at allir synir og døtur hansara skulu vera glað,
[132] friðsæl og lýðin. Jesus sigur: *„Mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki!“ „Hetta havi eg talað til tykkara, til tess at gleði mín kann vera í tykkum, og gleði tykkara kann verða fullkomin.“* Jóh. 14,27; 15,11.

Tann eydna, sum fólk leita eftir í sjálvsøkni, og sum einki hevur við okkara skyldur at gera, er óálítandi, lumpin og stokkut. Hon hvørvur og mannasálin fyllist við einsemi og sorg. Men tænastan fyri Harran gevur gleði og nøgdsemi. Ein kristin nýtist ikki at ganga eftir ótryggum vegi og standa eftir við fáfongdari stúran og sorgum. Fellur eydnan okkum ikki í lut í hesum heimi, kunnu vit kortini gleða okkum og líta fram eftir til hitt komandi lívið.

Tey kristnu kunnu eisini her á jørð gleða seg um samveruna við Kristus. Tey kunnu njóta Ijósið frá hansara kærleika og hina støðugu uggan av hansara nærveru. Fyri hvørt fótafet í lívinum kunnu vit koma nærri Jesusi, og vit kunnu fáa eina djúpari fatan av hansara

kærleika og koma nærri til tað signaða heimið, har friðurin ræður. Latið okkum tí ikki kasta dirvi okkara frá okkum, men hava eina fullvissu, sum er størri enn nakrantíð áður. *„Higartil hevur Harrin hjálpt okkum,“* og hann vil hjálpa okkum heilt til endans. 1.Sám. 7,12. Latið okkum líta aftur á tað, Harrin hevur gjørt fyri at troysta okkum og fyri at bjarga okkum undan hond oyðileggjarans. Latið okkum goyma væl í minni alla ta eymu náði, sum Gud hevur víst okkum - tey tár, hann hevur turkað burtur, tær pínur, sum hann hevur linnað, tær sorgir, ið hann hevur javnað, tann ótta, hann hevur tikið burtur, ta neyð, hann hevur hjálpt okkum úr og tær signingar, sum [133]
okkum fullu í lut. Alt hetta styrkir okkum í øllum tí, sum eftir er av pílagrímsferð okkara.

Vit koma at fáa nýggjar trupulleikar í komandi stríðnum, men vit kunnu tá líta aftur á tað, sum farið er, eins væl og at tí komandi, og siga: *„Higartil hevur Harrin hjálpt okkum.“* Royndirnar verða ikki størri enn styrkin, ið Harrin vil geva okkum, so vit kunnu halda tær út. Vit kunnu tí fara til verka, har tað tørvar og trúgva, at hvat, ið enn henda kann, so fáa vit styrki í mun til royndirnar.

Einaferð verða himmalsins portur latin upp fyri Guds børnum. Tá fara tey at hoyra hesi signaðu orð frá kongi dýrdarinnar, sum hin fagrasta tónleik: *„Komið higar, tit hini vælsignoðu hjá faðir mínum, og fáið ríkið tað í arv, sum tykkum hevur veri lagað, frá tí at verøldin var grundað!“* Matt. 25,34.

Tá verða tey endurloystu boðin vælkomin til tað heim, sum Jesus hevur gjørt teimum til reiðar. Her verða tey ikki saman við gudleysum jarðarbúgvum, lygnarum, skurðgudadýrkarum, óreinum og vantrúgvandi. Men tey skulu savnast við teimum, sum hava sigrað á Satan, og sum av Guds náði hava fingið eitt fullkomið lyndi. Hvør synd, sum lá til teirra lyndi og hvør ófullkomileiki, sum tyngdi tey her, er tikin burtur við blóði Kristusar. Hann íklæðir tey sína dýrd og Ijóma, sum er bjartari enn sólarljómin. Hansara andaligi vakurleiki og fullkomileikin í hansara lyndi skínur ígjøgnum tey og sæst langt framum allan útvortis Ijóma. Tey standa lýtaleys frammanfyri hinum [134]
mikla, hvíta hásæti og fáa lut í tignini og teimum forrættindum, sum einglarnir hava.

*„Hvat skal maður geva í viðurlag fyri sál sína“*, tá ið hann hugsar um tann dýrdarríka arv, sum hann kann fáa? Matt. 16,26. Ein kann vera fátækur her, men kann kortini eiga eitt ríkidømi og

eina tign, sum heimurin aldri kann veita. Hvørt menniskja, sum er endurloyst og reinsað frá synd, og hvørs stórbæru evnir øll eru halgað í tænastu Guds, hevur eitt ómetaligt virði. Og tað er gleði í himli framman fyri andliti Guds og milium teir heilagu einglarnar um hvørt einasta endurloyst menniskja; ein gleði, sum kemur fram í heilagum sigurssongi.